2. Tað undir pkt. 1. veitta loyvi og ábyrgd er treytað av, at yvirslagið fyri Skopunar kommunu í framtíðini skal sendast løgtingsskrivstovuni og góðkennast av skrivstovustjóranum fyri at vera bindandi.

23. okt. samtykt 13—0.

5. Jarðasøla – Porkeris kommuna.

Álit:

Sóknarstýrið fyri Porkeris kommunu søkir í brævi, dagssett 24. august í ár tingið um loyvi til at selja fylgjandi jarðastykkir:

Matr. nr. 109, stórt 290 m² til Aage Djurhuus, nr. 110, 280 m² til Svend Jensen, nr. 118, 252 m² til Elisabeth Lervig, nr. 129, 288 m² til Hendrik Vejhe Joensen, nr. 130, 300 m² til Johan O. E. Mortensen fyri 85 oyrur pr. m², matr. nr. 22 til Sigmund og Juel Sundberg fyri 300 kr., og matr. nr. 17—18—27 og 28 fyri 150 krónur hvørt.

Í umsóknini er greitt frá, at matr. nr. 109—110—118—129—130 skulu nýtast til húsagrundir og hava kostað kommununi í meðalprísi 60 oyrur pr. m²; hini matr. nr. 17—18—22—27—28 skulu nýtast til neystaplass og hava kostað tilsamans 500 krónur. Ætlanin er — sigur kommunustýrið — at vinningurin o. a. 400 kr. skal nýtast til at regulera prísir niðureftir á øðrum neystagrundum, sum vóru dýrari at keypa, og til endurgjald fyri rentutap.

Í 1938 søkti og fekk kommunustýrið loyvi til at selja tvey jarðastykkir, sum kommunan hevði keypt undir útskifting av innangarðsjørðini í Porkeri, men varð tað treytað av, at tann við søluni innkomni peningur skuldi nýtast sum eykaavdráttur av tí láni, ið varð tikið til keyp av hesi og aðrari jørð, og sum tingið hevði ábyrgdina av. (Sbr. tingtíðindi fyri 1938, blaðsiðu 175.)

Í einum øðrum brævi eisini dagssett 24. august í ár heitir sóknarstýrið á tingið og biður um, at hendan treytin verður strikað, soleiðis at sóknarstýrið frítt kann ráða yvir tí við søluna innkomna peningi. Hendan seinra umsóknin verður grundað við tí, at Porkeris kommuna hevur so stórar útreiðslur til ymisk kommunal mál, at tað fyri tíðina er ógjørligt út yvir vanliga rentu og avdrátt av láninum eisini at rinda eykaavdrátt.

Kommunala nevndin skal mæla til, at kommunan fær loyvi til at selja tey í álitinum nevndu matr. nr., tó soleiðis, at allur tann peningur, ið kemur inn við søluna, verður nýttur til afturrindan av láninum. Nevndin er eisini á einum máli um, at tað vildi verið ynskjandi, at kommunan í framtíðini, hvørja ferð tílíkar umsóknir verða sendar inn á ting, hevði givið eitt yvirlit yvir:

1) hvat ið er afturrinda av láninum (upprunaligt 11.000 kr.)
2) hvat selt er av jørðini (upprunaliga 17815 m²).
3) hvussu mikið er eftir av óseldari jørð.

Beinast hevði verið, um kommunan hevði havt eina serliga konto yvir hesar jarðir, so tað til eina og hvørja tíð sást, hvussu støðan var.

Samstundis sum vist verður á tað, ið fram er flutt í álitinum, skal nevndin mæla tinginum til at samtykkja hettar

Uppskot:

1) Loyvt verður Þorkeris kommunu at selja tey í álitinum nevndu matr. ur. undir teirri treyt, at peningurin verður nýttur til afturrindan av tí láni, ið upp varð tikið til keyp av hesi jørð.
2) Eitt eintak av álitinum verður sent kommunustýrinum fyri Þorkeris kommunu.

8. okt. samtykt 16—0.

---

6. Loyvi til Skopunar kommunu til eigindómskeyp.

Álit:

Sóknarstýrið fyri Skopunar kommunu hevur umsókn á tingi um at fáa loyvi til at keypa

a) frá Oliver Eystberg, keypmanni, Skopun, eitt jarðastykki „uttan fyri Stóraneyst", støðd 179 m², keypisum 1.050 kr., og
b) frá Jens Marius Poulsen, keypmanni, Skopun, neystatoft („Stóraneyst"), støðd 109 m² fyri 1.600 kr.

Sum skjal í málinum er viðlagt

1) keypikontrakt, dagsett 24. juni í ár viðvíkjandi tí fyrru jarðastykkinum, undirskrivað av O. Eystberg sum seljara og sum keypara vegna kommununa Johan M. Joensen. 700 kr. av keypisummini skulu rindast, tá ið kontraktin varð undirskrivað, tað sum frestar innan $^{31}/_{12}$ 1941. Um restpeningurin ikki verður goldin til ta ásettu tíð, verður hann at rinda við 5 % u. á. frá nevndu tíðarfreist.
2) Skjal (skjøti), dagsett 26. august í ár, undirskrivað av Jens M. Poulsen og Andrea Poulsen.

Í setuni 1939 játtaði tingið at volta sum studning til Skopunar havn 2.000 kr. Hesin peningur var ætlaður til at tryggja bátarnar fyri brim, tá ið uppgangur var. Eftir uppskoti av verkfrøðingi Fonsdal skuldi setast upp steyrar við tvørbjálkum, sum bátarnir kundu verða lyftir uppá, tá ið ódnarbrim var. Seinri hevur havnarstýrið fyri Skopunar havn tingast við Lands-

nevndina um hendan spurning og av henni fingið loyvi til at keypa tey framman undan nevndu pláss, sum tað so var meiningin at seta bátarnar á.

Hesi pláss liggja so langt frá sjóarmálanum, at bátar altíð kunnu standa vandaleysir har.

Kommunala nevndin, ið hevur málið til viðgerðar, skal mæla tinginum til at veita kommununi loyvi til at keypa jarðastykki frá O. Eystberg, tó prísurin má haldast at vera væl so høgur, nevniliga 5,87 kr. pr. m².

Harafturímóti heldur nevndin prísin á stykkinum frá Jens M. Poulsen ca. 14,68 kr. pr. m² vera so høgan, at hann ikki kann góðkennast. Stykkini liggja hvørt upp at øðrum og kunnu tí ætlast at vera av eins virði, munurin er bara tann, at einir neystaveggir standa á stykkinum hjá Jens M. Poulsen og fylgja við í keypinum, meðan hitt er óbygt; men má hetta ætlast at verða uttan virði fyri kommununa vegna ta nýtslu, hon ætlar at hava av hesum plássum. Prísmunurin kr. 8,81 pr. m² er tí ov stórur.

Nevndin skal mæla til, at tað verður givið landsnevndini upp í hendi at tingast við Jens M. Poulsen um ein meira hóskandi prís, og at hon — um tað eydnast — fær heimild til at geva kommununi tað umsøkta loyvi.

Uppskot.

1) Loyvi verður givið Skopunar kommunu at keypa jarðastykkið stórt 179 m² frá O. Eystberg, Skopun, soleiðis sum ásett í keypikontrakt av $^{20}/_{6}$ h. ár.
2) Landsnevndin verður biðin um at tingast við Jens M. Poulsen, Skopun, um ein meira lagaligan prís. Um so er, at tað eydnast at koma á samt um ein hóskandi prís, verður landsnevndin heimilað at velta tað umsøkta loyvi.

Broytingaruppskot frá J. Poulsen og A. Sørensen:

Til nevndarinnar uppskot verður sett sum nýtt pkt. 3):

„Um tingingarnar við Jens M. Poulsen ikki føra á mál, verður landsnevndin heimilað til at velta kommununi loyvi til at ekspropriera nevnda pláss."

Broytingaruppskotið og nevndaruppskotið samtykt 7. okt. við 16—0.

7. Loyvi til Froðbiar kommunu til eigindómssølu.

15/9 samtykt soljóðandi uppskot til gerðabókina:

Loyvi verðnr givið Froðbiar kommunu at selja til Haus David Sofus Hjalmar Joensen, Froðbø, matr. nr. 115 í Froðbø við úbygdum sethúsi fyri 1.200 kr.

8. Loyvi til Vágs kommunu til eigindómskeyp.

17/9 samtykt hetta uppskot til gerðabókina:

Loyvi verður givið Vágs kommunu at keypa av festinum hjá Jeser Jacobsen í Vági eitt jarðastykki 92,5 m² fyri 55,50 kr.

9. Ekspropriatión av sandi í Norðragøtu.

Álit (Danbjørg óheftur):

Málið viðvikjandi tøku av sandi í Norðragøtu til ábreiðslu á vegirnar í Gøtu kommunu varð sent inn á ting í setuni 1939, og samtykti tingið hettar ár soljóðandi uppskot:

„1) Sóknarstýrið í Gøtu verður biðið um at lata byggja eitt hóskandi tal av byrgjum fram gjøgnum Stóra til at savna áarmøl til ábreiðslu á vegirnar.
2) Skuldu royndir vist, at tað á hendan hátt ikki læst nóg nógv tilfar til at halda vegirnar í góðum standi, heitir tingið á sóknarstýrið um at tingast við bóndur og óðalsmenn í báðum Gøtunum og fáa í lag ein sáttmála, ið gevur sóknarstýrinum rætt til at nýta eina hóskandi nøgd av sandi til vegirnar í kommununi móti hóskandi gjaldi.
3) Um so verður, at tað ikki eydnast sóknarstýrinum at fáa ein tílíkan sáttmála í stand við íbúgvararnar, verður landsnevndin biðin um at halda fram við tingingunum. Eydnast tað heldur ikki landsnevndini at koma til ein rímiligan sáttmála, verður málið viðvíkjandi expropriatión av sandi at taka upp aftur til viðgerðar á tingi."

Síðan tá hevur sóknarstýrið greitt landsnevndini frá, at tað ikki hevur verið gjørligt at skaffa til vegis ta nøgd av áarmøli, sum skal til, um vegirnir skulu vera hildnir í góðum standi, eins og tað ikki hevur eydnast sóknarstýrinum at fingi sáttmála í lag við eigarnar.

6. septbr. í ár var landsnevndin í Gøtu fyri um møguligt við tingingar á staðnum at fáa sáttmála partarnar millum.

Uppskot til sáttmála varð undirskrivað av sóknarstýrinum vegna kommununa, landsnevndarlimunum vegna landsnevndina, meðan limirnir av hagastýrinum fyri teir 5 hagapartarnar í Norðagøtu ikki hava skrivað undir vegna eigarnar. Seinri er bræv komið, sum sigur, at hagastýrini fyri tveir hagapartar: „Fyri innan eld" og „Yviri á dal" vilju undirskriva sáttmálan, meðan teir, ið umboða hinar triggjar hagapartarnar, ikki vilja.

Harvið er sjálvur sáttmálin eins og tey tilboð, landsnevndin setti fram viðvíkjandi studningi til betongarðar til beinan av ánni og verju av bønum, dottin burt.

Tá ið allar royndir um at koma ásamt við tingingar vegna mótstøðu frá einum meiriluta av eigarnum hava verið uttan úrslit, er støðan tann, at málið um tøku (ekspropriatión) verður at taka upp aftur til viðgerðar, og skal nevndin harum siga hettar:

Tær galdandi reglur viðvíkjandi tøku av sandi og øðrum til kommunala nýtslu innihaldast í „Lov Nr. 69 af 7. Maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler paa Færøerne". Tað sæst, at kommunustýrið er farið regluliga fram; tøkan er samtykt á stjórnarlundi, og varð samtyktin so send í „rekommanderaðum" brævi til teir eigarar, ið noktað høvdu sand og lýst í lýsingartalvum og á annan hátt sum fyriskrivað í lógini.

Norðragøtumenn mótmæltu innan fyri ta í lógini ásettu tíðarfreist og løgdu spurningin inn á ting, har hann hevur verið síðani. Síðan tá hava løgting og landsnevnd roynt einhvønn møguleika fyri at fáa semju partarnar

millum um spørningin, men hevur einhvør royND og eitthvørt tilboð altíð verið afturkastað av einum meiriluta av eigarnum. So statt vil nevndin mæla tinginum til at góðkenna ta samtykt, Gøtu kommuna hevur gjørt um tøku av sandi, av tí at tað almenna má hava sand til viðlíkahald av vegnum í kommununi, og eru tí eigarnir skyldugir at lata sand móti endurgjaldi, samanber lóg nr. 69 av $^{7}/_{5}$ 1881, § 5, hareftir kommunurnar hava rætt til at taka sand til viðlíkahald av vegum eftir teimum í lógini ásettu regium móti hóskandi endurgjaldi fyri virðið av sandinum og fyri annan skaða, ið tøkan kann voldað.

Av tí at tað neyvan verður gjørligt at fáa semju í lag um støddina av endurgjaldinum o. ø., verður tað ólvað neyðugt, at sorinskrivarin peikar út tveir menn, ið koma at taka avgerð um, hvussu nógvur sandur árliga kann takast uttan at valda mein, meta virði av sandinum og møguligt annað.

Uppskot:

1) Eftir øllum tí, ið fram er komið undir viðgerðini av málinum, er tað tingsins áskoðan, at samtykt sóknarstýrisins av $^{18}/_{3}$ 1939 um tøku av sandi til almenna nýtslu er tørvandi og eigur at standa við makt.
2) Eitt eintak av álitinum verður sent sóknarstýrinum í Gøtu, Norðagøtu boltfelag og Simon P. Hansen o. fl., Norðagøtu.

Broytingaruppskot frá Øregaard o. fl.

Í staðin fyri uppskot nevndarinnar verður sett:

1. Álagt verður sóknarstýrinum í Gøtu at lata byggja eitt hóskandi tal av byrgjum fram gjøgnum Stórá, soleiðis sum av tinginum samtykt í 1939.
2. Skuldu royndirnar vísst, at tað á hendan hátt ikki fæst nóg nógv tilfar til at halda vegirnar í góðum standi, verður málið um expropriatión at taka upp aftur til viðgerðar á tingi næsta ár.

28. okt. broytingaruppskotið fall 4—0, nevndaruppskotið samtykt 16—0.

10. Loyvi til Vágs kommunu til eigindómskeyp.

Bræv um loyvi at keypa 1830 m² frá D. O. Olsen fyri 6000 kr. og 620 m² frá Elisabeth Dahl fyri 1900 kr.

20. okt. samtykt: „Umsøkta loyvi verður givið".

XIII. Ymisk studningarmál.

Sí fíggjarætlan fyri økonomiska grunnin s. 4 og skjal nr. 8.

1. Studentaskúlin.

Álit:

Í tveimum ritum av 8. august hevur stjóriu fyri studentaskúlanum greitt frá skúlans yrki 1940—41 og sett fram kostnaðarætlan fyri 1941—42.

Skúlin byrjaði við 44 næmingum, og hava 5 tikið studentaprógv og 10 preliminerprógv. 16 vóru fluttir upp í studentaklassa, 15 upp í 2. klassa. Av 9 næmingum í 1. preliminerklassa vóru 8 fluttir upp í 2. klassa.

Um hvussu prógvtakingin er farin fram í ár, nú sambandið við Danmark hevur verið slitið, skrívar Nygaard stjóri:

„Av tí at sambandið við Danmark enn var slitið, og soleiðis ongar skrivligar uppgávur og eingir censorar kundu koma haðani, gjørdu Chr. Lützen, yvirlærari, og undirskrivaði uppskot til nevnd at smíða skrivligar uppgávur til tær ymisku eksamenar og eisini uppskot til censorar og sendu skúlastjórnini. Eksamen varð so hildin sum vanligt í mai—juni, og eins og í fjør vórðu prógvini hjá studentum og preliminaristum undirskrivað av amtmanninum sum formanni í skúlastjórnini.

Allir næmingarnir, sum vórðu innstillaðir av studenta og preliminerskeiðinum, komu igjøgnum."

Um skúlagongdina verður sagt:

„Hóast oksamensúrslitini í ár yvirhøvur eru sera góð, hevur hetta árið í mangar mátar verið meira trupult enn hini.

Eitt tað ringasta hevur verið at útvega tær neyðturvuligu bøkur. Myrkaleggingin hevur gjørt tað enn meira óhugnaligt at ganga í skúla um kvøldið; myrkt er úti og illa ber til at gloppa einum vindeyga fyri at fáa fríska luft inn í klassan. Eisini hevur undirvísingin ofta verið órógvað av luftalarmi; um páskatíð var so ringt, at kommunuskúlin varð stongdur fyri eina tíð; eisini realskúlin og seminariið tóku eina longri páskaferiu, og spurningurin um at steingja studentaskúlan eisini eina tíð varð fyrilagdur landsnevndini, sum svaraði, at vit skuldu gera, sum vit vildu, og so varð hildið áfram; tó fingu teir næmingar, sum ynsktu tað, loyvi til at fara heim; men teir allarflestu blivu verandi.

Tíbetur hendi einki, og hóast alt kom skúlaárið at enda við betri úrslitum enn nakrantið áður."

Sambart rit stjórans liggja útreiðslur og inntøkur skúlans soleiðis: Útreiðslurnar verða so:

I. *Lærarløn:*, eftir lønskipan samtykt av løgtinginum í seinasta tingsetu.

Kr. Haraldsen,	grundløn	um mán.	325,00 kr.	um árið	3.900 kr.
	dýrtíðartillegg	„ „	55,50 „	„ „	666 „
	1. aldurstillegg	„ „	27,50 „	„ „	330 „
	tilsamans	„ „	408,00 kr.	„ „	4.896 kr.
Erik Petersen,	grundløn	um mán.	325,00 kr.	um árið	3.900 kr.
	dýrtíðartillegg	„ „	55,50 „	„ „	666 „
	1. aldurstillegg	„ „	27,50 „	„ „	330 „
	1. eykatíma	„ „	10,00 „	„ „	120 „
	tilsamans	„ „	418,00 kr.	„ „	5.016 kr.
N. Ladegaard Petersen,	grundløn	um mán.	325,00 kr.	um árið	3.900 kr.
	dýrtíðartillegg	„ „	55,50 „	„ „	666 „
	1. aldurstillegg	„ „	27,50 „	„ „	330 „
	2. eykatímar	„ „	20,00 „	„ „	240 „
	tilsamans	„ „	428,00 kr.	„ „	5.136 kr.
J. E. Bergstedt,	grundløn	um mán.	325,00 kr.	um árið	3.900 kr.
	dýrtíðartillegg	„ „	18,50 „	„ „	222 „
	1. aldurstillegg frá $^{1}/_{10}$ 1941		27,50 „	„ „	275 „
	1. eykatíma	„ „	10,00 „	„ „	120 „
	3. eykatímar í 5 mánaðar				150 „
	tilsamans	„ „	?	„ „	4.667 kr.

T. Nygaard, grundløn	um	mán.	325,00	kr.	um	árið	3.900 kr.
dýrtíðartillag	„	„	37,00	„	„	„	444 „
2. aldurstillegg	„	„	55,00	„	„	„	660 „
fyristøðuløn					„	„	500 „
kantórhald					„	„	150 „
tilsamans			?				5.654 kr.

Læraralønir ialt	25.369 kr.
II. Húsalelga, hiti og reingerð	1.400 „
III. Ymist, o. u.	231 „
Samlaðar útreiðslur, o. u.	27.000 kr.

Inntøkur:

Skúlapeningur, o. u. 40 næmingar á 200 kr. um árið		8.000 kr.
Studningur frá státinum		
1. fyri 5 studentar	o. u.	2.000 „
2. fyri 10 preliminaristar	o. u.	1.400 „
Tilskot frá Havnar býráðt	o. u.	1.000 „
Samlaðar inntøkur	o. u.	12.400 „
Undirskot, o. u.		14.600 kr.

Í hesi fíggjarætlan eru hesar nýggju útreiðslur roknaðar við: 1 aldurstillegg til hvønn av teimum báðum lærarunum Bergstedt og Ladegaard Pedersen. Hin fyrri kom higar um miðjan oktober 1938 og eigir soleiðis eftir vanligum reglum at fáa sína fyrstu lønhækkan frá 1. oktober í ár. Hin seinri kom um somu tíð, men hevði tá virkað við Metropolitanskúlan frá august, og eigir hann soleiðis at fáa lønhækkan frá 1. august í ár. Eg sjálvur eigi sambart løgtingsviðtøkuna at fáa tvey aldurstilleggini, sum eg hevði við realskúlan, og fult dýrtíðartillegg fyri ein ógiftan yvir 40 ár.

Í skrivi av 10. oktober 1941 søkir Nygaard skúlastjórtum, at lærarar studentaskúlans skulu fáa somu løn og somu aldurstillegg og í heita takið somu kor, sum adjunktar hava í Danmark. Sum nakrar av teim grundum, sum kunnu førast fram fyri eini tilíkari lønumskipan, nevnir stjórin, at skúlin kann ikki væenta, at góðir lærarar vilja vera her fyri minni løn, enn teir annars kunnu fáa niðri í Danmark, tá ið kríggið einaferð heldur uppat; og úrslitið vil, heldur hann, uttan iva verða, at skúlin søkkur niður á eitt lægri nivean, og tá er meira tapt enn vunnið við at spara teir pengarnar.

Fyri seg sjálvan søkir hann um annaðhvørt at verða loystur frá studentaskúlanum ella at tryggja honum soleiðis, at hann kann siga plássið við realskúlan frá sær. Viðvíkjandi permissión síni frá realskúlanum sigur hann:

„Tingið samtykti at søkja skúlastjórnina um at geva mær permissión frá realskúlanum, og eg lat mær eftirlíka í hesum, um so var, at eg einki misti við tað. Men beint undan summarferiuni fekk eg bræv frá skúlastjórnini um, at eg kundi fáa permissión *í eitt ár,* men at *hetta so mátti trekkjast frá mínum tænastaaldri,* tó at eg nettupp hevði sett sum treyt, at eg ikki vildi missa nakað av mínum tænastualdri; men tíðin varð so langt útliðin, at eg fekk einki gjørt, og halda fram sum áður vildi eg ikki. Eg veit ikki,

um hetta lær nakað at týða, men skuldi tað verið, má eg søkja tingið um at góðgera mær tað eventuella tapið, eitt árs anciennitet. Síðani má eg søkja tingið um ein loysning uppá hetta, tí tann permissión, eg havi fingið, leypur út til summarferiuna; eg veit ikki, um hon kann leingjast, men eg vil, ið hvussu er, ikki missa fleiri árs anciennitet".

Lønini viðvíkjandi skrívar hann:

„Tann løn, eg higartil havi fingið sum fyristoðumaður við studenta- og preliminerskeiðinum, er 500 kr. um árið. Mær tykist hetta er alt ov lítið. Uttan at vilja nevna, hvat fyristøðumenn fyri studentaskúlar annars fáa, loyvi eg mær at minna á, hvat fyristøðumaðurin fyri lærararskúlan, við 14 næmingum í einum klassa, við eksamen 4. hvørt ár, fær. Eg haldi, at fyristøðumaðurin fyri studentaskúlanum, við 50 næmingum í 4 klassum við 2 eksamium um árið, átti, ið hvussu er, ikki at fingið minni".

At enda søkir hann um eina telefon til skúlan.

Í málinum er upplýst, at studentaskúlin ikki formelt er statsgóðkendur.

Nevndin hevur haft samráðingarfund við Nygaard stjóra og Hilbert amtmann um ymiskar spurningar skúlanum viðvíkjandi. Serliga varð haft á loftið:

1. hví ikki Nygaards árlov frá realskúlanum fyri at kunna vera heilt við studentaskúlan, kann telja við í hansara tænastualdur,
2. um tað hevur nakra ávirkan á tey rættindi, ið studentaprógv vanliga geva viðvíkjandi framhaldslestri við t. d. lærda skúla í Keypmannahavn, at skúlin formelt ikki er statsgóðkendur.

Til fyrsta spurningin helt amtmaðurin, at viðkomandi skúlalóg gjørdi tann mun á „Skole" og „Kursus", at tað bert vóru „Skoler", sum beinleiðis kvalificeraðu árlovstíðina at telja í útrokningini av tænastualdrinum. Og tá ið føroyski studentaskúlin mátti roknast við eitt „Kursus", helt hann tað ikki bera til hjá honum statsins vegna at avgera, at Nygaards árlovstíð skuldi roknast upp í tænastualdurin. Men skúlamáláraðlið kundi gera undantøk, og amtmaðurin segði, at roknast kundi við, at tað eisini viðvíkjandi Nygaard vildi gera undantak, so hansara árlovstíð við studentaskúlan verður at telja við í hansara tænastualdri. Amtmaðurin lovaði, at hann, ið hvussu var, vildi mæla til, at hetta varð gjørt, so skjótt sambandið var komið aftur í lag við rikisstjórnina í Danmark.

Viðvíkjandi statsins góðkennan av studentaskúlanum sigur skúlastjóri Nygaard, at tað formella ritið frá skúlamálaráðnum til góðkennan av skúlanum er ætlandi ikki vunnið fram. Men skúlin má vernnliga haldast at vera statsgóðkendur, tí fyri fyrst hevur hann fingið øll tey rættindi og lætta viðvíkjandi prógvtøkini, sum fylgir við statsgóðkennan, og sum privatskeið ikki fáa, tá ið tey ikki eru statsgóðkend. Til gjøllari frágreiðing og prógv fyri hesum hevur Nygaard latið nevndina fingið hjálagda rit frá undirvísingarinspektøri Højberg Christensen. Men annars eru amtmaðurin og skúlastjórin samdir um, at tað viðvíkjandi øllum framhaldslestri ikki skerjir studentaprógvið, um skúlin ikki skuldi verið góðkendur av statinum.

Við fundarslitið lovaði Nygaard, at hann so skjótt sum tilbar skuldi lata nevndina fáa at vita sína støðu til spurningin um at halda fram við studentaskúlanum.

Í brævi av 30. oktober 1941 hevur so Nygaard svarað uppá hetta spurning, har hann heldur fram:

„Á fundi í fíggjarnevnd løgtingsins 22. h. m., har løniðurskiftir hjá lærurunum við studentaskúlan vóru til umrøðu, varð eg biðin um at seta fram uppskot til skipan av míni egnu støðu.

Tað var ivaleyst best, um eg sum fyristøðumaður skúlans hevði mítt fasta pláss við pensiónsrættindum við hendan skúlan; men eg skilji fullvæl, at hetta kanska ikki ber so væl til nú, og at løgtinginum ikki dámar at binda seg til nakað, áðrenn ein endilig skipan kemur í lag. Heldur ikki dámar mær heilt væl at verða favoriseraður fram um hinar lærararnar. Eg skal tí skjóta upp, at tað aftur verður søkt til skúlastjórnina um, at mín permission frá realskúlanum verður longd, til ein endilig skipan av skúlamálinum kemur í lag, og at eg, sum amtmaðurin nevndi á sama fundi, fái ájáttan frá skúlastjórnini, at hon vil mæla til, at tann tíð, sum eg havi verið uttan fyri nummar, má roknast upp í mín tænastualdur, um so skuldi verið, at eg fór aftur til realskúlan, annaðhvørt tí studentaskúlin fór fyri bakka, ella eg ikki fekk pláss við tann nýskipaða skúlan. Viðvíkjandi míni løn loyvi eg mær at skjóta upp, at eg, antin eg verði fastsettur við studentaskúlan ella ikki, eins og hinir lærararnir verði løntur sum adjunktur við tí tænastualdri, eg nú havi við realskúlan, og at eg eins og hegartil fái eitt tillegg sum fyristøðumaður, men at hetta verður hækkað til tað sama, sum fyristøðumaður læraraskúlans fær; so vítt eg veit er hetta 100 kr. um mánaðan".

Sambart skúlastjórans rit fær:

Ein giftur adjunktur		kr. 5.256.00
ein giftur lærari við studentaskúlan		- 4.566.00
	munur	kr. 690.00
ein ógiftur adjunktur yvir 40 ár		kr. 4.760.00
ein ógiftur lærari, yvir 40 ár, við studentaskúlan		kr. 4.344.00
	munur	kr. 416.00

Tað kann roknast við 4 giftum og einum ógiftum lærara við skúlan.

Verða lærararnir løntir sum adjunktar og fyristøðumaður skúlans fær umframt eina stjóraløn sum fyristøðumaður læraraskúlans í Havn, 1.200 kr., vilja skúlans rakstraútreiðslur økjast við:

Til lærararnar 4 × 690 kr.	kr. 2.760.00
til fyristøðumannin 416 plus 1.200 : 500 kr.	kr. 1.116.00
telefongjald	kr. 80.00
Herafturat má roknast við, at skúlin ikki verður at fáa nakað statstilskot, so leingi kríggið varir.	
Tær ætlaðu inntøkur skúlans verða so statt at minnka við tí ætlaða statstilskotinum	kr. 3.400.00
Hin samlaða økjanin av skúlans ætlaða rakstraundirskoti, sum tingið skal rinda, verða sambart hetta	kr. 7.356.00

Nevndin heldur tað vera rætt og av stórum týdningi, at tingið roynir at skapa studentaskúlanum eitt hollt grundarlag at standa á, soleiðis at hann kann draga til sín tær bestu kreftirnar, ið ern falar at fáa og annars veita næmingunum eina undirvísing, ið kann metast javnt við ta fraegastu.

Nevndin setur tí fram uppskot um

1. at játta skúlanum ókeypis telefon,
2. at veita lærarunum ta umsøktu lønumskipan og skúlastjóranum 1.200 kr. sum stjóraløn, og
3. at veita teim ómúgvandi næmingum av bygd ein munandi studning.

Uppskot:

Frá allari nevndini:

1. Skúlastjóri Nygaard og hinir lærararnir við studentaskúlan verða frá 1. januar 1942 løntir sum adjunktar sambart ta av skúlastjóranum í málinum givnu uppgávu um, hvussu hesir verða løntir. Leiðarasamsýningin verður hækkað skúlastjóranum frá 500 uppí 1.200 kr. um árið.
2. Tingið játtar studentaskúlanum ókeypis telefon.
3. Landsnevndin verður heimilað úr økonomiska grunninum at veita ómúgvandi studenta- og preliminerskúlanæmingum ein hóskandi studning.

13. nov. samtykt 16—0.

---

2. Studningur til svimjingarhyljar.

Álit:

Til fíggjarnevndina eru beindar umsóknir til svimjingarhyljar frá:

1) Gjáar ungmannafelag, Gjógv.
2) Gøtu kommunustýri, Gøtu.
3) Kjartan Hentze og Andrass Simonsen, báðir úr Norðadali.
4) Kommunustýrið í Fugloyar kommunu, Kirkju.
5) Rituvíkar ungmannafelag, Rituvík.

Gøtu kommuna hevur gjørt svimjingarhylin. Hann hevur kostað um 7.000 kr. og verður, tá ið tilætlaði vegur og gyrði uttanum hylin eru gjørd, at kosta um 8.000 kr. falt. Hetta er ein prýðlligur og fyrimyndargóður hylur. Hinir hyljarnir eru lítið komnir á leið, ella menn hava enn ikki byrjað at byggja teir.

Higartil hevur tingið haft ta støðu at veita 100 kr. til teirra, ið fara undir at byggja svimjingarhyljar. Hesin peningur er givin meiri sum ein sømdarpeningur enn sum studningur, við tað at tingið metir byggjan av svimjingarhyljum at vera av alstórum týdningi, men hevur ikki hildið seg at hava verið fíggjarliga fært fyri at fara undir ta stóru uppgávu at byggja svimjingarhyljar krlng landið. Hetta er ein uppgáva, sum eigur at liggja í hondunum á ungdómunum sjálvum við hjálp frá kommununum. Tað beinleiðis at ofra pening og arbeiðismegi fyri at skapa møguleika fyri ítróttarfíðkan skerpir hugin fyri og kærleikan til eitt vakið og lívsterkt ítróttarlív.

Nevndin mælir til at halda fram við at veita eín sømdarpening til teirra, ið fara undir at gera svimjingarhyljar. Hígartil hevur verið latið 100 kr. til hylin. Nevndin skjýtur til, at hesin peningur verður hækkaður eitt sindur.

Uppskot:

Tingið veitir 1) Gjáar ungmannafelag, 2) Gøtu kommunustýri, 3) Kjartan Hentze, Norðadali, saman við Andrass Simonsen, Norðadali, 4) stýrið fyri Fugloyar kommunu og 5) Rituvíkar ungmannafelag 150 kr. til hvønn til svimjingarhyl, *ialt 750 kr.* úr økonomiska grunninum.

30. sept. samtykt 15—0.

---

3. Hvíldarheimið »Naina«.

Álit:

Bestyrelsen for Hvilehjemmet „Naina" har ved sin Sekretær Overassistent ved Post- og Telegrafvæsenet E. Jubiert tilsendt Tinget to Andragender, dateret henholdsvis 14/6 og 14/7 d. A.

I det førstnævnte ansøges om, at det nuværende faste aarlige Tilskud fra Lagtinget paa 1.000 Kr. forhøjes til 2.000 Kr. Samtidig har Bestyrelsen ansøgt Thorshavns Byraad om, at det faste aarlige Tilskud fra Byraadet forhøjes fra 500 til 1.000 Kr. I Andragendet af 14/7 oplyses, at Byraadet har forhøjet Tilskudet for 1941 med 500 Kr., fra 500 Kr. til 1.000 Kr. under Forudsætning af, at Lagtinget for samme Tidsrum forhøjer sit Tilskud fra 1.000 Kr. til 2.000 Kr. Saaledes foranlediget ændrer Bestyrelsen for Hvilehjemmet sin første Ansøgning til Tinget derhen, at det i Stedet for en Forhøjelse af det *faste* Tilskud søger om et ekstraordinært Tilskud paa 1.000 Kr., kun gældende for indeværende Aar. I Andragenderne oplyses, at Aaret 1939 kunde afsluttes med et lille Overskud paa 400 Kr., men fra Sommeren 1940 gjorde det nye Prisniveau sig fuldt ud gældende, og dette Aars Regnskab udviste da ogsaa et Underskud paa over 2.200 Kr. Da Bestyrelsen var klar over, at Aaret 1941 vilde være ganske umuligt at gennemføre uden Tilførsel af nye Indtægter, søgte og fik Hjemmet i Efteraaret 1940 Tilladelse til at foretage en offentlig Indsamling, som indbragte ialt 16.800 Kr. Heraf er 6.800 Kr. anvendt til at dække udestaaende Fordringer (ca. 4.000 Kr., som hidtil var dækket ved Laan) samt Gæld, saaledes at Hjemmet nu har en opsparet Reservekapital paa 10.000 Kr. Man har undersøgt Muligheden for en

passende Forhøjelse af Sygekassetakston, men dette har i hvert Fald foreløbig vanskeligt kunnet gennemføres; derimod har Centralforeningen vist Forstaaelse for Hjemmets Vanskeligheder ved at bevilge et Tilskud paa 1.000 Kr. for Aaret 1941.

Ifølge foreliggende Oplysninger er de for Hjemmet gældende Takster disse:

1) For Sygekassemedlemmer ..... 3 Kr. pr. Dag
2) For alle andre ..... 4 „ „ „

Eneværelse koster 1 Kr. ekstra pr. Dag.

Sygekasserne faar den ene Kr. refunderet af Kommunerne, saa deres virkelige Udgift pr. Patient pr. Dag er 2 Kr.

Samtlige Sygekasser paa Færøerne — fraregnet Kollefjord, Kalbak, Sand og Famjen Sygekasser samt Fortsættelsessygekassen — indlægger deres Medlemmer til Behandling paa Hvilehjemmet, ligesom praktisk talt alle Kommuner har vist Interesse og Forstaaelse overfor den Opgave, Hjemmet har paataget sig, ved at yde Sygekasserne den før nævnte Refusion.

Budgetudvalget, der har faaet Sagen til Behandling, skal udtale, at man med Interesse har noteret sig de foreliggende Oplysninger, og at man i Lagtinget som vist nok overalt paa Øerne med Sympati ser paa det Arbejde, der udføres fra Hjemmet, en Sympati, som formentlig kan siges at have givet sig synlige Udslag bl. a. ved de Tilskud, Hjemmet oppebærer fra forskellig Side samt i det efter Forholdene smukke Resultat, den i Fjor foretagne Indsamling har givet.

Efter alt foreliggende er det Udvalgets Skøn, at Hjemmets økonomiske Forhold for Tiden ikke er saadan, at en øjeblikkelig Forhøjelse af Lagtingets Tilskud skulde være nødvendig. Man kan dels henvise til den efter Omstændighederne ikke ubetydelige Reserve paa 10.000 Kr., dels finder Udvalget, at det maa være muligt gennem Forhøjelse af Taksterne for *Ikke-Sygekassemedlemmer* at tilføre Hjemmet større Indtægter. En Takstforskel paa 1 Kr. pr. Dag for Sygekassemedlemmer og andre, der ikke er Medlemmer af en statsanerkendt Sygekasse, er alt for ringe. Her burde Taksterne efter Udvalgets Mening være sat saa højt, at der var en passende Margin for en rimelig Fortjeneste.

Udvalget er paa den anden Side indforstaaet med, hvor vanskelige de nuværende Krigsforhold med stadig stigende Priser kan blive for en Institution som Hvilehjemmet, der arbejder med forholdsvis begrænsede konstante Indtægter, og man er her i Tinget ikke uvillig til, hvis Forholdene f. Eks. til næste Aar skulde udvikle sig saadan, at yderligere Støtte vil vise sig nødvendig, til den Tid at tage Spørgsmaalet op til velvillig Overvejelse.

Forslag:

Under Henvisning til det i Betænkningen anførte mener Tinget for Tiden ikke at kunne imødekomme Andragendet.

22. okt. samtykt 12—1. Seinri játtað 1000 kr. eykastudningur ella ialt 2000 kr. fyri 1942 — sí skjal nr. 7 D 3.

4. Studningur til Føroya Búnaðarfelags administratión.

Álit:

Føroya búnaðarfelag hevur í riti av 5. september 1941 søkt tingið um studning til felagsins almennu útlegg.

Í felagnum standa um 1300 limir, flestir av teim eru eisini limir í bygdabúnaðarfeløgum, tð standa sum undirdeildir í meginfelaginum.

Í felagsins riti verður greitt frá felagsins arbeiði og uppgávum.*) Vist verður á sum fyridømi, hvussu „De samv. danske Landboforeninger" og „De danske Landboforeninger" verða styðjaðar úr rikiskassanum. Hesi feløg hava soleiðis í árinum 1939/40 frá stati fingið yvir 2.000 kr. til sínar almennu útreiðslur og 800.000 kr. til serlig mál.

Viðlagt er eintak av rakstrarroknskapinum fyri árið 1940.

Hetta rakstrarroknskap vísir, at felagsins inntøkur røkka illa til felagsins rakstraútreiðslur. Felagsins einastu inntøkur stava frá limagjaldi kr. 793,17, medisinsølu 173,07, fræsølu kr. 103,65, tilsamans kr. 1.069,89. Útreiðslurnar eru fyri seinasta ár kr. 13.786,00. Tað er so statt talan um eitt beinleiðis driftsundirskot, ið hevur kunnað verðið goldið av felagsins kassapeningi frá 1939, ið er kr. 2.225,07.

Undirritaða nevnd, ið málið er beint til, heldur, at tað er eitt trot í frágreiðingini, at felagið ikki hevur givið greiniliga frásøgn um, hvussu felagsins fíggjarstandur yvirhøvur er, tá ið allar felagsins virkisgreinir eru tiknar við. Her verður serliga skotið til felagsius epla- og tøðhandil og felagsins ábyrgd fyri tað í Havn bygda eplahús. Men eftir tí, sum nevndin leysliga hevur frætt umvegis, er ikki væntandi, at felagið verður at fáa nakað yvirskot av hesum sínum virkjum.

Eitt meginbúnaðarfelag má haldast at vera ein avgjørt neyðturvuligur miðstovnur hjá tí føroyska búnaðarstattinum, men fyri at hesin miðstovni kann virka við ynskiligari kraft, má felagið ráða yvir tí neyðturvuliga umsitingarpeningi, sum av røttum átti at verið velddur til vega við limagjaldi. Tað at felagið ikki hevur so frætt limagjald, at tað kann rinda umsitingarútreiðslurnar, er ein avgjørdur veikleiki, sum felagið eigur at royna at bøta um við at hækka limagjaldið, og tá ið nevndin mælir til, at tingið játtar felagnum ein stuðul uppá 50 kr. um mánaðin, verður tað, um ikki beinleiðis treytað av, so gjørt í vón um, at felagið skipar fyri, at limagjaldið verður hækkað munandi.

Uppskot:

Úr amtsgrunninum verður frá 1. januar 1942 játtað Føroya búnaðarfelag 50 kr. um mánaðin sum studning til rindan av felagsins umsitingarútreiðslum.

---

*) Í frágreiðingini er tó ikki tikið við felagsins epla- og tøðhandil.

Henda peningajáttanin verður at halda fram, inntil annað verður viðtikið av tinginum, og ímóti, at felagið hvørt ár leggur fram fyri tingið rakstrarroknskap og frágreiðing um felagsins virki.

10. okt. samtykt 16—0.

---

5. Skúlabókagrunnurin.

Álit:

Stýrið fyri Føroya Skúlabókagrunn hevur í riti av 6. september 1941 søkt um at veita grunninum eina nýggja 5 ára studningsjáttan, nú hin gamla gongur út í ár, men at hækka studningin, ið var 500 kr., upp í 1.000 kr. árliga. Greitt verður frá, at grunnsins kassakredittur í Føroya Banka er komin niður í 117,81 kr., ið er øll skuldin hjá grunninum. Av lesibókini, øðrum bindi, sum grunnurin gav út í 1939, eru nú seld o. u. 800 eintøk. Eftir eru 2.180 eintøk. Handritið til 3. bind av lesibókini er liðugt, og skúlastjórnin hevur fingið tað til góðkenningar. Grunnsins ogn er upplagið av 2. bindi av lesibókini. Ætlanin er at geva út ymsar skúlabøkur, t. d. roknibók fyri fólkaskúlan av M. A. Jacobsen, Rasmus Rasmussen og Z. Sørensen; 1. part hevur skúlabókanevndin fingið. Ætlanin er at geva út 3 partar. Annar parturin er at kalla liðugur við og triðl er í umbúna.

Kostnaðurin til útgávuna av 1. parti er mettur til 1.400 kr.

Tingið hevur givið grunninum loyvi til at taka eitt lán uppá 3.000 kr. í Sparikassanum. Hetta hevur nevndin av ymsum grundum ikki gjørt. Av tí at pappír, arbeiðsløn og annað prenting viðvíkjandi er rokið upp og tær 3.000 kr. tessvegna ern ov lítið til ta ætlaðu útgávu av bókum, heldur nevndin tað vera neyðugt at lánloyvi og veðhald viðvíkjandi einum láni uppá kr. 3.000, verður hækkað uppí 4.500 kr.

Løgtingsmaður Jóannes bóndi Paturssson hevur sent tinginum avrit av einum riti til skúlastjórnina, har ið biðið verður um at heita á tingið at leggja tann neyðturvuliga pening av til skúlabókanevndina, so hon verður líggjarliga før fyri at fáa fram handrit og prenting á føroyskum máli í kenslugreinunum: Veraldarsøga, Føroya søga, roknibøkur, landalæra, urtalæra, og kanska fleiri.

Nevndin er á einum máli um, at tað er av stórum týdningi, at skúlabókagrunnurin ræður yvir nóg nógvum peningi til útgávu av føroyskum skúlabókum og mælir til, at tingið gongur við til eina nýggja 5 úru studningsjáttan uppá 500 kr. um árið frá 1. januar 1942.

Prentingararbeiði og pappír er dýrkað í stórum, síðan kríggið brast á, og er støðugt dýrkandi. Nevndin heldur tað tí verða beint at veita skúlabókagrunninum ein eykastudning fyri 1942.

Uppskot:

1) Tingið samtykkir at hækka tað í fjør givna veðhaldslyfti til Føroya skúlabókagrunn fyri eitt lán uppá 3.000 kr. í Færø Amts Sparekasse ella øðrum lánigrunni (sí Løgtingst. fyri tu vanligu tingsetuna 1940, bls. 33) til 4.500 kr.
2) Skúlabókagrunnínum verður í einum 5 ára skeiði frá 1941 úr økonomiska grunninum játtaður ein studningur uppá 500 kr. um árið, fyri 1942 ein eykastudningur uppá 500 kr., altso 1.000 kr. í alt fyri hetta árið.

30. sept. samtykt 18—0.

---

6. Studningur til einkju.

Álit:

Einkjan Jenhild Anthoniussen á Morskranesi hevur í brævi av 8. september 1941 søkt tingið um studning til sog og børnini. Hon sigur, at maðurin gekk burtur við „Guiding Star" í vár. Hon er bert 21 ár, situr eftir við 2 smáum børnum og kann einki forvinna til uppihald fyri seg og børnini. Tann pening hon fekk eftir mannin, hevur hon brúkt til at bygt sær eini hús á Morskranesi.

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar úttalar:

Tingið hevur í fjør latið í hendi til landsnevndina tingsins vegna at lata til treingjandi. Henda umsókn er eitt av teim málum, ið sambart sína náttúru eiga at avgerest av landsnevndini, og skjýtur nevndin upp at beina málið til landsnevndina.

Uppskot:

Málið verður beint í landsnevndina at viðgera saman við teim socialu studningsmálunum.

1. okt. samtykt 17—0.

---

7. Barnablaðið.

Álit:

Í riti av 1. september 1941 hevur blaðstjóri á „Barnablaðnum" lærari J. Berg søkt um ein hóskandi studning til framhald av blaðsins útgávu. Hann vísir á, at tær dýru tíðirnar eisini hava rakt blaðútgávu, pappír og prenting eru t. d. vorðin mikið dýrari.

Nevndin mælir til at veita studning til framhald av „Barnablaðnum".

Uppskot:

Til framhald av útgávuni av „Barnablaðnum" verður játtað lærara J. Berg 400 kr. úr økonomiska grunninum.

Lærari Berg verður biðin um frágreiðing og rakstrarrokuskap til næstu tingsetu.

25. sept. samtykt 16—0.

8. Leikvøllir.

Álit:

Þorkerls kommuna søkir um studning til ein leikvøll, og lærari M. Johannesen hevur vent sær til løgtingsformannin um at fáa studning til ein leikvøll í Hovi.

Løgtingið samtykti í 1940 (sí løgtingstíðindi 1940, síðu 204):

„Med et aarligt Tilskud fra Amtsfonden paa 2.000 Kr. etableres der en Fond under Navnet „Fimleikagrunnur Føroya" med det Formaal at støtte Anskaffelse af Grundarealer til Idræts- og Legepladser ved de færøske Skoler og disse Pladsers Indretning til Formaalet, ligesom Fonden iøvrigt skal støtte Idræt i det Omfang, som dets Midler tillader."

Reglugerð fyri Fimleikagrunn Føroya er seinri góðkend, og landsnevndin í samráð við skúlastjórnina kann hereftir veita studning til leikvøllir o. t.

Umsóknin verður tí at senda til landsnevndina til viðgerð.

Uppskot:

Umsóknin verður at senda til landsnevndina.

31. oktober samtykt 15—0.

---

9. Kvæðaavskrivan.

Álit:

Løgtingsmaður Jóannes bóndi Patursson hevur í brævi av 9. sept. 1941 biðið tingið „um at leggja eina hóskandi peningarúgvu niður at vera fala at taka til, so skjótt sum líkindini vera til tess, til avskrivingar ella ljósmynding („fotografering") av øllum teim kvæðauppskriftum, ið eftir eru at fáa heimaftur." Hann vísir á, at bara ein helvt er avskrivuð og heimkomið av hesum kvæðaskatti, sum liggur á kongliga hókasavninum í Keypmannahavn. Tað avskrivingararbeiði, ið var byrjað, hevur, sigur hann, ligið á láni í eini 15—20 ár.

Fíggjarnevndin, ið málið er beint til, heldur, at tað er av miklum mentunarligum virði fyri Føroyingar at fáa savnað øll okkara kvæði, ið finnast bæði helma og úti, og loyvir sær at mæla tinginum at taka undir við umsøkjaranum í hesum máli.

Tíðirnar eru skiftandi, og eingin veit, hvørjar snertir vilja raka okkum av orrustuleikinum, ið nú fer fram har úti.

Hóast nevndin er samd um, at tingið árliga leggur ein hóskandi pening niður til umrødda endamál, er tað tí kanska beinast at lata taka avgerð hvørt ár fyri seg um peningahæddina.

Nevndin heldur 1.000 kr. vera ein hóskandi pening at leggja niður í ár at taka til kvæðaavskriving ella ljósmynding.

Uppskot:

Úr amtsgrunninum játtar tingið 1.000 kr. at leggja niður til avskrivingar ella ljósmynding av øllum teim kvæðauppskriftum, ið eftir eru at fáa heim aftur av kongliga bókasavninum í Keypmannahavn.

Peningurin verður at seta á sparikassabók, til samforðsla aftur kemur í lag við Danmark.

7. okt. samtykt 17—1.

---

10. Samsýning til skjalavørða A. Degn.

Álit:

Sum monnum kunnugt hevur skjalavørði Anton Degn gjørt eitt týdningarmikið søguligt og hagskírisligt høvundaarbeiði. Hann er í framhaldi við hesum arbeiði.

Hetta starv sítt er hann farin undir av eintingum. Hann hevur ikki notið aðra samsýning fyri hetta arbeiði enn frægdið, ið vísindamaðurin hevur av virki sínum.

Nevndin heldur tað vera samfelagsins skylda at veita tílíkum teknum landsins sømd sína. Og verður tí skotið til tinglið at gera skyldu sína móti skjalavørða Degn og veita honum eina sømdarsamsýning.

Uppskot:

Sum sømdarpening fyri vísindaliga høvundastarv sítt veitir tinglið skjalavørða Anton Degn í Havn hálvthundrað krónur um mánaðin frá 1. januar 1942.

4. nov. samtykt 21—0.

---

11. Stoypari.

Áiit:

Smiðjumeistari Hans Arge hevur í riti av 22. oktober 1941 vent sær til tingið við umsókn um lán og studning til „eitt lítið stoypari við einum lítlum nýmótans smeltiovni".

Hann biður um 7.000 kr. í láni og 3.000 kr. sum studning.

Í umsóknini verður vístá, at hann fyri 20 árum síðani byrjaði at fáast við stoyping; hevur hann enntá gjørt fleiri motorar, ið eru í brúk. Men stoyparlið, hann tá fekk sær, var bert primitivt, og hóast hann hevur stoypt hópin av maskinlutum bæði til motorar og trolarar, kann hann ikki við tí koma út yvir at gera øll tey so hardliga átroðkandi arbeiði, sum menn í hesum tíðum ikki — sum undan krígnum — kunnu fáa gjørt í útlondum. Av hesum umstøðum koma menn at liggja lavnir í teirra starvi, um teir ikki kunna fáa gjørt hesi arbeiði her á landi. Tað, ið verst vorðið er við, eru teir maskinlutir, ið gingnir eru fyri, og sum menn áður altíð ógvuliga skjótt kundu fáa frá teim útlendsku motorvirkjunum, haðani viðkomandi motorar eru komnir.

Nevndin er samd í, at tað er av allra størsta týdningi, at vit í hesum døgum eru so fyrirvikaðir, at vit sjálvir kunna stoypa og gera aftur maskin- og aðrar amboðslutir, sum okkum tarva fyri at halda fram við vinnu okkara á landi og á sjógvi.

Í tingsins rakstraætlan er settur ein vissur peningur til heimaídnaðin. Landsnevndin hevur fingið í hendi at sita um henda pening. Nevndin skjýtur tessvegna uppá, at umsóknin verður beind til landsnevndarinnar viðgerð og mælir til, at smiðjumeistara Hans Arge verður givið eitt hóskandi lán.

Uppskot:

Málið verður við tingsins viðmæli beint til landsnevndarinnar viðgerð.

22. nov. samtykt 17—0.

12. Samsýning til háskúlalærararnar.

Álit:

Løgtingsmaður J. Paturssøn hevur vent sær til tingið um at veita teimum háðum lærarunum á Føroya fólkaháskúla, Símuni av Skarði og Rasmus Rasmussen eftirløn.

Hesir menn eru á gamalsaldri. Teir hava slitið alla sína manndómsmegi á háskúlanum, sum teir á ungum aldri brutu sláð fyri.

Tað er nevndini ikki ókunnugt, at hesir báðir, Símun og Rasmus, hava sýnt eitt samarbeiði og starvsbrøðralag, sum verður at standa sum ein vøkur fyrimynd fyri komandi ættarlið. Annar hevur at kalla onga løn tikið fyri skúlastarv sítt. Hetta er gjørt fyri, at starvsbróðurin kundi fáa eina toluliga løn sum lærari við skúlan.

Lærarum, ið starvast í almennari tænastu er við lóg tryggjað eftirløn. Símun og Rasmus kunnu av sonnum sigast at hava gjørt eitt fyri almenningin útfyllandi skúlaarbeiði — og heldur nevndin, at teim, sum hartil eins og nevnt í stórum munni hava gjørt hetta arbeiði lønaloyst, nú á teirra gamalsaldri eigur at verða sýnt eln serlig tøkk og sømdarsamsýning fyri starv teirra. Nevndin loyvir sær tí at mæla tinginum til at veita teim eftirløn í sama mun, sum verður veitt fólkaskúlalærarum.

Uppskot:

Teim núverandi lærarum við Føroya fólkaháskúla, Símun av Skarði og Rasmus Rasmussen, verður, tá teir fara frá teirra starvi, úr amtsgrunninum veitt eftirløn í sama mun sum lærarunum við fólkaskúlan í Føroyum.

Landsnevndin ásetir til ta tíð tær nærri reglur fyri eftirlønini.

24. nov. samtykt 15—0.

13. Sømdarpeningur fyri skúlabókastarv.

Álit:

Hans Andr. Djurhuus, lærari, hevur skrivað eftir úbeitan av løgtinginum handrit til Føroyingasøgu og hevur boðið sær til at skriva handrit til veraldar- og norðlandasøgu, um hann $^1/_2$ ár kann verða leysur frá skúlanum og fáa fríar vikar.

Fyristøðumaður realskúlans heldur, at hetta ikki so væl ber til, men at H. A. Djurhuus kann gera tað starv, hann hevur boðið sær til at gera, á sama hátt, sum aðrir skúlamenn sum skriva lærubøkur, við at nýta sína frítíð til tess.

Nevndin kann tí ikki útvirka, at harra Djurhuus verður leysur frá skúlanum og fær fríar vikar, eins og nevndin ikki kann binda seg til, at hansara handrit til veraldarsøgu verður tikið, av tí at aðrir lærarar kannska eisini vilja útarbeiða tílíkt handrit, men nevndin vil mæla til, at veittur verður honum sum sømdarpeningur 300 kr. úr økonomiska grunninum vegna hansara skúlabókastarv, serstakliga hansara útgávu av Barnarímum og øðrum barnabókum, og vónar nevndin, at hann vil halda áfram við sínum starvi, hérundir eisini útarbeiða handrit til veraldarsøgu.

Annars er spurningurin um útgávu av skúlabókum til viðgerðar í skúlabókanevndini.

Uppskot:

Úr økonomiska grunninum verða veittar H. A. Djurhuus, lærara, 300 kr. sum sømdarpeningur fyri hansara skúlabókastarv.

24. nov. samtykt 14—0.

XIV. Ymist.

1. Decisión av amtskommunalum roknskapum.

28. nov. vóru roknskapini fyri 1940 góðkend undantikið Føroya vanlukkutrygging.

2. Kavarabúnin.

Álit:

Løgtingsskrivstovan hevur reist málið um søln av tingsins kavaragreiðum. Sambart hennara frágreiðing var tað tingið, „Færøernes gensidige Fiskeriforsikring" og Havnar kommuna, ið keyptu henda búna. Hvør rindaði sínar 900 kr. Ein serlig reglugerð er galdandi fyri nýtsluna av kavaragreiðunum.

Rakstrarroknskapurin viðvíkjandi kavaragreiðunum hevur ligið undir fútaskrivstovuni og liggur nú undir Føroya gjaldstovu. Tað er ein kavaragreiðugrunnur, sum elgur 1.000 kr. og reiðskapin.

Kavarabúnin sigist sjálvur at vera í vanligum standi.

Løgtingsskrivstovan hevur lagt spurningin um søla av greiðunum fyri „Færøernes gensidige Fiskeriforsikring" og Havnar kommunu. Bæði tryggingarfelagið og kommunan halda tað ikki vera neyðugt hjá tinginum at hava kavaragreiðir.

Havnar kommuna setur fram uppskot um, at Tórshavnar havn fær kavaragreiðirnar uttan at lata viðurlug fyri tær við teim treytum, at hon heldur tær í góðum staudi. Løgtingið skal fáa frítt ræði yvir tí peningi og møguligum eftirstøðum, ið búnin elgur. Tryggingarfelagið tekur undir við hesum uppskoti.

Fíggjarnevndin kann ikki mæla tinginum til at selja kavaragreiðirnar, serliga ikki nú, tá ið nógvar smáar bryggjur og lendingar eru bygdar og fleiri eru í umbúna at verða bygdar, og hitt almenna tessvegna hevur nógv brúk fyri kavaragreiðum.

Nevndin heldur vera neyðugt at gera ymsar broytingar í reglugerðini fyri kavaragreiðunum og setur fram uppskot til eina nýggja reglugerð. Nevndin heldur tað vera beinast, at umsitingin av greiðunum verður løgd undir løgtingsskrivstovuna.

Uppskot:

Í staðin fyri galdandi reglugerð fyri løgtingsins kavarabúna verður sett:

Reglugerð
fyri
umsiting og nýtslu av kavaragreiðum tingsins.

Gr. 1.

Kavaragreiðurnar verða í varðveitslu hjá løgtingsskrivstovuni undir tilsýni av løgtingsverkfrøðinginum.

Løgtingsskrivstovan hevur serligan umsjónarmann til kavaragreiðurnar.

Gr. 2.

Kavaragreiðurnar eru bara til nýtslu hjá tinginum; kortini kunnu tær undir serligum umstøðum lænast út. Leigan verður tá sett við serligum sáttmála. Undir vanligum umstøðum krevst hóskandi depositum.

Gr. 3.

Umsjónarmaðurin flýggjar út búnan eftir einum avgreiðingarseðli. Á henda seðil merkir hann tíðina, tá ið hann lotur greiðirnar frá sær. Tá ið greiðurnar verða innafturlatnar, merkir hann á seðilin tíðina fyri innlatingina, og avgreiður so løgtingsskrivstovuni seðilin. Skrivstovan krevur so ta ávaksnu leiguna. Samstundis sum seðilin verður flýggjaður aftur, sigur umsjónarmaðurin, um greiðirnar eru skaddar, og hvat tað eftir ætlan hansara verður at kosta at gera tær aftur. Skrivstovan skipar so fyri ábótini.

Gr. 4.

Kavaragreiðirnar umsitast av løgtingsins skrivstovu.
Kannaður roknskapur verður at leggja fyri tinglð.

11. okt. samtykt 16—0.

3. Loyvi til fasta farleið.

Álit:

Ved Lov Nr. 124 af 15. Marts 1939 om Rutefart er der skabt Lovhjemmel for Lagtinget til at meddele Tilladelse til Rutefart og i Forbindelse hermed at fastsætte nærmere Betingelser for Udøvelsen af Rutefart, bl. a. at der svares en Afgift til Amtsfonden, og at der overholdes nærmere fastsatte Takster.

Sagen om at meddele Tilladelse til Rutefart har været behandlet i Lagtinget, saavel i Samlingen 1939 som 1940, og meddelte Tinget i Samlingen 1940 visse Selskaber og Enkeltpersoner for Tiden indtil 1. Marts 1941 Tilladelse til Rutefart. Denne Tilladelse er derefter af Landsnevndin forlænget til indeværende Lagtingssamling.

Sagen er derefter forelagt Lagtinget og af dette ved første Behandling overgivet til undertegnede Udvalg, der skal tillade sig at udtale:

Det, der skal tages Stilling til, er dels hvorvidt den meddelte Tilladelse til Rutefart skal forlænges og dels hvilke Betingelser, der skal knyttes hertil, bl. a. om Tilladelsen skal betinges af en fast Afgift til Amtsfonden.

Udvalget mener ikke at burde tilraade Tinget at belaste de private Ruter med en Afgift, dels fordi Ruterne skønnes nødvendige for Samtraffikken, og at Ruterne efter de fremkomne Regnskaber ikke for Tiden synes at give noget større Overskud, og dels fordi en Afgift ikke synes at faa nogen større fiskal Betydning, navnlig ikke i Forhold til Tingets nuværende direkte og indirekte Skatteindtægter.

Det er herefter Udvalgets Mening, at Tinget for Tiden skal lade sig nøje med at gøre Tilladelsen til Rutefart afhængig af, at Bevillingshaverne underkaster sig Lagtingets eller et af dette valgt Udvalgs Regulering af Fragt og Passagertaksterne samt den for Ruterne gældende Fartplan.

Det skal i denne Forbindelse peges paa, at det ved Regulering af Taksterne vil være af Betydning, at den ene Rute tilpligtes for nedsat Takst at modtage Passagerer og Gods fra en anden Rute. Tilladelse bør desuden betinges af, at der afgives detailleret Regnskab for de enkelte Ruter.

Da hele Forholdet imidlertid, saaledes som Sagen nu foreligger, er af ekspeditionsmæssig Art, mener Udvalget, at det mest hensigtsmæssige herefter vilde være, om Tinget bemyndigede et staaende Udvalg til at meddele de fornødne Tilladelser til Rutefart og fastsætte de nærmere Betingelser herfor, alt dog i Overensstemmelse med det foran anførte, og skal Udvalget foreslaa, at Landsnevndin faar denne Bemyndigelse.

Forslag:

Idet Tinget henviser til det i Udvalgsbetænkningen anførte, bemyndiges herefter Landsnevndin til at meddele Tilladelse til Rutefart.

22. okt. samtykt 19—0.

4. Viðurlag til stevningsmenn.

Álit:

Ved Skrivelse af 30. Juni d. A. har Amtet forelagt Tinget Udkast angaaende Vederlag til Stævningsmænd for Forkyndelser i Straffesager m. v. Sagen har været forelagt Landsnevndin, som paa Møde den 16. Maj d. A. har vedtaget at godkende Forslaget.

Udvalget har intet at erindre imod Udkastet og skal stille følgende Forslag til Vedtagelse:

Forslag

til

Midlertidige Bestemmelser for Færøerne angaaende Vederlag til Stævningsmænd for Forkyndelser i Straffesager m. v.

§ 1.

For Forkyndelser i Straffesager og beneficerede Sager samt for Forkyndelser i første Instans i de i Lov om Rettens Pleje § 225 Nr. 8 omhandlede Sager betales for hver Forkyndelse 60 Øre til Stævningsmanden, hvilken Afgift udredes efter Reglerne for beneficerede Sager. Politibetjente er dog pligtige uden Vederlag at besørge Forkyndelse i Straffesager.

§ 2.

Nærmere Regler angaaende Udbetaling af de hver enkelt Stævningsmand tilkommende Gebyrer fastsættes af Færø Amt efter Indstilling af Sorenskriveren (Dommeren) paa Færøerne.

§ 3.

Disse Bestemmelser træder i Kraft straks.

24. okt. samtykt 17—0.

5. Dagpengar til elektricitetsnevndina.

Álit:

Ravmagnsnevndin hevur í riti av 13. juní 1941 til amtmannin skotið uppá, at dagpeningurin hjá limunum í nevndini, ið hevur umsjón við sterkstreymsvirkjum í Føroyum, ið eru 6 kr. fyri uttanbýggja limir, verður hækkaður møguliga til tað, ið løgtingsmenninir fáa goldið.

Ravmagnsnevndin søkir um, at Havnarmenninir í nevndini eisini fáa dagpening.

Figgjarnevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, heldur, at tað er rímiligt, at limirnir í ravmagnsnevndini koma undir somu dagpeningaskipan, sum er galdandi fyri løgtingsins milluntinganevndir.

Uppskot

til

Ændringer i midlertidige Bestemmelser om Tilsyn med Stærkstrømsanlæg paa Færøerne:

§ 1, 2. Stk., 2. Punktum, affattes saaledes:

Medlemmerne oppebærer 6 Kr. i Dagpenge for hver Mødedag; derhos oppebærer Medlemmer, der bor udenfor Thorshavn, 6 Kr. for hver Dag, de paa Grund af Rejse er nødsagede til at være borte fra deres Hjem og desuden godtgøres dem direkte Rejseudgifter.

27. sept. samtykt 15—0.

6. Útjavnan millum løgtingsskatt og kommunuskatt.

Álit:

Løgtingsmaður P. M. Dam hevur í riti til landsnevndina í apríl mánaða í ár millum aðrar týðningarmiklar spurningar reist spurningin um eina umskipan av skattaviðurskiftunum, soleiðis at tann samlaði kommunuskattur og løgtingsskattur hjá borgarum við teimum stóru inntøkunum verður at falla meiri eins, enn tilfelli er nú; løgtingsskrivstovan hevur sent málið til amtið til nummælis.

Amtsfulltrúi Hjorth-Nielsen hevur gjvið eina frágreiðing viðvíkjandi teirri millumkommunalu endurrindanini í Danmark sambart lóg nr. 100 av 14. apríl 1937 og tær broytingar hesum viðvíkjandi, sum eru gjordar til „socialreformin" av 1933. Sambart hesar lógásetingar fáa kommunurnar niðri í Danmark sociala endurrindan á 3 luttir:

frá 1. stati,
„ 2. einum millumkommunalum javningargrunni,
„ 3. einari millumkommunalari endurrindan.

Hin sociala studningsrindanin verður býtt soleiðis:

	Statur	mill.kom. javningargr.	mill.kom. endurr.	kommunan
Einkjubørn:	40/70	9/70	12/70	9/70
Ellisrenta:	40/70	9/70	15/70	6/70
Ymsar aðrar socialar útreiðslur:		21/70	28/70	21/70

Av avlamisrentuni rindar tó staturin og avlamisgrunnurin $^6/_7$, meðan $^1/_7$ verður afturrindaður.

Hin millumkommunali javningargrunnurin fær innløgur sínar serliga við einum felagskommunalum skatti á øllum leysum og føstum ognum og inntøkum í landinum. Undantiknar eru inntøkur, sum liggja niðanfyri 1200 kr.

Eins og amtskommunali skatturin í Føroyum verður hin millumkommunala endurrindanin í Danmark roknað eftir kommununna uppgávu av teirra skattainntøku í fólkatali, tó verður her eisini viðtikið grundvirðið í kommununi.

Tær útreiðslur, sum heimila til millumkommunala endurrindan, vera álíknaðar kommununi við

$^1/_3$ í mun til fólkatali,
$^1/_3$ í mun til inntøkurnar og
$^1/_3$ í mun til grundvirðið.

Ætlanin við teirri millumkommunalu javningini er á tvinnanda hátt at byrgja fyri, at útreiðslurnar hjá teirri einstøku kommununi til social enda-

mál ikki skulu verða kommununum ovtungar. Tað er so, at tað ofta er, sum tað ber á, annað hvørt tað eru fá ella serliga nógv av gomlum avlamisfólki, fátækum ella sjúkum, sum kommunan sambart lóg hevur forsorgarskyldu fyri.

Umframt til tað, sum er nevnt, veitir tann millumkommunali javningargrunnurin tilskot til skúlaskapin og sjúkrahúsini; tó verður ikki givin studningur til skúlabygningar og skúlans eftirløningarskipan. Hesi eru undantikin, tí at kommununar ikki eiga at fáa endurrindað útreiðslur til ótørvandi dýrar skúlabygningar.

Fyri Føroyar varð við finansplaninum gjøgnumført ein skipan, sum viðvíkjandi rindan av teim socialu útreiðslunum líkist nógv teirri nevndu skipan, menn hava í Danmark. Her varð við finansskipanini ein stórur partur av útreiðslunum fyri skúlaskapin og sjúkrahúsini flattur yvir á ríkiskassan ella amtsgrunnin. Ígjøgnum amtsgrunnin vóru hesar útreiðslur so statt fyri ein part javnaðar út á íbúgvararnar í øllum kommununum í Føroyum, og eru kommununar sjálvar eftir hesari skipan komnar til at bera bert $^{1}/_{10}$ av útreiðslunum til ellisrentu, meðan hinir $^{9}/_{10}$ verða goldnir av ríkiskassanum; harafturímóti rinda kommununar $^{9}/_{10}$ av hjálpikassastuðningi, meðan staturin rindar bert $^{1}/_{10}$, tað er tó her at viðmerkja, at tílík hjálp verður so lítið givin. Av útreiðslunum til einkjubørn rindar amtsgrunnurin helftina og ríkiskassin hina helftina. Á sama hátt verða lararanna grundlønir goldnar; staturin rindar øll løntilleggini hjá lararunum, viðvíkjandi forskotsliga goldnum alimentationarpeningi rindar staturin $^{3}/_{4}$ og kommunan rindar $^{1}/_{4}$ av tí, sum ikki verður aftur goldið av skuldarunum.

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, ásannar, at skattaálíkningarviðurskiftini sum heild tikið eru enn ikki komin at liggja soleiðis at fólk yvirhøvur eru javnstillað viðvíkjandi at bera samfelagsins útreiðslur. Tað er avgjørt rætt at miða móti eini skipan, sum hefur hende óinvna. Men nevndin hevur ikki kunnað komið ásamt um leiðirnar móti hesum máli. Ein minnilutí (P. M. Dam, J. P. Davidsen og L. Zachariasen) heldur, at tað sum skjótast eiga at verða gjørdar ymsar fyriskipanir, sum ið hvussu er byrgja fyri einum ovstórum munni millum hin samlaða løgtings- og kommununskattin á somu inntøkuni í teimum ymsu kommununum, hetta ræður serliga viðvíkjandi teimum stóru inntøkunum. Tað er í seinasta ári hent, at menn hava roynt at sleppa sær burtur úr kommununum við einum nakað høgum kommununskatti og strangari inntøkukannan til kommunur við lágum kommununskatti og einari linari skattainntøkukannan, og hevur hetta borið við sær, at menn við somu stóru inntøkum bera ein so ólíkan samlaðan kommunu- og løgtingsskatt, at munurin telur í túsundum. Hetta er ótolandi rangt, og minnilutin heldur, at tað eigur at verða skipað soleiðis, at inntøkur yvir eitt vist mark eiga at koma at rinda sama samlaða kommunu- og løgtingsskatt; hetta kann gerast við, at ásett verður við lóg, at í teimum kommununum, hvar skattaprocentini liggja niðan fyri miðalskattaprocentini hjá kommununum í Føroyum, skulu inntøkurnar omanfyri nevnda mark til amtsgrunnin rinda millum tann lága kommununskattin og eitt av løgtingsins skattanevnd ásett skattaprocenttal.

Tað vil vera hóskandi at nýta tann á henda hátt innkomna løgtingsskatt sum studning til fátæk bygdabørn, sum ganga í skúla í realskúlanum í Havn ella í øðrum bygdum, har tey ikki hava heim.

Tá ið meirilutin hevur sagt seg hugaðan fyri, at málið verður viðgjørt í landsnevndini og lagt aftur fyri tingið í fyrstu vanligu tingsetu, vil minnilutin fyri at tena eini møguligari sumgongu í málinum ikki í ár sum ætlað seta fram uppskot til samtyktir, men einans í álitinum seta fram til landsnevndarinnar og amtsins umhugsunar nakrar greinir um, hvussu minnilutin hevur hugsað sær hetta mál sett í lóg:

A) **Midlertidige Bestemmelser**

for Færøerne om Regulering af Forholdet mellem Lagtingsskat og Kommuneskat.

§ 1.

I de Kommuner, hvor den kommunale Skatteprocent ligger 1 % eller mere under den gennemsnitlige Skatteprocent paa Færøerne, skal de skattepligtige, hvis Skatteindtægt er over 10.000 Kr. svare til Amtskommunen som Tillægsskat et Beløb, som svarer til Forskellen mellem, hvad de skulde have betalt som Kommuneskat, hvis Skatteprocenten var den gennemsnitlige, og det Beløb, de betaler som Kommuneskat.

§ 2.

Lagtingets Skattendvalg udregner Færøernes gennemsnitlige Skatteprocent paa følgende Maade:

Oplysninger indhentes om Skatteprocenten i hver Kommune, Folketallet i hver Kommune afrundes til Hundreder, saaledes at overskydende Tal under 50 bortkastes og 50 og derover forhøjes. For hver Kommune multiplieres dette af afrundede Folketal med Skatteprocenten, og alle disse Tal sammenlægges. Det derved fremkomne Tal dividéres med det samlede afrundede Folketal paa Færøerne, og derved udfindes den gennemsnitlige Skatteprocent.

§ 3.

Oppebørselskontoret foretager derefter Udregningen af den i § 1 omhandlede Tillægsskat og opkræver samme.

Om Skattens Forfaldstid, Forrentning og Udpantning gælder de samme Regler som personlig Skat til Amtskommunen.

B) Landsnevndin verður heimilað til at nýta tann pening, ið kemur inn gjøgnum hendan skatt, til studning til børn, sum ganga í realskúlar, ið liggja í øðrum bygdum enn teirra heimstað.

Uppskot:

Málið verður beint í landsnevndina, sum verður biðin um í samráðing við amtið at vlðgera tað og leggja tað aftur fyri tingið til næstu vanligu tingsetu.

26. nov. samtykt 20—0.

7. Fíggjarviðurskifti og dýrtíðarskipanir.

Álit sí skj. nr. 5, skj. nr. 6 og nr. 9.

Broytingaruppskot frá J. Patursson o. fl.:

I. Sum nýtt punkt til minnilutauppskotið:

A) 1. januar komandi tekur løgtingið fíggjarráðið í Føroyum í sínar hendur fyribils.
B) Landsnevndin starvar undir tingsins ábyrgd sum landstjórn fyribils.
C) Løgtingið verður slitið og nýtt val útskrivað, so skjótt sum líkindi verða til tað.

II. Til uppskotið í nevndarálitinum:
Pt. X verður lagt burtur úr.

29. nov. fall broytingaruppskotið og uppskot minnilutans við 4—0. Uppskotini í nevndarálitinum I A samtykt 17, I B fall 4—0, II samtykt 21, III við 17, IV—IX við 21 og X—XI við 16.

8. Maximalprísir.

Álit:

Spurningurin um maksimalprísir á føroyskum seyðakjøti og neytakjøti varð saman við spurninginum um mjólkapris reistur í landsnevndini í summar. Menn vóru yvirhøvur samdir um, at kjøtprísirnir vóru vorðnir alt ov høgir í samanburði við tann maksimalpris, sum tá galt fyri mjólk, og at tað lætt kundi føra til, at mjólkaframleiðslan minkaði við tað, at menn kundi fáa hug til at drepa mjólkaneyt fyri at njóta gott av teim óvanliga høgu kjøtprísum. Eisini kundi hugsast, at mjólklu kundi verða nýtt til kjøtframleiðslu.

Vørunevndin og Priskontrolraadet fekk síðan málið til viðgerður, og úrslitið av samráðingunum varð „Bekendtgørelse om Maksimalpris paa færøsk Lammekød og Okseksød" av 17. juli 1941. Henda kunngerðin skuldi galda til 15. septbr. í ár.

Løgtingið hevur nú havt spurningin um maksimalpris á seyðakjøti og neytakjøti til viðgerðar. Ein 5-mannanavnd hevur kannað málið.

Ein minniluti (J. Paturssen) ynskir ikki at seta fram uppskot.

Ein meiraluti (Dam, L. Zachariasen, A. Samnelsen og O. J. Joensen) skjýtur upp, at tingið viðtekur hjálagda uppskot til maksimalprísir á føroyskum seyða- og neytakjøti.

Forslag

til

Bekendtgørelse om Maksimalpris paa færøsk Faarekød og Oksekød.

I Medfør af Lov Nr. 288 af 2. September 1939, jfr. Kundgørelse Nr. 33 af 23. Oktober 1940, fastsættes herved følgende:

§ 1.

Indtil videre maa Prisen paa Faar og Faareprodukter ved Salg paa Færøerne ikke overstige:

1. Ved *Salg af hele Faar*, saaledes at Blod, Tælle Hoved, Indmad og Skind tilfalder Køberen uden særskilt Betaling

i Tiden indtil 15. November 1941 ..... 3.00 Kr. pr. kg.

fra 15. November 1941 og indtil videre ..... 3.50 Kr. pr. kg., beregnet efter Faarets Slagtevægt.

Ved Salg af Faar fra Producent skal Blod, Tælle, Hoved, Indmad og Skind medfølge.

2. Ved Salg af Faarekroppe eller Dele deraf

i Tiden indtil 15. November 1941 ..... 3.00 Kr. pr. kg.

i Tiden fra 15. November og indtil videre..... 3.50 Kr. pr. kg.

For særskilt Salg af Blod, Tælle, Hoved, Indmad og Skind gælder indtil videre ingen Maksimalpris.

3. Ved Salg af Skærpekød, Rastkød og Skinsekød, kogt eller ukogt,

i Tiden indtil 12. Marts 1942 ..... 4.00 Kr. pr. kg.

i Tiden fra den 12. Marts og indtil videre ..... 5.50 Kr. pr. kg.

Faarekød maa først sælges til den under 3 fastsatte Pris, naar mindst 14 Dage er hengaaet efter Slagtningen.

4. Ved Salg af Faarekroppe eller Dele deraf, der har været opbevaret i Kølehus (Iskød), er det efter 1. Januar 1942 tilladt at beregne en Pris paa 3.50 Kr. pr. kg.

5. Ved Salg af Kødpølser, der udelukkende inheholder Faarekød, 5.50 Kr. pr. kg.

Det er forbudt at falbyde Faarekødpølser, der indeholder Blandinger af Faarekød med Oksekød eller andre Stoffer.

7. Ved Salg af Faarerullepølse 6.50 Kr. pr. kg..

§ 2.

Indtil videre maa ved Salg paa Færøerne af færøsk Oksekød (Kød af Tyre, Okser, Køer og Kvier over 1 Aar) Prisen ikke overstige 2.20 Kr. til Producenten pr. kg., leveret slagtet Vægt og ved Salg gennem Mellemhandler 2.80 Kr. pr. kg. Kød som Gennemsnitspris ɔ: at Prisen ved Salg af Kød fra Mellemhandler til Forbruger *kan* overstige 2.80 Kr. pr. kg. for de mere værdifulde Stykker af en Oksekrop, naar Prisen paa de mindre værdifulde Stykker samtidig sættes saa meget under 2.80 Kr. pr. kg., at Sælgeren ialt for hele Kroppen opnaar højst 2 Kr. 80 Øre pr. kg i Gennemsnit.

§ 2, 2. Stk. er *saalydende:* Ved Salg af Kødpølser, der udelukkende er fremstillet af Oksekød, maa Prisen ikke overstige 5.00 Kr. pr. kg. Det er forbudt at falbyde Oksekødpølser, der indeholder Blandinger af Oksekød med andre Kødsorter eller Stoffer.

§ 3.

Udover de fastsatte Maksimalpriser maa ikke betinges, betales eller modtages særskilt Vederlag for Emballage, Forsendelse eller lignende udover, hvad Emballage, Forsendelse eller lignende bevisligt har kostet Sælgeren.

Alle Aftaler indgaaet før denne Bekendtgørelses Ikrafttræden om Køb og Salg af færøsk Fårekød eller Oksekød til højere Priser end Maksimalprisen er ugyldige.

§ 4.

Bestemmelserne i Handelsministeriets Bekendtgørelse af 19. Oktober 1939 om Varepriser m. v., jfr. Amtets Bekendtgørelse af 18. November 1939, finder fremdeles Anvendelse ogsaa paa Køb og Salg af de i nærværende Bekendtgørelse omhandlede Varer.

§ 5.

Overtrædelse eller Forsøg paa Overtrædelse af de i nærværende Bekendtgørelse indeholdte Bestemmelser straffes efter Reglerne i Lov Nr. 288 af 2. September 1939.

§ 6.

Nærværende Bekendtgørelse træder i Kraft straks. Samtidig ophæves Bekendtgørelsen af 17. Juli 1941 om Maksimalpris paa Færøsk Lammekød og Oksekød.

12. sept., uppskotið samtykt 18—0.

9. Byggingarkønur ráðgevari.

Alit:

Tað hevur í teimum seinri árunum verið kent sum eitt stórt sakn, at tingið ikki hevur havt ein tílíkan kønan mann at ráða yvir, sum altíð kundi verið tinginum tøkur sum byggikønur ráðgevari, og sum skuldi havt tilsýn við øllum almennum bygningum og byggifyriføkum, ið løgtingið hevur ábyrgd fyri.

Samráðingar vóru fyri nøkrum árum síðan førdar við verkfrøðing Fonsdal um málið, og helt hann seg kunna gera arbeiðið móti hóskandi samsýning.

Vinnunevndin (Erhvervskommissionen) setti í sínt tíð uppskot fram um at setta á stovn ein byggigrunn, ið skuldi veita lán til bygging av nýggjum húsum. Um hettar kom í lag, vildi verið neyðugt at havt eftirlit við teimum húsum, hvar lán varð givið, og kundi tað ætlast at verið hóskandi, um hesin spurningur verð umhugsaður í sambond við hetta mál. Um hesin spurningur skal greiðast til fulnar, er tað eyðsæð, at hann er ov stórur og týðuingarmikil til at vera framíhjáyrki hjá manni.

So leingi sambandið við Danmark ikki er komið í rætt lag vegna kríggið, verður byggigrunnurin ikki stovnaður, og verður tí heldur ikki brúk fyri kønum umsjónarmanni í hesum sambandi.

Sum statt er, er almikið trot uppá alt byggitilfar, og einki er útiltið fyri, at tilfar í næstum til nakran mun kann skaffast til landið; tað kann tí heldur ikki roknast við stórvegis bygging, so leingi kríggið varar. Sum viðurskiftini eru, er tað heldur ikki so átroðkandi í løtuni at taka avgerð í hesum máli. Novndin heldur tað vera beinast at støðga at greiða málið fyri fyrst.

Uppskot:

Nevndin skal mæla til, at málið viðvíkjandi byggikønum ráðgevara verður goymt fyri fyrst.

11. okt. samtykt 16—0.

10. Lønhækkan til jarðamøður.

Álit (J. Patursson við fyrivarni):

Í skrivi av 25. august 1941 søkir hitt føroyska ljósmøðurfelagið um at fáa dýrtíðarviðbót til ljósmøðurnar. Sagt verður, at í Føroyum eru 28 ljósmøður í arbeiði, og nakrar sita við eftirløn.

Landsnevndin verður biðin um at leggja umsókn fyrt amtmannin.

Málið hevur verið lagt fyrt amtmannin, ið gevur eina gjølla frágreiðing um, hvussu ljósmøðurnar eru løntar, eins og undir hvørjum umstøðum lønásetingin er hend.

Greitt verður frá, hvussu dýrtíðarviðbótin fyri giftar tænustumenn er roknað.

Amtið heldur ikki, at ljósmøðurnar kunnu fáa dýrtíðarviðbót eftir teim reglum, sum eru galdandi fyri tænastumenn státsins, men er sinnað fyri at veita teim somu dýrtíðarviðbót sum honorarlønt fáa, nevniliga 15 % av grundlønini.

Í ritt av 23. august 1941 søkir ljósmøðurfelagið tingið um, at uppskotið, sum tingið 23. november samtykti um at hækka ljósmøðurlønina frá 400 kr. til 600 kr., verður sett í gildi.

Nevndin hevur haft málið til viðgerðar og skal úttala:

Viðvíkjandi teirri nevndu løgtingsins viðtøku liggur landið soleiðis, at amtmaðurin undir núverandi umstøðum ikki heldur seg til státsins vegna at ganga við til lógir ella lógbroytingar, ið áleggja státinum nýggjar útreiðslur, og má so statt málið um hækkan av ljósmøðranna grundløn bíða, til samband verður aftur við dansku ríkisstjórnina.

Tað er rættvist og rímiligt, at ljósmødrunum verður játtað ein dýrtíðarviðbót, sum samsvarar, hvat ið onnur fáa, sum eru lønað á líknandi hátt sum tær.

Nevndin skal tí mæla til, at ljósmødrunum verður veitt ein dýrtíðarviðbót samsvarandi til tað, ið til dømis honorarlønaði fáa.

Uppskot:

1) Viðvíkjandi lønhækkingarumsóknini verður vist til álitið.

2) Tingið mælir amtmanninum til státsins vegna at játta teim føroysku ljósmødrunum dýrtíðarviðbót eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri honorarlønaði, soleiðis at statur og løgting rinda hvør sína helvt av dýrtíðarviðbótini.

4. nov. samtykt 16—0.

11. Plantasjan í Trongisvági.

Áit:

Forstanderskabet for Frodebø Sogns Kommune har tilsendt Lagtinget Skrivelse af 3. September d. A., hvori Forstanderskabet krøver, at Kommunen overtager Pasning af Plantagen i Trangisvaag. I Skrivelsen anføres, at Kreaturer nedtramper Træerne, og at Kommunen ejer Plantagen, samt at det er rimeligt, at Kommunen passer samme. —

Sagen, som har været forelagt Amtet, er vedlagt Skrivelse af 29. September fra Færøernes Retskreds, Sorenskriver Bonnevie som Formand for Færøernes Plantningsudvalg.

Sorenskriveren (Dommeren) oplyser, at Fru Josephine Mortensen i April 1930 bad sig fritaget for Hvervet som tilsynsførende med Plantagen i Trangisvaag, og efter Anmodning af det danske Hedeselskab overtog Sysselmand Chr. Djurhuus derefter dette Hverv. — Endvidere udtaler Sorenskriveren, at Sysselmand Djurhuus har i denne lange Aarrække udført nævnte Hverv uden Vederlag, alene af Interesse for Plantningssagen. —

Sorenskriveren har i Sagens Anledning indhentet en Udtalelse fra Sysselmand Chr. Djurhuus, dateret 26. September d. A.

Sysselmand Djurhuus udtaler følgende:

„Idet henvises til den hoslagt tilbagefølgende Sag vedrørende Trangisvaag-Plantage tillader jeg mig at bemærke, at jeg i de Aar, jeg har haft Tilsynet med Plantagen, altid har følt det som en Æressag bedst muligt at værne om Plantagen og passe, at Planter og Buske ikke blev beskadiget, men fik den bedst mulige Røgt. Jeg formoder, at man i de andre paa Øerne værende Plantager har gjort den Erfaring, at Planterne kun vokser meget langsomt de første Aar, den samme Erfaring har jeg med Hensyn til Trangisvaag Plantage, men nu i de sidste Par Aar er Væksten øjensynlig og for mange Træers Vedkommende ganske betydelig.

Som Udvalget formentlig bekendt er Græsvæksten meget generende for de lave Planter. Dette er forsøgt afbødet ved Slaaning og Lugning, desuden har jeg som et Forsøg for en kortere Tid i Fjor og en kortere Tid i Aar under fornødent Kontrol ladet en Hest græsse i Plantagen, og viser Erfaringen, at Hesten har ædt Græsset uden i nogen Maade at beskadige Planterne. Det er saaledes absolut ikke rigtigt, saaledes som Forstanderskabet vil mene, at Kreaturer nedtramper Træerne. Der har ikke været andre Kreaturer i Plantagen end nævnte Hest. Hvad angaar Forstanderskabets Paastand om, at Kommunen ejer Plantagen og derfor bør passe denne bemærkes, at Kommunen gansko vist i Matrikulen staar noteret som Ejer af Plantagen, men kan Meningen dog næppe have været den, at Kommunen virkelig skulde være Ejer, i hvert Fald ikke i den Forstand, at Forstanderskabet frit skulde bestemme over Plantagen. Det maa formodes at være Plantningsudvalget, der fremdeles er den Myndighed, der har den egentlige Dispositions- og Bestemmelsesret over Plantagen.

Sluttelig bemærkes, at saafremt Udvalget fremdeles ønsker min Bistand ved Tilsynet, er jeg fortsat villig til at paatage mig dette paa samme Maade som hidtil".

Sorenskriveren anfører yderligere, at „da det offentliges Tilskud til Plantningssagen paa Færøerne formentlig er betinget af, at disse Forsøg

ledes af det danske Hedeselskab, og da Tilsynet med Plantagen i Tveraa af Hedeselskabet er overladt Sysselmand Djurhuus, bør der efter mit Skøn ikke foretages nogen Ændring med Hensyn til dette Tilsyn uden Forhandling med Hedeselskabet, og da en saadan Forhandling synes udelukket for Tiden, bør Sagens Afgørelse i al Fald udsættes indtil videre, saaledes at Sysselmand Djurhuus fortsætter sit Arbejde, for hvilket Plantningsudvalget er ham meget taknemmelig".

Udvalget, hvortil Sagen er henvist, er indforstaaet med de i Sagen givne Oplysninger fra Formanden for Færøernes Plantningsudvalg, Sorenskriver Bonnevie og Sysselmand Djurhuus.

Man gaar ud fra, at Plantagen maa blive passet bedst muligt. Iøvrigt henvises til Plantageudvalgets Formands Skrivelse, som anbefaler, at Sysselmand Djurhuus fremdeles varetager Hvervet som tilsynsførende med Plantagen.

Forslag:

Afskrift af Betænkningen tilstilles Forstanderskabet for Frodebø Sogns Kommune.

24. nov. samtykt 16 —0.

---

12. Eftirløn til tænastufólk tingsins.

Álit:

Frá telefondámum telefonverks Føroya løgtings er umsókn, dagsett 16. februar 1941, komin til tingið um at taka til viðgerðar spurningin um eftirløn til telefondámur og um at taka spurningin um lønskipanina við verkið til viðgerðar á breiðum grundarlagi.

Starvsfólk við telefonverkið hava mánaðarløn, fáa dýrtíðarviðbót eftir føroyskum prístali, og verður viðbótin útroknað eftir reglum, galdandi fyri danska ríkisins tænustufólk, eina ferð um árið. Hareftir kemur nýggj viðbót í gildi hvønn 1. apríl. So leingi prístalið er hækkandi, kemur viðbótin aftaná, men verður prístalið fallandi, kemur viðbótin afturfmóti at liggja hægri, enn vøruprísirnir um sonn tíð ásetta.

Nevndin heldur tí ikki, at tað í løtuni er grund til at broyta sjálva lønskipanina, eisini av teirri grund, at tað enn er so ivasamt, hvussu henda broytanin, sum nú fer fram í øllum prísum, fer at enda.

Annars mælir nevndin til, at spurningur[illegible] um eftirløn til fólk í

løgtingsins tænastu verður tikin upp á breiðnu grundarlagi. Tingið hevur áður, burtursæð frá *Løgtingsbeslutning af 25. og 26. September 1928*, einans viðtikið at geva einstøkum persónum eftirlønarrætt, men nevndin heldur tað vera tørv á nú at fáa sett upp einsljóðandi reglur viðvíkjandi eftirlon fyri øll tænastufólk tingsins. Eftir løgtingsavgerðini í september 1928 skuldu fólk í telefonverksins tænastu og fólk í tænastu á Bróstsjúkrahúsinum í Hoydølum átt sama eftirlønarrætt. Meðan sjúkrasystrar og økonoman á Bróstsjúkrahúsinum hava fingið eftirlønarrætt eftir teim í 1928 ásettu reglum hevur eingin persónur kunnað fingið eftirlønarrætt eftir hesum reglum við telefonverkið. Hetta kemur væl av tí, at tað hava verið tvær ymiskar nevndir (saumtorinnevndin og telefonnevndin), sum have havt við spurningin um at veita eftirløn eftir teim í 1928 viðtiknu reglum at gera. Nevndin heldur tað vera beinast, at spurningurin um eftirløn til fólk í tingsins tænastu verður viðgjørdur bert á einum stáði, og at hann verður lagdur undir landsnevndina.

Sum nú er, hava telefonverkið og bróstsjúkrahúsið hvørt sín eftirlønargrunn; telefonverksins grunnur er um 20.000 kr. og hin eitt sindur yvir 5.000 kr. Nevndin mælir til, at hesir grunnar verða lagdir saman í ein grunn, og at tingið aftrat í henda grunn leggur 25.000 kr., sum eftir fíggjarætlanini fyri amtsgrunnin ætlandi verða tøkar til hetta endamál.

Eisini mælir nevndin til, at fólk í tingsins tænastu, sum nú eru komin ov nógv til árs fyri eftir vanligari mannagongd at fáa eftirlønarrættindi, men sum kundu havt fingið hesi rættindini eftir løgtingssamtyktini í 1928, fáa eina serliga skipan gjørda fyri at kunna koma inn undir eftirlønarreglurnar.

Uppskot:

1. Tað verður álagt landsnevndini at koma fram við uppskoti til næstu tingsetu um felags eftirlønarreglur fyri fólk í tingsins tænastu.
2. Fólk í tingsins tænastu, sum nú eru komin ov nógv til árs fyri eftir vanligari mannagongd at fáa eftirlønarrættindi, men sum kundi havt fingið hesi rættindi eftir løgtingssamtyktini í 1928, fáa eina serliga skipan gjørda fyri at kunna koma inn undir eftirlønarreglurnar.
3. Telefonverksins eftirlønargrunnur og eftirlønargrunnurin fyri bróstsjúkrahúsið verða lagdir saman í ein grunn: *Eftirlønargrunnur løgtingsins*, sum verður stýrdur av landsnevndini gjøguum løgtingsskrivstovuna.
4. Tingið leggur aftrat í henda grunn 25.000 kr., ífall tær sambart fíggjarætlanini fyri amtsgrunnin verða tøkar til hetta endamál.

27. nov. samtykt 18—0.

13. Viðkan av Føroya almenna vøruhandli.

Álit:

Í løgtingstíðindi fyri 1939, síðu 247, undir tingmáli: *Framforsler vegna áfriðinum*, álit B, er greitt frá teim hendingum og umstøðum, sum hava ført til stovnan av einum landshandli fyri landsins rokning. Hendingarnar og umstøðurnar eru veraldarbardagin, sum brast á um 1. september 1939.

Eins og við byrjan av heimsbardaganum 1914—18 helt tingið tað hesa ferð vera neyðugt at seta á stovn ein landshandil til tryggjan fyri, at nøgdin av neyðsynjarvørum í landinum til eina og hvørja tíð var nóg stór, so at vit skuldu ikki koma at standa á berum, um tilflutningurin til oyggjarnar kom at fara óregluliga fram.

Nevndin, sum í teirri vanligu tingsetuni um heystið 1939 hevði málið til viðgerðar, var samd um at siga, at vørur máttu fáast skjótt til landið, „da Vanskelighederne tiltager for hver Dag, der gaar, og Fragterne stadig synes stigende." Annars var nevndin ikki samd um, á hvønn hátt landshandilin skuldi verða settur á stovn.

Ein meiriluti (Dam, J. P. Henriksen, Chr. Holm Jacobsen, Joen Rasmussen og A. Samuelsen) var samdur um at seta á stovn ein landshandil so skjótt sum gjørligt. Uppskot meirilutans varð viðtikið. Hesin handil skuldi eftir teirri reglugerð, ið gjørd varð fyri hann, mest arbeiða fyri at útfylla ella hjálpa um tey brek, sum vera kundi í privatum vorutilfluttningi til oyggjarnar. Á er sett í reglugerðini § 10, hvørji tey neyðturvulligu vørusløg eru, sum handilin skal halda. Tó verður skoytt upp í, at tey vørusløg, sum nevnd eru, hert ern vegleiðandi, og at tað annars vil vera at ansa eftir, hvussu nógvar vørur heilsølumenninir hava á goymslu.

Nevnt skal vera, at tann meiraluti, sum gekk saman um uppskotið, upprunaliga ikki var samdur, við tað at Dam og J. P. Henriksen yusktu landseinahandil við teim vørum, sum tingið ásetti sum neyðsynjarvørur, meðan Holm Jacobsen vildi hava landshandilin fyriskipaðan og leiddan av keypmonnunum, soleiðis at hitt almenna legði hin neyðturviligu peningin til.

Ein minniluti í nevndini (M. A. Jacobsen og Edw. Mitens) helt tað ikki vera neyðugt beinleiðis at seta á stovn ein landshandil, men ráddi til at velja eina nevnd, sum saman við amtmanninum skuldi fylgja við og kanna eftir vørunøgdini í landinum og fáa heimild til um neyðugt at taka landinum einarætt til innflutning av neyðsynjarvørum.

Sum tað sæst av tí, sum fram er ført, hevur tankin um at geva einum landshandli einarætt til innflutning av neyðsynjarvørum verið nógv framml í tingsetuni 1939. Har hevur tó eingin avgjørdur meiraluti verið fyri at taka sær um reiggj fyri beinavegin at føra tankan út í verk.

Tá ið málið um landshandilin er reist á tingi í ár av sjálvstýris- og javnaðarbólkinum, er tað gjørt í tí treysti, annaðhvørt at fáa ført ígjøgnum tankan um landshandil við neyðsynjarvørur ella at fáa viðka landshandilsins virkisumráði til at umfata flest møguligar vørur og soleiðis, at handilsins innkeyp av vørum frá útlandinum kann fara fram í størri nøgdum enn hígartil er gjørt, fyri harvið at gera innkeypini biligari.

Ein meiraluti í nevndini (L. Zachariasen, Dam, A. Samuelsen og O. F. Joensen) kann taka undir við at viðka landshandilsins virkisumráði,

soleiðis sum framført er, meðan ein minniluti (J. Patursson) heldur, at skal hesin stóri handilsskapur dugna landinum í tann mun, sum hann er ætlaður til, gerst tað noyðugt, at handilskønir menn og farmasiglingarkønir menn eru uppi í nevndini. So statt tilrøður minnilutin, at nevndin verður sett soleiðis saman, at løgtingið velur 3 nevndarmenn, keypmannafelagið ein og reiðarafelagið ein mann.

Harumframt vil minnilutin tilráða at gera nakrar broytingar í teirri núgaldandi handilsskipan. Tað er løgtingið, sum á Føroya vegna stendur í ábyrgd fyri teimum lántu peningum, sum landshandilin hevur í hondum. Tað kann tí ikki haldast at vera beint, at „amtmaðurin", sum ikki hevur fólkavalda ábyrgd, hevur tað vald í nevndini, sum tann núgaldandi skipan tilsigir honum. Tessvegna hevur minnilutin skotið upp, at alt ræðið verður flutt hagar til, sum ábyrgdin er, nemliga til nevndina. Samsvarandi hesi áskoðan setur minnilutin eisini uppskot um, at tað verður løgtingsskrivstovan, sum verður at hava ta dagligu eftirsansan við handlinum í honduni, sum ásett er í núgaldandi grein 7.

Meiralutin loyvir sær eisini at benda á, at við tað at ymsar vørur nú eru á bundnum lista og innfluttningurin av teimum soleiðis avmarkaður, vil tað vera høskandi, um tingið mælir *Færøernes Valuta-Central* til at lata landshandilin fáa mest møguligt av teim vørum, sum standa á bundnum lista, tí landshandilin vil betri enn heilsølumenninir kunna býta hesar vørur javnt út um landið.

Meiralutin má ásanna, at sum landshandilin nú fer fram, hevur hann nógv minni likindi til vinning av vørusølu, enn heilsølumenninir hava, og at viðurskiftini í so máta vilja vera nógv verri, tá prísfallið einaferð kemur á marknaðinum. Løgtingið hevur sjálvsagt tann møguleika, tá at tarna innfluttning av vørum soleiðis, at tær vørur, sum liggja í landinum, fyrst vera seldar. Men slíkt tiltak vil av nógvum bert verða uppfatað sum vørudýrkandi, og tingið vil liggja undir allari ábreiðsluni.

Eisini skal verða framført, at bygdakeypmenn, sum nú er, javnliga klaga um, at landshandilin hevur so lá vørusløg á goymslu, at tað loysir seg ikki at skriva til hansara eftir vørum.

Vegna tað í álitinum framførda loyvir meiralutin sær at seta fram fylgjandi

Uppskot:

I. *Frá meirilutanum:*

1. Tingið biður vørunevndina og amtmannin ansa eftir, at landshandilin, sum higartil mest hevur verið ein hjálparhandil, í framtíðini víðkar sítt virksumráði soleiðis, at handilin hevur í hondum keyp og søln av øllum vanligum keypmannsvørum í so stórum nøgdum sum gjørligt. Handilin eigur at hava á goymslu flest møguligt av teim vørum, keypmenn vanliga hava brúk fyri, herundir eisini klædnavørur o. t., og innkeyp av vørum frá útheiminum eiga at vera gjørd í so stórari nøgd, sum viðurskiftini loyva.
2. Fyri at tær innfluttningsvørur, sum nú standa á bundnum lista, kunna verða býttar so javnt út um landið millum keypmenn og harvið millum fólktð sum gjørligt, heitir tingið á Færøernes Valuta-Central um at geva landshandlinum innfluttningsloyvi til mest møguligt av hesum vørum.

II. *Frá minnilutanum* (J. Patursson):

A. a) Løgtingið setur eina 5-mannanevnd til at hava landshandilin í hondum, samansetta soleiðis at løgtingið velur 3 nevndarmenn, keypmannafelagið ein og útgerðamannafelagið (reiðarafelagið) ein mann.

b) Í øðrum lagi (subsidiært);

Løgtingið setur eina 7-mannanevnd til at hava landshandilin í hondum, samansetta soleiðis, at løgtingið velur 5 nevndarmenn, keypmannafelagið ein og útgerðamannafelagið ein mann.

B. **Reglement for Færøernes offentlige Vareforsyning:**

Til grein 4.

1) Burtur úr verður at leggja: „samt Amtmanden over Færøerne".

Til grein 5.

2) Í fyrsta petti verður at leggja burtur úr „og Amtmanden i Forening".
3) Í øðrum petti verður at leggja burtur úr „og Amtmandens" og at umskifta orðið „disses" til „dettes".
4) Í triðja petti verður at leggja burtur úr „Amtmanden sammen med".

Til grein 7.

5) Orðið „Amtmanden" verður lagt burtur úr og í staðin fyri verður sett: „Lagtingskontoret".

Í grein 6 og § 7 verður lagt burtur úr „og Amtmanden".

Til grein 8.

6) Í fyrsta petti verður lagt burtur úr „og Amtmanden i Forening".
7) Í sama petti gongur 2. punktum út.
8) Í øðrum petti verða orðini „og Amtmanden" og „eller Amtmanden" løgd burtur úr.
9) Í triðja petti verður orðið „Amtmanden" skift um við „Udvalgets Formand".

Til grein 9.

10) Orðini „og Amtmanden" verða at leggja burtur úr.

Uppskot minnilutans fall 4—0, meirilutauppskotið samtykt 14—0 hin 29. nov.

14. Bøtan um lønkor læraranna.

Álit:

Føroya lærarafelag hevur í riti av 8. september 1941 søkt tingið um at bøta um lønarkor læraranna.

Vísst verður á, at meðan arbeiðarar eins og nógv fastlønt fólk í privatum virki hava fingið dýrtíðarviðbót, ið svarar til teir hækkandi prísirnar, hava lærararnir bert í lítlan mun fingið dýrtíðarviðbót. Løn teirra rekkur tessvegna hjá nógvum als ikki til tær nógvu útreiðslurnar.

Greitt verður frá, at lærararnir hava vent sær til amtið sum statsins umboð, men vænta teir sær ikki at kunna fáa nakra dýrtíðarviðbót haðani nakað skjótt aftur.

Nevndin, ið hevur haft málið til viðgerðar, heldur, at tingið ikki í løtuni kann taka avgjørda støðu í hesum máli. Samráðst hevur verið við amtmannin. Hann heldur fram, at spurningurin um dýrtíðarviðbót til lærararnar um kyndilsmessuleitið verður tikin til viðgerðar, og at teir, um viðurskiftini eru til tess, kunna væenta, at teimum eins og øðrum tænastumonnum við fíggjarársins byrjan verður givin dýrtíðarviðbót. Verða tó viðurskiftini til ta tíð at liggja soleiðis fyri, at staturin onga ella bert lítla dýrtíðarviðbót kann geva, heldur hann, at tingið væl kann taka til umhugsunar at veita lærarunum uppískoyti til løn teirra.

Nevndin heldur, at lærarnum eins og øðrum íbúgvarum landsins tørva at fáa uppbot fyri dýrtíðina, men tá ið tingið aftiandi ikki verður samanum um kyndilsmessutíð, skjýtur nevndin til, at landsnevndin verður heimilað at taka avgerð um dýrtíðarviðbót skal veitast lærarunum og øðrum fastløntum og hvussu nógv.

Uppskot:

Landsnevndin verður heimilað tingsins vegna at taka avgerð um lærarum og øðrum fastløntum í almennari tænastu skal veitast dýrtíðarviðbót og hvussu nógv.

24. nov. samtykt 17—0.

15. Fornmenja rannsóknir.

Álit:

Løgtingsmaður J. Patursson hevur í riti av 8. september 1941 biðið tingið tikið upp aftur málið um fornmenja rannsóknir, ið var á tingi í fjør, sí tingtíðindi 1940, bls. 180. Umsøkjarin minnir á viðtøkuna á tingi 1914, sí tingtíðindi bls. 7, fylgiskjal 13 fyri hetta ár, men heldur nú vera ónýtligt tað uppskotið til friðingarreglur, ið tá var viðtikið, men sum ikki varð sett í gildi. Hann ræður til *at* gera seg kunnugan við uppskot til friðingarreglur fyri Kirkjuboargarð, sí lógtingstíðindi 1927, fylgiskjal 24, *at* kanna eftir, hvussu menn í Íslandi, Noregi og Danmark hava skipað fyri í fornmenjamálum, *at* miða seg eftir viðurskiftunum heima hjá okkum yvirhevur, og so burtur úr øllum hesum tilfari at skapa hóskandi reglur til varðveitslu av okkara fornmenjum.

Stýrið fyri Føroya Forngripafelag hevur eisini lagt á ting bønarbrøv, dagssett 25. juni 1941, ið gongur í sama ætt. Hildið verður fram, at manga staðni í Føroyum eru fornleivdir, t. d. gomul bú- og grevstrarpláss, ið eru í vanda fyri at týnast, og sagt verður, at tað ofta er heitt á felagið at taka sær av og bjarga okkara fornleivdum, ið tíðartýningin hevur sett tonn sína á. Men felagið er figgjarliga avmalitið, og uttan pening kann ikki eitt grevstrar- og kanningararbeiði gerast. Søkt verður um fyribils at fáa 1.000 kr. frá tinginum til hetta arbeiði.

Nevndin er á einum máli við umsøkjaraman, at tað er virðismikið fyri okkum sum fólk, at okkara fornmenjarlutir verða varðveittir. Mælt verður til, at tingið eftir førimuni dugnar fornmenjarmálinum, og heldur nevndin, at tað er beinast hjá tinginum at gera tað við at veita Føroya Forngripafelag, ið er stovnað til varðveitslu av fornminnum okkara, ein hóskandi styrk.

Nevndin ásannar, at tað er neyðturvuligt, at varðveitslan av okkara fornminnum verður løgd í eina fasta skipan, og loyvir sær tessvegna at skjóta til, at felagið til næstu tingsetu leggur fram uppskot til friðingarreglur o. a. m., ið tørvar at verða gjørt frá almennari síðn.

Uppskot:

1) Tingið játtar úr amtsgrunninum Føroya Forngripafelag 1.000 kr. at nýta til eftirkannan og varðveitan av okkara fornleivdum.
2) Føroya Forngripafelag verður biðið um til næstu tingsetu at leggja fram uppskot til friðingarreglur o. a. viðvíkjandi fornmenjarmálinum.

30. sept. samtykt 16—0.

16. Umsókn frá »Frelsens Hær«.

Álit:

I en Skrivelse til Lagtinget af 13. September d. A. ansøger Frelsens Hær om Tingets Medvirken til, at der gives Hæren Tilladelse til at holde evangeliske Møder i de færøske Skolelokaler.

I Andragendet gøres der opmærksom paa, at „Frelsens Hær" nu i ca. 17 Aar har arbejdet her paa Færøerne, og at Hærens Hovedopgave har været gennem Husbesøg og Møder at paavirke Børn og Voksne i samme Retning, som Folkekirken arbejder. I saa Henseende henviser man til en historisk Oversigt over Frelsesarmeens Oprindelse og Overførelse til Norge m.m., som findes i et Skrift betitlet „Femti års korstog for Gud og Norge" udkommet i Oslo 1937. Fra dette Skrift skal Udvalget anføre følgende:

„Som Frelsesarmeen er upolitisk må den også sies å være usekterisk. Armeens grunnlegger vilde aldri danne en sekt. William Booth ønsket å opreise en stor hjelpehær for Guds stridende kirke på jorden, en hær kjæmpende i alle land, blandt alle folk og bekjennelser med det ene store mål å vekke menneskene op av syndens søvn til å søke den frelse Jesus har forhvervet ved sin soningsdød på korset. Armeens forkynnelse omfatter det centrale i selve kristendommen slik som den er uttrykt i den apostoliske troesbekjennelse. Da Armeen således er inter-konfesjonell og ikke danner noe dissentersamfund (dens fleste medlemmer står i statskirken), faller det også av sig selv at den heller ikke benytter kirkeltge ceremonier eller sakramenter som heller ikke omfattes af dens troeslære eller forkynnelse.

Overfor de forskellige kirker og samfund pålegger Armeens „Ordrer og Regler" å undgå alt, som kan skade eller hindre deres arbeide. Det heter i nevnte regler at „en officer ikke må kritisere noe religiøst samfunds troesartikler eller skikker, heller ikke tale nedsættende om de enkelte presters eller predikanters optreden, selv om disse skulde angripe Armeen. Officeren bør heller ikke diskutere noen kirkes eller samfunds spesielle læresetninger, sakramenter, ceremonier eller fremgangsmåte".

Færø Amts Skoledirekton har under 12. Februar 1927 udsendt et Cirkulære om Benyttelse af Folkeskolens Lokaler. I dette Cirkulære indskærpes de Regler for Benyttelse af Skolelokalerne, som findes i Kirke- og Undervisningsministeriets Skrivelse af 19de Marts 1889. — Af nævnte Cirkulære fremgaar bl. a, at der paa de Steder, hvor ingen Forsamlingshuse findes, kan Skolelokalerne med Skoledirektionens Samtykke benyttes i nedennævnte Øjemed, naar Forstanderskabet og Skolekommissionen er enige derom og Skolerne tidligere har været i Brug.

Af Præsten til Afholdelse af gudelige Forsamlinger, af andre Præster i Folkekirken og Lægprædikanter til Bibellæsninger, Søndagsskole og gudelige Forsamlinger samt af andre end Præst og Lærer i Øjemed, der er af Betydning for Undervisningen og Opdragelsen og deslige.

Det er forbudt, at Skolerne benyttes til Vælgermøder, til Møder i politiske Foreninger, af Sekterere til deres gudelige Forsamlinger, af selskabelige Foreninger saavel til Klublokale som til Afholdelse af Baller eller offentlige Skuespil og til private Forestillinger af Dilettanter eller Prøver

paa saadanne, ligesom overhovedet enhver Benyttelse af Skolelokalerne til Møder, hvor der skal erlægges særskilt Betaling for Adgangen, er forbudt.

Hvorvidt „Frelsens Hær" kan faa Tilladelse til Afholdelse af Møder maa saaledes efter de nuværende Regler afgøres af Færø Amts Skoledirektion, naar Betingelserne iøvrigt er opfyldt.

Udvalget formener under Hensyn til det oplyste, at en Ændring i disse Regler kun kan foretages efter Forhandling med Undervisningsministeriet, og en saadan Forhandling kan ikke for Tiden finde Sted.

Da Spørgsmaalet om hvorvidt „Frelsens Hær" opfylder Betingelserne for Opnaaelse af Ret til Benyttelse af Skolelokalerne skal afgøres af Skolodirektionen, mener Udvalget, at Sagen maa henvises til Direktionens velvillige Overvejelse og Behandling.

Forslag:

Denne Sag henvises til Skoledirektionen.

6. nov. samtykt 17—0.

---

17. Hini av amtmanninum greiddu mál.

Álit (H. Justinussen óheftur):

Nevndin hevur eftirkannað tey peningamál, ið eru ávíst av amtmanninum í tíðarskeiðinum frá $^{7}/_{10}$ 1940 til $^{30}/_{9}$ 1941.

Av tí at landsnevndarinnar avgerðir ofta eru at seta í samband við ymiskar útbetalingar, hevur nevndin eisini eftirhugt avskrift av gerðabók Landsnevndarinnar og setur fram hesar viðmerkingar:

$^{11}/_{7}$ 1941 er ávíst til vøruhundilin kr. 3.773— til lækkan av prísi uppá saltpetur. Tað átti at vera ansað eftir, at hetta bíliga saltpetrið kom toluliga javnt út um landlið.

$^{5}/_{5}$ 1941 er samtykt at lata til Kolavirkið 2 kr. pr. selt tons kol, samstundis sum maksimalprísurin á koli verður avtikin. Nevndin heldur tað ikki vera rætt at avgera hesi bæði í sama syfti.

$^{21}/_{4}$ 1941 er samtykt at lata lán til kolavirkið 11.500 kr. Her verður roknað við, at nóg góð tryggjan er fyri lánið.

Viðvíkjandi tilskotinum til kolavirkið, 2 kr. pr. ton, selt kol heldur nevndin, at nú, tá ið maksimalprísir uppá kol eru avtiknir, er eingin grund til at lata hetta tilskot.

Við at vísa á tað, sum frammanundan er fært fram, setur nevndin fram hetta

Upskot:

Tingið góðkennir tær avgerðir, ið tiknar eru av amtmanninum og Landsnevndini millum tingsetturnar.

21. nov. samtykt 18—0.

---

18. Sendimenn til Íslands.

Álit:

I den ordinære Lagtingssamling i Fjor (XIV-38/1940) behandledes Problemet, hvorledes der kunde gøres alt muligt for, at Fiskerne kunde komme i Arbejde. Krigen havde medført, at det hidtil af Fiskerskibene drevne Fiskeri maatte opgives, dels da de hidtidige Markeder for Saltfisk var lukket eller paa det nærmeste lukket for os, men navnlig fordi de Farvande, hvor Fiskeriet sædvanlig plejer at foregaa, ikke mere kunde besejles paa Grund af Minefare. Det blev derfor vedtaget, at Landsnevndin skulde foranledige, at flest mulige Baadfiskere kunde komme til Island i indeværende Aars Sommer, og Landsnevndin bemyndigedes ogsaa til i dette Øjemed at yde Fiskerne fornøden Støtte og Laan, hvor dette maatte være paakrævet. Samtidig blev det vedtaget at overlade til Landsnevndin at træffe Afgørelse om Udsendelsen af en Delegation til Island for at forhandle med den islandske Regering om de Spørgsmaal, som Tiden og Omstændighederne krævede Klarhed over.

I Februar Maaned d. A. udsendtes derefter en Delegation til Island, og Beretning om denne Delegations Forhandlinger med den islandske Regering findes gengivet i Lagtingstidende for 1940, Bilag Nr. 23. Det fremgaar heraf, at der opnaaedes Tilsagn om, at Færinger og færøske Skibe i Aaret 1941 i de under Forhandlingerne berørte Spørgsmaal (Baadfiskere og Fiskerskibe) i retslig Henseende vilde blive behandlet som hidtil, og at færøske Skibe vilde faa Licens til Fiskekøb i Island i hvert Fald indtil Udgangen af April Maaned d. A. I det hele taget blev der under disse Forhandlinger fra islandsk Side udvist største Forstaaelse og Imødekommenhed, hvad Færinger ogsaa er meget taknemmelige for.

Det viste sig dog, dels paa Grund af et forholdsvis godt Hjemmefiskeri og dels af andre Grunde, at kun ganske faa Baadfiskere tog til Island

i indeværende Aar. Dertmod har saa godt som alle Skibe, der ønskede det, i den første Halvdel af Aaret faaet Licens til Fiskekøb i Island, hvilket har været fordelagtigt saavel for Færinger som for Islændere, hvilke sidste herved har været i Stand til at sælge deres Fisk i større Omfang som fersk Fisk og til gode Priser, end Tilfældet vilde have været, hvis ikke de færøske Skibe købte Fisken fra dem i Island, men denne Sejlads har ogsaa krævet store Ofre fra det færøske Samfund af saavel Mandskab som Skibe.

I Begyndelsen af August Maaned d. A. blev der mellem Island og England oprettet en Overenskomst om Salg og Transport af Fisk fra Island til England, og herunder er det fastsat, at der fra den 5. August d. A. kun kan gives Licens til 30 færøske Fiskerslupper til Køb af Fisk i Island til Viderosalg i England.

Den 17. Maj d. A. ophævede Island den med Danmark gældende Union, og samtidig valgte Island sit eget Statsoverhoved.

Hvad Fiskeriet angaar har Færinger altsaa faaet Tilsagn til Udgangen af dette Aar at blive behandlet som hidtil i retslig Henseende. Udvalget kan ikke se rettere, end at den dansk-islandske Forbundslov (Lov Nr. 619 af 30. November 1918) efter Indholdet af Lovens § 18 sikrer færøske Erhvervsinteresser og andre færøske Interesser i Island samme retslige Stilling som hidtil, i hvert Fald indtil Udgangen af Aaret 1943. Den islandske Vedtagelse af 17. Maj d. A. ses ikke at kunne medføre nogen Ændring deri.

Hvis Situationen skulde udvikle sig i den Retning, at Forhandling med den islandske Regering er nødvendig vedrørende færøske Erhvervsspørgsmaal m. v., anser Udvalget det for nødvendigt, at den danske Gesandt i Reykjavik under saadan Forhandling bistaas af særlig eller særlige færøske sagkyndige.

Da Fiskeriet ved Island under normale Forhold har været af største Livsvigtighed for os Færinger, og Opkøb af Fisk i Island til Viderosalg i England i det foregaaende og indeværende Aar ogsaa har haft sin store Betydning for de færøske Skibe, er det af største Vigtighed, at der snarest muligt foreligger en Bekræftelse af, at Udvalgets Opfattelse af Færøernes Rettigheder overfor Island er rigtig. Udvalget er ogsaa overbevist om, at det gode Forhold, som altid har hersket mellem Island og Færøerne, stadig vil komme til at bestaa i Fremtiden.

Forslag:

1) Amtmanden anmodes om telegrafisk gennem den danske Gesandt i Reykjavik at forelægge den islandske Regering Lagtingets Anskuelse, at færøske Erhvervsrettigheder og Færingers retslige Stilling i Island — uanset Altingsresolutionen af 17. Maj 1941 — opretholdes uændret i Henhold til Forbundsloven i hvert Fald indtil Udgangen af Aaret 1943, og Gesandten anmodes samtidig om snarest muligt telegrafisk at afgive Svar herpaa.
2) Skulde Forholdene udvikle sig i den Retning, at Forhandling med den islandske Regering er paakrævet vedrørende færøske Erhvervsspørgsmaal el. lign., bemyndiges Landsnevndin til at vælge en eller flere Personer, der kan yde den danske Gesandt i Reykjavik fornøden sagkyndig Bistand under saadan Forhandling. De heraf opstaaende Udgifter dækkes af Amtsfonden.

Broytingaruppskot frá R. Rasmusseu:

Løgtingsformaðurin verður biðin um tingsins vegna at seta fram fyrispurning fyri íslendska ríkisstýrið um føroysku vinnu- og tignrættindi í Íslandt (smbr. íslandsk-føroyskan sáttmála av nov. 1941) sum haldast óbroytt, so leingi kríggið varar.

23. okt. fall broytingaruppskotið 5—0 og nevndaruppskotið samtykt 17—0.

Forslag til Beslutning.

Efter at Lagtinget er gjort bekendt med den islandske Regerings Standpunkt med Hensyn til Spørgsmaalet om færøske Erhvervsrettigheder og Færingers retslige Stilling i Island, udtales,

at Lagtinget forstaar den islandske Regerings Standpunkt saaledes, at færøske Erhvervsrettigheder og Færingers retslige Stilling i Island for Aaret 1942 vil blive uændret som efter Forbundsloven,

at Lagtinget uden at ændre sit principielle Standpunkt, hvorefter Forbundsloven ikke hjemler en Ændring i de gensidige Rettigheder og Pligter før efter Udgangen af 1943, for sit Vedkommende kan akviescere ved, at denne retlige Stilling fastslaas foreløbig for Aaret 1942, og

at Lagtinget gaar ud fra, at man for Tiden efter 1942 vil kunne opretholde den nuværende og nu for Aaret 1942 fastslaaede Stilling.

Uppskot samtykt 22. nov. við 17—0.

---

19. Skjótan av spreingiknøttum.

Álit:

Der henvises til Lagtingssag Nr. XIV-34/1940, som omhandler den Fare, løsrevne Miner betyder for mange Pladser her paa Øerne. Det tiltraadtes, at en Cirkulæreskrivelse herom udsendtes af Amtet til Thorshavn Byraad og samtlige Forstanderskaber, ligesom Lagtinget af Amtsfonden bevilgede indtil 10.000 Kr. til de i Cirkulæreskrivelsen omhandlede Foranstaltninger.

Færø Amts Sparekasse	25.060,90
Eftirstøður	1.045,27
Kontant	5,00
	26.111,17

Landsbókasavnið.

Inntøkur:

	Kr. øyr.
Grunnurin 1. april 1940	12,67
Ríkisstudningur	8.000,00
Løgtingið	5.060,00
Tórshavnar kommuna	1.955,00
Ymist	47,92
	15.075,59

Útreiðslur:

		kr. øyr.
Løn		8.580,00
Ljós og hiti		1.527,91
Bókakeyp og innbinding		1.746,70
Rentur og avborgan		935,00
Útreiðslur til telefon, skatt og trygging		643,35
Umvælan		456,92
Reingeran, porto, frakt o. t.		971,80
Grunnurin 31. mars 1941:	Kr. øyr.	
Sjóvinnubankin	208,08	
Kassapeningur	5,83	
		213,91
		15.075,59

Skjalasavnið.

Inntøkur:

	Kr. oyr.
Grunnurin 1. april 1940	164,29
Ríkisstudningur	1.850,00
Løgtingsstudningur	2.675,00
	4.689,29

Útreiðslur:

	Kr. oyr.
Løn	3.900,00
Ljós og hiti	302,15
Rentur og avborgan	165,00
Umvølingar, innbindingar o. t.	150,84
Telefon, frakt og reingeran	55,10
Ymist	34,10
Grunnurin 31. mars 1941	82,10
	4.689,29

Kavarabúnin.

	Kr. oyr.
Grunnurin 31. desember 1940:	
Amtsfondin	1.040,80

«Hansenske Legat».

	Kr. oyr.
Grunnurin 31. mars 1941	343,82

«Fonden for forulykkedes efterladte».

	Kr. oyr.
Grunnurin 31. desember 1940	29.705,82

Grindagarnið i Vestmanna.

	Kr. oyr.
Grunnurin 31. desember 1940: Amtsfondin	49,45

Dr. phil. Jakob Jakobsens Legat.

Grunnurin 31. mars 1941	8.169,23

Yvirlit pr. 31. desember 1940.

Ogn:	Kr. oyr.	Kr. oyr.
1. Telefonverkið (bókført til kr. 1.123,200,00)		500.000,00
2. Hús:		
Bróstsjúkrahúsini við innbúgvi	200.000,00	
Læknahúsini í Hoydølum	25.000,00	
Løgtingshúsið	20.000,00	
Skansahúsið	8.000,00	
Realskúlin	75.000,00	
Bókasavnið	70.000,00	
Farsóttarhúsið	12.000,00	
		410.000,00
3. «Smiril» 250.000 kr., «Viðanes» 40.000 kr.		290.000,00
4. Lutabrøv í Skipafelagnum og Sjóvinnubankanum		130.000,00
5. Kassapeningur, eftirstøður og fyriframgreiðslur o. a.:		
	Kr. oyr.	
a. Amtsgrunnurin	635.596,86	
b. Økonomiski grunnurin	32.358,88	
c. Fátækragrunnurin	75.990,72	
d. Kirkjugrunnurin	15.630,80	
e. Telefonverkið	220.653,97	
f. Bróstsjúkrahúsini	19.906,67	
g. Skúlagrunnurin	45.331,74	
h. Landsbókasavnið og skjalasavnið	296,01	
i. «Smiril»	4.132,85	
k. Studentaskeiðið	2.770,00	
l. Grindagarnið og kavarabúnin	1.090,25	
		1.053.758,75
		2.383.758,75

Skuld:	Kr. oyr.
A. Amtsgrunnurin	800.916,57
B. Kirkjugrunnurin	6.885,98
C. Telefonverkið	24.253,91
D. Bróstsjúkrahúsini	37.203,87
E. Økonomiski grunnurin og studentaskeiðið	6.811,59
F. «Smiril»	39.607,92
	915.679,84
Munur	1.468.078,91
	2.383.758,75

Kirkjurnar, eftirlønargrunnur lærara og einstakir aðrir serstakir grunnur eru ikki roknaðir uppí, eins og skuldin til ríkiskassan viðvíkjandi vørukeypi og ognir vøruhandilsins ikki eru tiknar við.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils.

UPPSKOT

TIL

FÍGGJARSAMTYKT

FYRI

AMTSGRUNNIN

1942

(LAGT FYRI LØGTINGIÐ 1941)

Amts

Inntøkur:

	1939	1940	1942
	Kr. oyr.	Kr. oyr.	Kr. oyr.
1. Jarðaskattur	8.500,00	10.200,00	8.500,00
2. Løgtingsskattur	48.900,00	232.500,00	600.000,00
3. Tollur	409.000,00	377.992,17	500.000,00
4. Ríkisstudningur til vegir	61.600,00	43.987,50	100.000,00
5. Skipagjald	10.500,00	4.800,00	5.000,00
6. Handilsloyvir	1.450,00	1.050,00	1.000,00
7. Vinningsbýti		10.000,00	6.000,00
8. Ríkisstudningur	3.000,00	3.000,00	3.000,00
9. Stuttleikaskattur			15.000,00
10. Áliknað kommununum	120.000,00	100.000,00	50.000,00
			1.288.500,00

grunnurin.

Útreiðslur:

		1939	1940	1942
A.	Løgtingskostnaður:	Kr. øyr.	Kr. øyr.	Kr. øyr.
	1. Tingmannaløn etc.	29.000,00	43.400,00	40.000,00
	2. Prentan o. t.	8.600,00	9.200,00	10.000,00
	3. Løgtingshúsið	3.400,00	7.400,00	4.000,00
	4. Skrivstovan	13.200,00	15.300,00	18.000,00
B.	Dóms- og lógreglumál	10.000,00	5.300,00	10.000,00
C.	Valum viðvíkjandi	2.500,00	1.900,00	2.000,00
D.	Sjúkrahús, læknar o. t.:			
	1. Sjúkrahúsini	66.300,00	130.000,00	175.000,00
	2. Bróstsjúkrahúsið	19.300,00	22.700,00	50.000,00
	3. «Naina»	1.000,00	1.000,00	1.000,00
	4. Farsóttir	7.000,00	5.600,00	7.000,00
	5. Ljósmøður	2.100,00	2.300,00	4.500,00
	6. Læknar	4.400,00	5.200,00	5.000,00
	7. Karanteneútreiðslur		150,00	1.000,00
	8. Annað	4.300,00	4.200,00	4.500,00
E.	Ferðaútreiðslur sýslumanna	1.400,00	1.600,00	2.000,00
F.	Skúla- og mentunarmál:			
	1. Læraraløntir		109.000,00	110.000,00
	2. Studningur til skúlabørn	1.400,00	1.400,00	1.400,00
	3. — » amtsbókasavnið	4.400,00	4.900,00	5.060,00
	4. Ferðaútreiðslur skúlabarna		600,00	600,00
	5. Annað	2.300,00	2.000,00	2.000,00
	6. Studningur til læraraskúlanæmingar			1.000,00
G.	Landbúnaðurin:			
	1. Jarðagrunnurin	10.000,00	10.000,00	10.000,00
	2. Búnaðarnevndir	1.900,00	2.250,00	2.500,00
	3. Annað	1.000,00	1.000,00	1.000,00
H.	Fiskivinna	5.000,00	15.000,00	5.000,00
I.	Løgtingsverkfræðingurin	8.000,00	5.500,00	10.000,00
K.	Djóralæknin	2.600,00	2.200,00	2.600,00
L.	Garanti havnalán		1.600,00	12.000,00
M.	«Smiril»	40.400,00	71.400,00	70.000,00
N.	Vegir og havnir	305.600,00	176.400,00	300.000,00
O.	Vegfondin		10.000,00	10.000,00
P.	Einkjubørn		16.500,00	20.000,00
Q.	Til grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn			10.000,00
R.	Ymist	7.500,00	7.000,00	10.000,00
S.	Landsnevndin til uppdyrkingararbeiði			25.000,00
T.	Landsnevndin til ymisk yrkismál			10.000,00
U.	Til socialhjálp			100.000,00
V.	Rentur	36.500,00	30.800,00	30.000,00
X.	Kreppufyriskipanir (prískontrol, spreingiknøttar o. t.)		10.700,00	25.000,00
Y.	Til økonomiska grunn			50.000,00
Z.	» kirkjugrunu			20.000,00
Æ.	Ítmleikagrunnur Føroya			2.000,00
Ø.	Dýrtíðartillegg til ellisrentunjótarar o. a.			70.000,00
				1.249.160,00
	Munur			39.340,00
				1.288.500,00

Ad. *Inntøkurnar.*

Løgtingsskatturin er ætlaður til 600.000 kr. og tollurin til 500.000 kr. eftir núgaldandi satsum.

Ad. *Útreiðslurnar.*

Bróstsjúkrahúsið 50.000 kr. er ætlað og bróstsjúkrahúsnevndin vil seta fram nærri uppskot.

Ljósmøður 4.500 kr., harav dýrtíðartillegg (tingsins partur 2.000 kr.).

Einkjubørn 20.000 kr. Spurningurin um revisión av lógini er lagdur fyri tingið og studningurin verður at bækka samsvarandi møguligar broytingar.

Tórshavn, august 1941.

Landsnevndin.

UPPSKOT

TIL

FÍGGJARSAMTYKT

FYRI

ØKONOMISKA GRUNN LØGTINGSINS 1942

(LAGT FYRI LØGTINGIÐ 1941)

Skjal nr. 2 — 1941.

Økonomiski

Inntøkur:	Kr. øyr.
1. Grind	500,00
2. Stórhvalaveiða	0,00
3. Av innfluttningsgjaldi	50.000,00
Munur	75,00
	50.575,00

grunnurin.

Útreiðslur:	Kr. oyr.	Kr. oyr.
A. Brýr og lendingar		10.000,00
B. Skúlamál:		
1. Eftirlønargrunnur lærara	2.000,00	
2. Studentaskeiðið	15.000,00	
3. Skúlabókagrunnurin (5. studningur av fimm-ára játtan)	500,00	
4. Føroya Fólkaháskúli	3.000,00	
5. Læratanámskeið	500,00	
6. Studningur til bygdanæmingar á studenta- og preliminerskeiðinum	5.000,00	
		26.000,00
C. Vísindi, bókmentir o. t.:		
1. J. H. O. Djurhuus	500,00	
2. Varðin	1.000,00	
3. Føroya Forngripafelag	300,00	
4. Skjalasavnið	2.675,00	
5. «Føroya kvæði» (5. studningur av 9-ára játtan)	1.000,00	
6. Studningur til studerandi	1.500,00	
7. Til mentunargrunn	500,00	
		7.475,00
D. Ymist:		
1. Eftirløn til frk. Berg	1.400,00	
2. Honorar til frk. Bærentsen	200,00	
3. Fráhaldsfeløgini	500,00	
4. Barnaheimið	1.000,00	
5. Felagið «Røde Kors»	500,00	
6. Roynd við træplanting	1.000,00	
7. Studningur til handverkarar og jarðabrúkarar at læra og handilsskúlanæmingar	2.000,00	
8. Ítróttasamband Føroya	500,00	
		7.100,00
		50.575,00

Landsnevndin fær heimild at veita dýrtíðartillegg til skjalasavnið eftir somu reglum, sum eru galdandi fyr tænastumenn løgtingsins.

Tórshavn, 18. august 1941.

Landsnevndin.

UPPSKOT

til

fíggjarsamtykt fyri Fátækragrunn Løgtingsins 1942.

Inntøkur:

	Kr. oyr.
1. Stórhvalagjald	0,00
2. Arvagjald	6.000,00
3. Gjøld fyri handilsloyvi	1.000,00
4. Sektir	1.000,00
	8.000,00

Útreiðslur:

	Kr. oyr.
A. Alimentatiónspeningur o. t.	2.000,00
B. Studningur til søknirnar	6.000,00
	8.000,00

Tórshavn, august 1941.

Landsnevndin.

UPPSKOT

til

figgjarsamtykt fyri Kirkjugrunn Løgtingsins 1942.

Inntøkur:

	Kr. oyr.
1. Endurgjald fyri tíggjunda	7.800,00
2. Av innfluttningsgjaldi	20.000,00
3. Stórhvalagjald	0,00
	27.800,00

Útreiðslur:

	Kr. oyr.
A. Vanligar umvølingar	10.000,00
B. Kirkjugarðar	5.000,00
C. Prestafluttningur	2.400,00
D. Ymist	1.000,00
E. Rentur og avdráttur av láni til Hvalbiar kirkju	700,00
Munur	8.700,00
	27.800,00

Tingið hevur játtað til at klæða kirkjuna í Klakksvík við jarni 1500 kr.

Í 1939 er játtað til kirkju í Hovi 8.000 kr., harav er goldið 5132 kr. 98 oyr., og í 1940 játtað eykastudning 2000 kr.

Eftir løgtingssamtykt 1940 veitir grunnurin sum fyribils lán til trúboðarar 7200 kr.

Tórshavn, august 1941.

Landsnevndin.

Beretning

om

Færø Amts Tuberkulosesygehus' og Færøernes Tuberkulosestations Virksomhed

i Regnskabsaaret 1. Januar 1940 til 31. December 1940.

Ved Overlæge *Vilh. Magnussen.*

Ved Regnskabsaarets Begyndelse henlaa paa Sygehuset....	51	Patienter
I Aarets Løb indlagdes	64	—
I Aarets Løb udskreves	66	—
Tilbage ved Aarets Slutning	49	—

De 66 Patienter fordeler sig saaledes:

1) Efter Hjemsted:

Akrar	1	Oyrabakki	1
Eiði	4	Porkeri	1
Gjógv	2	Rituvík	1
Haldórsvík	1	Skopun	1
Hósvík	1	Skúvoy	5
Húsavík	1	Strendur	1
Kirkja	2	Sunnbøur	1
Klakksvík	5	Syðragøta	1
Kollafjørður	1	Sørvágur	5
Kunoy	2	Toftir	1
Lambi	1	Tórshavn	9
Lopra	1	Tvøroyri	1
Miðvágur	4	Vágur	2
Mikines	2	Vestmanna	4
Oyndarfjørður	1	Viðareiði	3

2) Efter Alder:

Fra 5 Aar til 9 Aar	1	Patienter
— 10 — » 14 —	6	—
— 15 — » 19 —	11	—
— 20 — » 24 —	14	—
— 25 — » 29 —	13	—
— 30 — » 39 —	11	—
— 40 — » 49 —	7	—
— 50 — » 59 —	2	—
— 60 — » 69 —	1	—

3) Efter Køn: Mandlige ..... 41 Patienter
Kvindelige ..... 25 —

Diagnoser:

Aaben Tub. pulm.	40	Patienter
	TB i Ventrikelskyllevandet	2	—
Lukket, aktiv Tub. pulm.	15	—
Inaktiv Tub. pulm.	1	—
Pleuritis exsudativa	15	—

Komplikationer:

Achylia gastrica	5	Nefritis chron.	1
Anæmia	2	Panaritium	1
Ascites	1	Pleuritis exsudativa	5
Cancer abdominis	1	Salpingitis tub.	1
Enteritis tub.	4	Spondylitis tub.	1
Glukosuria	1	Tub. manus	1
Hernia inguinalis	1	Tub. urogenitalis	1
Hæmoptysis	6	Ulcus cruris	1
Laryngitis tub.	7		

Resultater:

Tilsyneladende helbredet	7	Uforandret	6
Betydeligt bedret	21	Forværret	2
Bedret	18	Døde	12

Særlige Behandlingsmaader:

Pneumothorax artificialis er anlagt og videreført hos 15 af de udskrevne Patienter.

22 Patienter er behandlet ambulant med Pneumothorax.

Der er givet Lysbehandling til 7 Patienter.

2 af de udskrevne Patienter er behandlet med Thoracoplastik.

Overflyttede Patienter:

Til Dronning Alexandrines Hospital overflyttedes 4 Patienter.

Til dette Hospitals Tuberkuloseafdeling overflyttedes 3 Patienter.

Der er foretaget 128 Røntgenfotograferinger og 777 Røntgengennemlysninger. (Tuberkulosestationen ikke medregnet.)

Færøernes Tuberkulosestation 1940.

Arbejdet ved Tuberkulosestationen er i Aar faldet i 2 Dele, nemlig
1) de daglige Konsultationer ligesom tidligere Aar og
2) Undersøgelser af Fiskerne.

Ved de daglige Konsultationer ved Tuberkulosestationen undersøgtes 367 ikke tidligere undersøgte Personer.
Disse fordeler sig saaledes:

Mænd: 116. Kvinder: 180. Børn: 71.

Diagnoser:

Aaben Tub. pulm.	10	Primærkompleks (forkalket)	3
Lukket, aktiv Tub. pulm.	22		
Tub. pulm. inactiva	16	Bronchitis	14
Pleuritis exsudativa	16	Infiltratio pulm. non tub.	1
Adenitis bronchiale tub.	21	Pleuritis exsudativa non tub.	1
Erythema nodosum	1	Empyem. pleuræ sequel	1
Conjunctivitis phlyctænularis	1	Asthma bronchiale	1
Pleurit. exsud. sequel	19	Ingen Forandringer	377

Af disse 367 Personer indlagdes de 33 paa Sanatorium eller Hospital.

Undersøgelse af Fiskerne.

Loven om tvungen Undersøgelse af Fiskerne med Henblik paa Tuberkulose er fra Nov. 1939. Der blev straks sat i Gang Tuberkulinundersøgelser paa Bygderne for at faa saa mange Fiskere tuberkulinprøvet som muligt, inden de egentlige Undersøgelser begyndte i Foraaret 1940. Tuberkulinundersøgelserne stod paa i December 1939 til April 1940. Enkelte Bygder blev ikke undersøgt. Tuberkulinundersøgelserne var frivillige. En Del Fiskere gav ikke Møde, da de allerede var taget paa Vinterfiskeri med Trawlerne.

Den egentlige Undersøgelse foregik i Foraaret og Sommeren 1940. Undersøgelserne foretoges ved Tuberkulosestationen ved Sanatoriet og bestod i Røntgengennemlysning med Blodsænkningsprøve, evt. Fotografering og Stethoskopi. De fleste Undersøgelser fandt Sted fra Midten

af April til Midten af Juni Maaned. Undersøgelserne gik glat uden Ventetid for Skibene. Det største Antal Undersøgelser paa en Dag var 180.

Der undersøgtes ialt 3267 færøske Fiskere samt 50 norske Sømænd.

Resultater af Tuberkulinundersøgelserne.

Af de de 3267 Fiskere var de 2895 (= 88,6 %) tuberkulinprøvet.
Af de de 2895 Fiskere var de 1533 (= 53 %) tuberkulinpositive.

Aldersfordelingen var følgende:

Alder	positive	negative	ikke tuberkulinprøvet
Under 15 Aar	2	16	1
15—19 »	111 (= 21,1 %)	415	19
20—24 »	261 (= 43,8 %)	335	57
25—29 »	280 (= 54,2 %)	237	57
30—34 »	241 (= 61,5 %)	151	48
35—39 »	195 (= 70,1 %)	83	52
40—44 »	196 (= 80 %)	49	44
45—49 »	112 (= 78,9 %)	30	34
50—54 »	73 (= 81,1 %)	17	22
55—59 »	42 (= 62,7 %)	25	18
60—64 »	19	4	14
65—69 »			6
70—74 »	1		

Resultaterne af den egentlige Undersøgelse.

Diagnoser.

Aaben Tub. pulm.	8	Empyem. pleuræ sequel	2
Lukket, aktiv Tub. pulm.	5	Morbus cordis	1
Inaktiv Tub. pulm.	34	Infiltratio pulmonis non tub.	2
Pleuritis exsudativa	3	Corpora aliena pulmonis (Hagl)	1
Pleurit. exsudativ. sequel	112	Ingen Forandring	3049
Primærkompleks (forkalket)	54		

Hos de 6 af Patienterne med aaben Tub. pulm. paavistes TB i Expectoratet ved direkte Mikroskopi ved første Undersøgelse af Expectoratet, hos de 2 andre paavistes TB først senere under Sanatorieopholdet, ogsaa ved direkte Mikroskopi af Expectoratet. Den ene af disse havde tillige exsudativ Pleuritis. Disse 8 Fiskere var med 8 forskellige Skibe. De blev alle indlagt paa Tuberkuloseanstalt straks. Foruden disse 8 Fiskere tilbageholdtes 6 andre med saa svære Infiltrationer i Lungerne, at man kunde vente, at de blev aabne i Løbet af Sæsonen. 3 af disse var kontrolleret ved Tuberkulosestationen tidligere og havde nu friske Infiltrationer i Lungerne.

Af 3267 Fiskere viste det sig, at 1043 var undersøgt tidligere ved Tuberkulosestationen.

Samlet Oversigt.

Antal Konsultationer	4551	
Antal Røntgengennemlysng.	4551	
Antal Røntgenfotograferinger	59	
Antal Blodsænkninger	4419	
Antal Expectoratundersøgelser	81	Af disse indeholdt de 11 TB.

22 Patienter behandledes ambulant med Pneumothorax.

For Dyrlægen undersøgtes en Del Mælkeprøver for TB, alle negative.

Udgifterne ved Fotografering afholdtes af «Føroya felag móti tuberklasjúku».

Der er i 1940 døde 24 Personer af Tuberkulose, heraf er 20 døde af Lungetuberkulose, 4 af extrapulmonal Tuberkulose.

Der er i 1940 anmeldt 32 nye Tilfælde af aaben Lungetuberkulose og 55 Tilfælde af lukket Tuberkulose.

Økonomisk Oversigt

ved Lagtingskontoret.

Sygedagenes samlede Antal har i Aarets Løb været 20529.
Aarets Middelbelægning har været 56,09.
Overbelægning 1497 Dage.

Regnskab for Driften 1940.

Indtægt:

	1939 Kr. Ø.	Budget 1940 Kr. Ø.	1940 Kr. Ø.
A. Betaling for Patienter	19.658,00	20.440,00	20,529,00
B. Statskassens Tilskud	56.940,00	56.940,00	56.797,00
C. Have, Anlæg og Husdyr		2.000,00	2.934,15
D. Ambulante Røntgenfotograferinger	385,00	700,00	310,00
E. Refusioner af Begravelsesudgifter	713,00		892,50
F. Forskellige Indtægter	213,46		445,50
G. Underskud	21.183,42	18.040,00	35.464,31
	99.092,88	98.120,00	117.372,46

Udgift:

	1939 Kr. Ø.	Budget 1940 Kr. Ø.	1940 Kr. Ø.
1. Lønninger	18.647,86	20.120,00	21.195,11
2. Forplejningen	40.831,74	40.000,00	51.850,80
3. Brændsel og Belysning	19.258,79	16.000,00	22.781,57
4. Have og Husdyr	+ 203,30	1.600,00	1.393,43
5. Medicin	3.106,83	3.400,00	2.973,33
6. Bygninger	4.015,12	6.000,00	6.373,02
7. Inventar og Maskiner	4.192,52	2.200,00	3.396,86
8. Ambulant Røntgen	996,27	1.500,00	380,00
9. Vask og Rengøring	3.687,07	3.700,00	3.526,23
10. Forsikring og Afgifter	1.190,50	1.300,00	1.012,01
11. Kontorhold	1.028,12	1.000,00	841,27
12. Losning og Kørsel	714,98	500,00	686,25
13. Forskellige Udgifter	1.626,38	800,00	962,58
	99.092,88	98.120,00	117.372,46

Beholdning og Gæld.

		31. Dec. 1939 Kr. Ø.	31. Dec. 1940 Kr. Ø.
Beholdning:	1. Restancer for Patienter	16.730,72	18.891,42
	— „ amb. Røntgen	50,00	90,00
	— „ Begravelsesomk.	694,25	925,25
	2. Statskas. Tilskud for Okt. Kv.	14.352,00	
		31.826,97	19.906,67
Gæld:	Til Færø Amts Repartitionsfond	34.843,28	37.203,87

Bemærkninger ad Udgiftskonti.

ad Konto 1. Lønninger:

Løn til 1 Overlæge	3.816,66
— „ 1 Reservelæge	2.000,00
— „ 1 Oversygeplejerske	1.899,49
„ „ 2 Sygeplejersker	3.355,90
— „ 1 Økonoma	1.710,00
— „ 1 Portør	2.493,32
— „ 1 Inspektør	150,00
Pigelønninger og Medhjælp	3.148,00
Afløsning (Ferie og Sygdom)	1.079,04
Befordringsgodtgørelse til Reservelægen	100,00
Sanatoriets Bidrag til Pensionsfonden	712,50
Revision	120,00
Forskelligt	610,20
	21.195,11

ad Konto 2. Forplejningen:

Udgiften har været	51.850,80

Forplejningen har kostet Kr. 2,53 pr. Sygedag (sidste Aar Kr. 2,08)
— „ — Kr. 2,08 pr. Kostdag (sidste Aar Kr. 1,70)

ad Konto 3. Brændsel og Belysning:

206890 kg Kul	12.072,45
1642 hl Cokes	6.916,80
Elektricitet til Belysning	1.433,08
— „ teknisk Brug	161,46
Forskelligt	2.197,78
	22.781,57

ad Konto 7. Inventar:

Nyanskaffelser	3.099,26
Reparationer	297,60
	3.396,86

ad Konto 9. Vask og Rengøring:

Sæbe, Soda, Skurepulver m. m.	1.726,23
Vask af Tøj	1.800,00
	3.526,23

ad Konto 10. Forsikring og Afgifter:

Brandforsikring	890,01
Ulykkesforsikring	122,00
	1.012,01

ad Konto 11. Kontorhold:

Annoncer, Kontorrekvisitter m. m.	140,94
Telefonsamtaler og Telegrammer	69,23
Telefonabonnement	631,10
	841,27

Til de øvrige Konti ingen Bemærkning.

H. M. JACOBSENS BOGTRYKKERI
ACCIDENSTRYKKERI, THORSHAVN

Frágreiðsla

um

raksturin av telefonverki Føroya Løgtings fyri árið 1940.

1. Ymisk brek.

a. *Landlinjurnar.*

Klaki gjørdi nakað brot á linjur í Suðuroy og Sandoy 14.--15. mars 1940. Fyrri partur av vetrinum 1940—41 út móti hálvum januar var kavaleysur. Um miðjan mánaðin legðist nógvur kavi, og var seinni parturin av vetrinum ógvuliga kavamikil, men maksamur. Veðurlagið gjørdi í mínsta lagi skaða á linjurnar á hesum vetri.

b. *Sjókaðalarnir.*

Av tí at tann sjókaðal, sum keypslag var gjørt um, og sum ætlaður var at koma higar í januar, ikki var liðugur at senda frá Store Nordiske Kabel- og Traadfabriker, København, innan 9. apríl 1940, var ikki hugsingur um at fara undir at fáa kaðalsambandið við Hest og Sandoy aftur í lag. Størsti partur av tí o. u. 2 km langa afturgjørda kaðalinum gekk til ábót á syðra kaðalin í Kallsoyarfirði og norðara kaðalin í Vestmannasundi, so vit nú hava eftirliggjandi bert o. u. 600 m einlinjaðan og o. u. 800 m tvílinjaðan kaðal, og er tað heldur hættisligt at fara undir vetur við so litlum sjókaðali á goymslu.

2. Høvuðseftirsýni.

Høvuðseftirsýni av linjunum fór fram ymsar staðir, m. a. í Suðuroy, Sandoy og norðari parti av Streymoy.

Tilfar mátti nú verða spart mest gjørligt, av tí at trupult kundi væntast at verða at fáa úr Onglandi.

3. Nýbygging.

Nýggj linja var gjørd millum Miðvágs og Sørvágs. Millum Sandavágs og Sørvágs eru nú tvær linjur.

Eisini skal verða skilað til, at telefonverkið í januar—februar 1941 hevur lagt nýggja linju frá Tórshavn yvir Strendur til Toftir, sum einans steudur til nýtslu fyri bretsku hermaktina. Linjan er førd fram við douplering av sjókaðalum. Í apríl mánað 1941 fekk Kallsoy egna linju til Klakksvíkar eisini við douplering.

Tær nýggju telefonirnar, bretska hermaktin hevur fingið, hava kravt størsta partin av tí tilfarið, vit høvdu á goymslu, av okkum.

4. Støðir, telefonfelagar og telefonlinjur.

Um áramótið 1940--41 hevði telefonverkið 99 listaførandi støðir. Av ikki listaførandi støðum vóru 4 [Gjógvin, Hattavik, Skælingur og Syðradalur (S)], og umframt vóru 4 samtalustøðir (Kalbaksbotnur, Nesvík, Saltnes og Kolbeinagjógv). Av støðum, sum bert vóru radiostøðir, vóru við árs enda 5 (Fugloy, Nólsoy, Skúvoy, Hestur og Koltur). Umframt var radiostøð á Viðareiði, í Tórshavn, í Skopun og á Sandi, harumframt Dímun, sum er at rokna sum telefonfelagi av Sandi. Telefonstøðin í Tórshavn hevur eisini radiosamband við vitarnar á Mykinesi og Borðuni, sum annars verða roknaðir til telefonstøðir (í Mykinesi tó sjálv bygdin gjøgnum linju).

Við árs byrjan vóru 801 telefonfelagar við 970 apparatum og við árs enda 895 telefonfelagar við 1087 apparatum, 118 telefonfelagar vóru komnir aftrat og 24 fráfarnir.

Talið av telefonfeløgum við árs enda soleiðis sundurbýtt støðanna millum:

Ánirnar	1	Leynar	1	Skáli	3
Árnafjørður	1	Lopra	1	Skopun	2
Bøur	2	Lorvík	3	Strendur	15
Eiði	7	Miðvágur	12	Streymnes	1
Fámjin	1	Nes	1	Stykkið	1
Froðbøur	1	Norðdepil	1	Sunnbøur	3
Fuglafjørður	24	Norðradalur	3	Svínoy	2
Gjógv	2	Norðragøta	1	Syðradalur (K)	1
Haldórsvík	4	Norðskáli	1	Syðrugøta	9
Hósvík	1	Oyndarfjørður	2	Søldarfjørður	2
Hov	2	Oyrareingir	2	Sørvágur	14
Húsavík	1	Oyri	1	Todnes	5
Hvalbøur	7	Porkeri	3	Toftir	12
Hvalvík	2	Rituvík	2	Tórshavn	430
Hvannasund	1	Saltangará	7	Tvøroyri	76
Kaldbak	2	Sandavágur	6	Vágur	57
Kirkjubøur	2	Sandur	12	Velbastaður	1
Klakksvík	96	Selatrað	1	Vestmanna	28
Kvívík	6	Signabøur	1	Viðaraiði	5
Lambi	1	Skálavík	3		

Longdin av telefonlinjum var:

Linjur millum bygda:	570,0 km	tvíleiðara landlinjur.
	128,5 km	einleiðara landlinjur.
	32,9 km	tvíleiðara sjókaðal.
	4,9 km	einleiðara sjókaðal.
Innanbýggjalinjur:	320,0 km	tvíleiðara luftlinjur.
	290,0 km	tvíleiðara jarðkaðal.

5. Raksturin.

Inntøkan av telefonfelagagjaldi hevur verið kr. 68.744,00 móti kr. 64.167,00 í 1939. Tað er ein framgongd uppá kr. 4.577,00 móti eini framgongd uppá kr. 2.757,00 frá 1938 til 1939.

Tað eru førdar 233,190 gjaldsamtalur móti 204,800 í 1939. Tað er ein framgongd uppá 28,390.

Inntøkan av samtalum hevur verið kr. 102.470,00 móti kr. 86.290,00 í 1939 ella ein framgongd uppá kr. 16.180,00. Meðalinntøksn av hvørji samtalu hevur verið o. u. 43,9 oyru móti 42,2 oyru í 1939.

Í árinum 1940 eru send 14512 telefontelegramm móti 11272 í 1939. Tað er ein framgongd uppá 3240.

Inntøkan av telefontelegrammum var kr. 17.347,00 móti kr. 12.624,00 í 1939. Tað er ein framgongd uppá kr. 4.723,00 móti kr. 980 frá 1938 til 1939. Meðalinntøkan av hvørjum telegrammi var 120 oyru móti 112 oyrum í 1939.

Inntøkan av telegrammum var kr. 8.035,00 móti kr. 7.583,00 í 1939. Tað er ein framgongd uppá kr. 452,00 móti kr. 942,00 frá 1938 til 1939.

Ymsar inntøkur eru kr. 8.586,00 móti kr. 9.823,00 í 1939. Tað er ein afturgongd uppá kr. 1237,00 móti eini afturgongd uppá kr. 5.288,00 frá 1938 til 1939.

Øll ársinntøkan í 1940 er kr. 227.833,59 móti kr. 199.428,84 í 1939, t. v. s. hon er vaksin við o. u. 14,2 %.

Útreiðslurnar í 1940 eru:

Rakstrarútreiðslur (stjórnarútreiðslur, rakstur støðanna, umvøling, ymsar útreiðslur og ótøkar eftirstøður	kr. 160.034,78
Renta og avdráttur	— 23.337,63
	kr. 183.372,41
Nýbygging	— 2.903,81
	kr. 186.276,22

Ágóðin á roknskapinum er so statt kr. 41.557,00. Hetta er tað talið, verksins peningaognir eru vaksnar við í 1940. Taka vit nýbyggingarútreiðslurnar frá, skuldi raksturin hava givið ágóðan kr. 44.461,00.

Av tí at verkið ikki hevur fingið keypt tað tilfar, tað hevur ynskt at keypa í 1940, er alt telefontilfar minkað nógv á verksins goymslum í hesum ári, og vísir peningaágóðin ein ovgóðan figgjarstand, av tí at goymsluvørurnar ikki eru roknaðar uppí hvørki nú ella frammanundan.

Verksins lánskuld var við árs byrjan kr. 13.243,88 og við árs enda kr. 0,00. Verkið hevur hildið tað vera rættast at kvitta alla lánskuld beinan vegiu, hóast lántreytirnar ikki áløgdu tað.

Verksins útreiðslur verða skjótt vaksandi við tað at bæði tilfarsprísir og lønir eru gingin nógv upp. Tá nóg mikið tilfar fæst aftur, vil t. d. keyp av sjókaðali kosta nógvan pening.

Tórshavn, 1. januar 1941.

Louis Zachariasen.

Prentsmiðja H. N. Jacobsens Bókahandils.

Nevndarálit

í

løgtingsmáli nr. XIV—8/1941:

Fíggjarviðurskifti og dýrtíðarskipanir.

Rit frá valutamiðstøðini 5/8 41.

Í riti av 5. august 1941 hevur valutamiðstøðin gjørt løgtinginum kunnugt, at bretski konsulin í einum memorandum til miðstøðina hevur gjørt vart við, at hitt bretska fíggjarmálaráðið er av teirri áskoðan, at ein inflasjón av álvarsligum lyndi er ikki at koma uttanum hjá Føroyum, uttan so er, at gjørdar verða fyriskipanir til verju móti henni. Skotið verður til *at* skerpa rationeringina, *at* hava eina gjølla príseftirænsan, *at* økja um skattingina og sparsemi í samband við ta inngyrðing av eksportstørlinginum, sum longu fer fram.

Hitt bretska fíggjarmálaráðið og Bank of England hava harafturat hildið tað verið ynskiligt, at fíggjarætlan ríkisins fyri Føroyar og fíggjarætlan løgtingsins verða arbeiddar saman til eina fíggjarætlan. Hildið verður, at tað møguliga ikki altíð gerst hjá amtinum at fáa veitt til vega tey neyðturvullgu lán til rímiliga rentu, fyri at kunna rinda útreiðslur ríkisins.

Hitt bretska fíggjarmálaráðið hevur tó í samband við hesa útsøgn sagt, at hetta seinasta kortini er ein innlendis-føroyskur spurningur, sum bretska stýrið ikki leggur seg uppí, so leingi sum ikki talan er um hjá tí at læna amtinum pening.

Valutamiðstøðin, sum hevur viðgjørt bretska fíggjarmálaráðsins memorandum, sigur seg at vera samd í tí, at tað er vandi til staðar fyri eini álvarsligari inflasjón í Føroyum, og heldur, at henda inflasjónin longu er komin.

Hin hjá einum parti av íbúgvarunum økta og hjá einum øðrum parti hellt sterkt økta keypikraft verður bildin at bera við sær eina ónáttúrliga príshækkan, táið trongt er um atgongdina til fría innførslu. Hartil verður lagt, at seðilumlopið er vaksið frá 2,4 milliónum á heysti 1940 til yvir 5 milliónir í juli 1941, altso meira enn príshækkanin ger rímiligt, og tá so atgongdin til keyp av einum hópi av vørum samstundis er nógv trongd, vil fólksins økta keypikraft og henda hjá fólkinum økta seðilmongd bera við sær, at menn royna at keypa ta vøru, sum er til fals, uttan inun til, um hon verunliga er verd peningin, sum verður latin fyri haua. Tá ið soleiðis mongdin

av peningi, t. v. s. keypikraftin er størri enn vanligt, meðan nøgdin av vørum, serliga tær vørur, sum verða nýttar til nýskapanir, verða minni enn vanligt, ber tað við sær, heldur valutamiðstøðin, ring prísviðurskiftl, og er tað til stóran skaða ikki hert tyri tann partin av fólkinum, sum ikki hevur finglð keypikraft sína økta í mun til príshækkanina, men eisini fyri hella tað føroyska samfelagið, tá ið prísirnir fara niður aftur.

Valutamiðstøðin hevur hugsað um, hvat ið er at gera mótl hesi inflasjón, og mælir til, at tikin verða til viðgerðar tey av amtinum í ritinum av 22. oktober til løgtingsins flokksformenn framsettu uppskot:

1) Eina kraftiga príseftiræansan,
2) Tvungnan valdgerðardóm í arbeiðsósemjum uttan automatiska lønjavnan eftir prístalinum, og
3) Eina kraftiga skatting av øllum eykainntøkum.

Valutamiðstøðin viðmælir eisini, at tilætlanir um eitt løgtingslán til avloysan av láni ríkiskassans til voruhandilin verða framdar, fyri at hitt føroyska fólkið harvið skal fáa betri atgongu til rimiliga rentu av teirra uppsparda peningi. Verður skotið til umhugsunar at ganga longri og at fáa lán í Føroyum eisini til at loysa út øll løgtingsins og kommununna uttanoyggjalán. Tílík lán, heldur valutamiðstøðin, vilja eggja fólkið til uppsparing, ið vil vera til gagns fyri oyggjarnar, tá ið tíðirnar falla aftur í vanligt lag, og tað vil binda ein part av tí peningi, sum annars, ið fall hann verður friur, vil virka at príshækkan.

Sagt verður, at tað er gjørt monnum kunnugt, at tað er møguligt at nýta hin bundna sterlingin til at seta í bretsk virðisskjøl.

Rit frá Foroya arbeiðsmannafelagi $^{26}/_{10}$—41.

Føroya arbeiðsmannafelag hevur í riti av 26. august 1941 vent sær til tingið við áheitan um fyriskipanir móti teim ræðuligu prísum bæði á innlendskum og útlendskum vørum. Hildið verður fram, at henda príshækkan serliga hevur rakt arbeiðarastættin, av tí at meginútreiðslurnar hjá arbeiðarunum liggja meiri í keypi av neyðsynjarvørum enn hjá ríkmannunum, hvørs meginútreiðslur ofta liggja aðrastaðni heldur enn í neyðsynjarvørum. Sagt verður, at ríkmaðurin kann veita sær dýrtíðarviðbót við at spara um luksusbrúkið, meðan arbeiðararnir einans kunnu fáa viðbót fyri dýrtíðina við at prísirnir á neyðsynjarvørunum verða hildnir niðri, ella við at arbeiðsløninni verður hækkað samsvarandi voruprísirnar. Vístverður kortini á, at ein lønhækkan ikki altið gevur ta neyðturvuligu viðbót fyri dýrtíðina, av tí at arbeiðsgevararnir í kríggstíð náttúrliga hava hug at minnka um arbeiðið, og ofta má arbeiðið steðga vegna tilfarstrot. Tá hetta hendir, er tað skilligt, at ein lønhækkan á pappírinum dugnar arbeiðarunum einki. Hann situr — uttan at kunna minnka kravið at fáa neyðsynjarvørur — eftir við arbeiðsloysinum. Felagið søkir tí um, at hitt almenna má leggja alla orkuna á at veita arbeiðarastættinum ta hjálp og verud, sum yvirhovur er møguligt at veita til vega, og skjýtur til, at løgtingið setur mest møguligt av almennum arbeiðum í verk, veitir arbeiðarunum tryggjan fyri, at teir í øllum arbeiðum bæði hjá tí almenna og privata fáa fulla viðbót fyri dýrtíðina, og biðjur felagið um, at at hitt almenna ikki longur gevur undirløn við at meta arbeiðskostnaðin út frá eini grundløn uppá 70 oyru um tíman, men letur kostnaðin av almennum arbeiðum rokna út við eini grundløn, sum í hvussu er ikki liggur niðanfyri meðallønina hjá limunum í Føroya arbeiðarafelag. Mælt verður til, at settur

verður ein stovni, sum fær makt og skyldu at fastseta prísirnar á øllum neyðsynjarvørum (matvørum, slitklædnavørum og brenni). Føroya arbeiðarafelag ynskir at verða umboðað í hesum prísásetingarstovna.

Rit frá amtmanninum $^{30}/_{8}$ og $^{22}/_{9}$—41.

Í riti av 30. august boðar amtmaðurin frá, at hann fer til Onglands, og biður hann um at fáa høvi, tá hann kemur aftur, at bera fram hugsan sína um brævið frá valutamiðstøðini av 6. august, eins og um, hvussu hann heldur skattingin eigur at fara fram í 1942.

Afturkomin úr Onglandi sendir amtmaðurin tinginum eitt bræv, dagssett 22. september. Hann vísir har á, at hann yvirfyri formonnunum fyri løgtingsflokkarnar hevur varskógvað viðvikjandi inflasjónini og boðið sær at útarbeiða neyðturvulig uppskot til fyribyrgjan av henni. Víst verður á, hvussu prishækkanin er farin fram frá 1. juli 1939 til 1. juli 1941, har prístalið sýnir eina vaksan frá 100 til 165. Tikið verður eisini til, hvussu seðilmongdin er vaksin frá 2,4 mill. til 5,6 mill., tá brævið varð skrivað.

Sagt verður frá, at Føroya útfluttningsyvirskot í tíðarskeiðinum frá apríl mánaða 1940 til august mánaða 1941 er um 20 mill. kr. 15 mill. av hesum eru vorðnar vinnulívinum tøkar í donskum krónum, við tað at ríkið hevur yvirtikið um 675.000 £ við samsvarandi skyldu í donskum krónum. Tær 5 milli. standa eftir til at veksla so við og við.

Hildið verður fram, at hetta stóra fluttningsyvirskot hevur eisini gjørt tað møguligt at avdraga í stórum muni tær skuldir, sum fiskivinnan var komin í, og samstundis økt um innskotið í bankum og sparikossum.

Eins og valutamiðstøðin heldir amtið, at hesin mikli peningur, sum ein partur av fólkinum hevur vunnið, hevur viðført eina ónáttúrliga prishækkan, serliga av tí, at innfluttningurin er trongdur í stórum. Henda prishækkan hevur ikki bara verið á innfluttum vørum, men eisini á heimavørum okkara, og heldur amtið, at hon bert kann fyribyrgjast og mótarbeiðast við fyriskipanum, sum vikna um keypikraftina hjá tjøldini, og sum beinleiðis miða ímóti at halda prísirnar niðri. Amtið heldur, at ein meira munandi príseftiransan enn tann, vit hava, er neyðug, og skjýtur uppá at umskipa núsitandi príseftiransingarráð og geva tí meira myndugleika.

Skotið verður til, at tað skal hava heimild til at áseta „prísstop" viðvíkjandi ynsum vørum, eins og skipað er fyri í hinum partinum av kongarríkinum. Um hetta og annað heldur amtið, at samráðst má verða við prískontrolráðið og umboðsmenn fyri handilin eins og við fútan. Heldur amtið tað avgjørt vera neyðugt at fáa eina tílíka hvassari príseftiransan, fyri at tann parturin av fólkinum, sum ikki hevur fingið lut í ríkidøminum, kann fáa neyðsynjarvørur til rímiligan pris.

Viðvíkjandi prístallinum, útroknað hvørt fjórðingsár, og almenlýsingini av tí heldur amtið, at tað er neyðugt, at hetta heldur uppat. Tí, verður sagt, tað er eingin ivi um, at tey tíðigu og vaksandi prístøllni hava í sær sjálvum eina ógvuliga skaðiliga ávirkan á prísútviklingini við tað, at hildið verður, at tað vaksandi prístalið beinleiðis eggjar teim handlandi til prishækkan, sjálvtum henda prishækkan ikki er neyðug av hægri útreiðslum, og ger hetta altso, at mótstøða fólksins mótí prishækkanini viknar. Hildið verður, at tá alt dýrkar, mugu eisini vørurnar dýrka. Eisini viðvíkjandi løningsspurninginum heldur amtið, at prístalið er skaðiligt. Tað er neyðugt, fyri at hava tak á prísútviklinginum, at eisini arbeiðaranna og funktioneranna keypikraft verður skorin niður undir núverandi viðurskiftum, sjálvt um krøv teirra um at fáa fulla viðbót fyri tær øktu útreiðslurnar til lívið ikki kunnu sigast annað enn at

vera rættvísar. Amtið meinar, at við undantak av teim ringast stillaðu í samfelagnum hevur eingin krav uppá við hægri lønum at kunna vera við at hava ta somu keypikraft sum áður, og serliga heldur amtið tað vera skeivt, um keypikraftin verður økt. Amtið meinar, at tað er eingin vegur uttanum bann móti verkfalli og verkbandi, og skotið verður til, at innføra tvungna valdgerðaravgerð í øllum lønósemjum. Víst verður á, at menn hava gingið henda veg í hinum partinum av kongarikinum.

Amtið heldur, at tað vil gagna málinum, at førdar verða samráðingar um, hvussu ein valdgerðarstovnur skal skipast, og sigur amtið seg altíð at vera fúst til slíka samráðing.

Hildið verður fram, at um løgtingið skuldi móti amtsins vón hildið fast við fjórðungsárliga prístalinum og ikki ynskt at forða eini automatiskari hækkan av arbeiðslønum og øðrum lønum, ið stendst av tí fjórðungsárliga prístalinum, er amtið í stórum ivi um framvegis at vera við at útarbeiða og almengera prístalið, av tí at amtið heldur seg hervið átaka sær ábyrgd fyri eini fyriskipan, sum eftir tess ætlan beinleiðis er skaðilig.

Amtið skjýtur til, at roynt verður við áleggjan av stórum skattum at taka burt nakað av teirri keypikraft hjá fólkgvarunum, sum eftir tess meining hava inntøkur, sum liggja omanfyri eitt hóskandi minstastig. Principielt heldur amtið uppá skatting av eykainntøku, tá ið hon liggur omanfyri eina hóskandi hædd.

Sagt verður, at teir persónar, sum ikki hava fingið teirra inntøkur hækkaðar samsvarandi prishækkanina, hava verunliga minni skattaevni enn áður, og heldur amtið, at hesir ikki eiga at fáa økt um skattin, meðan hinir, sum hava fingið inntøkur sínar øktar í stórum, eiga at verða skattaðir fyri at minnka um teirra avlopskeypikraft. Amtið mælir til, at tingið undir síni viðgerð av skattamálinum tekur upp aftur tað uppskot um meirainntøkuskatt, sum tað viðgjørdi ífjør.

Amtið ger viðmerkingar til tann verunleika, at ríkiskassin nú undir kríggstíðini ikki hevur fingið inntøkur sínar øktar í Føroyum, meðan løgtingið hevur haft høvi til at kunna troyta tey øktu skattaevnini meira enn samsvarandi tingsins bráfengis øking av útreiðslunum, og hóast, at løgtingið soleiðis eftir amtsins ætlan ikki sjálvt beinleiðis treingir til meira inntøku, ræður amtið kortini til eina sterka eykaskatting sum lið í stríðnum móti inflasjónini.

Amtið heldur eisini, at tað er beint nú at troyta skattaevnini fyri at økja um amtsgrunnsins fíggjarstyrki at taka ímóti teim ringu tíðunum, tá tær koma. Heldur amtið, at tað er ikki órimiligt, at tingið, so leingi tess fíggjarligu viðurskifti gera tað møguligt, á ein ella annan hátt letur ríkiskassan fáa lut í tí beinleiðis skattinum ella á annan hátt lættir um ríkiskassans útreiðslur í Føroyum, men tað sigur seg ikki vilja seta fram eitt beinleiðis uppskot um hetta. Ynskt verður tó, at tingið tekur spurningin til umhugsunar og samráðingar við amtið.

Rit frá bretska konsulinum 30/9 41.

Amtið hevur í riti av 1. oktober 1941 sent tinginum eitt avrit av skrivi frá bretska konsulinum, dagssett 30. september í ár. Í hesum skrivi sigur konsulin bretsku ríkisstjórnarinnar vegna, at bretska stýrið fegið hevur ásannað, at amtið hevur í kvittanum at seta fram uppskot til fyriskipanir móti inflasjón. Bretska stýrið skilir, at uppskotini snúgva seg um økjan av skattinum, ein eykaeggjan til uppsparan, rationering og strangari eftirlit við vøruprísunum.

Bretska stýrið altrar sog ikki við at siga tað sum sína ætlan, at slíkar fyriskipanir eiga at vera settar í gildi struks og røkka so langt, sum neyðugt er fyri at gjøgnumføra eina skilagóða festan av prísstøðuni. Menn hava ásannað, sigur bretska stjórnin, at inflasjón hóttar samfelagsins fíggjarliga lív, mókar burt so við og við lívsmegina, ger ein part av fólkinum arman til frama fyri aðrar, oyðileggur kredittin og álitið í handilslívinum og hevur ta álvarsamastu ávirkan á ta socialu javnvágina. Bretska stýrið biðjur amtmannin um at gera løgtingið og hitt almenna vart við hesa støðu stýrisins.

Rit frá Havnar arbeiðsmannafelag $^{2}/_{10}$—41.

Havnar arbeiðsmannafeleg hevur í riti av 2. oktober mótmælt amtmannsins bræv til løgtingið viðvíkjandi eini møguligari avtøku av prístalinum. Tað minnir á, at tað var tað, sum saman við Havnar arbeiðsgevarafelag heitti á løgtinglð um at fáa útroknað eitt prístal, so at arbeiðsløninirnar kunnu verða settar eftir teim hækkandi varuprísunum, og at arbeiðssemja hevur verið, síðan prístalið kom og arbeiðslønin roknað eftir tí. Felagið biður tingið átaka sær útrokningina av prístalinum, ífall amtið ikki vil vera við til tess longur.

Tíkið verður undir við tankanum um eina strangari eftiransan av vøruprísunum, og heldur felagið, at hetta átti longu at verið gjørt, og krevur, at eftransingarráðnum verður givið ræði til sjálvt at forða fyri allari ónáttúrligari príshækkan. Felagið heldur, at tá hetta verður gjørt, er einki grundarlag fyri at avtaka eina fjórðungsárliga útroknan og almengeran av prístalinum. Felagið mælir ímóti, at arbeiðsmannaløninirnar verða lækkaðar, og heldur fram, at tær ongatíð hava ligið nóg høgt í mun til minnstakravið til lívið. Flutt verður fram, at formaðurin fyri „De samvirkandi Fagforbund i Danmark" hevur sagt, at avgerðin um, at teir dansku arbeiðararnir ikki kunnu fáa fulla dýrtíðarviðbót, er órættvís, „en Parodi paa Retfærdighed". Víst verður á, at keypikraftin hjá arbeiðsfólkinum í Havnar arbeiðsmannafelag higartil ikki er komin á somu hædd, sum hon var 1. juli 1939, við tað at prístalið fyri tað fyrsta verður roknað eftir tí farna fjórðungsárinum, og fyri tað næsta ikki liggur á hædd við tað, sum tað av rættum átti at verið. Prístalið gevur sum kunnugt bert 0,85 fyri hvørt prístalsstig. Lønin, sum av rættum átti at verið 165 oyru ífall full dýrtíðarviðbót varð givin, er av hesi orsøk vorðið bert til 154 oyru um tíman.

Rit frá priseftiransingarráðnum $^{2}/_{10}$—41.

Nevndin hevur frá priseftiransingarráðnum fingið rit, dagssett 2. oktober 1941. Greitt verður frá tess egna uppruna, hvørjar uppgávur og hvønn myndugleika tí er givið. Sagt verður, at tess arbeiðl við at fáa upplýsingar viðvíkjandi prísunum var torført at byrja við vegna ójavnan millum fútan og ráðið um arbeiðsgrundarlagið fyri at fáa hesar upplýsingar. Ráðið bar seg undan at geva upp prísnoteringarnar, sum fútin kravdi fyri at gera tað umbidna arbeiðl. At enda verður sagt, at amtið avgjørdi trætuna við at geva ráðnum viðhald.

Ráðið heldur, at tann ásetti hægstiprísur fyri føroyskar vørur hevur virkað væl, meðan tað sigur seg at hava verið móti hægstaprísásetan fyri kolonialvørur. Tað heldur eina tílíka ásetan at ganga ímóti galdandi reglum um, hvat ið hin handlandi hevur rætt at rokna sær til reinvinnu av søluni.

Viðvíkjandi ráðsins arbeiði verður sagt, at tað valla hevur gjørt

gagn, sum ætlað. Orsøkin til hetta, sigur ráðið, er, at tess myndugleiki hevur verið ov nær skerdur. Tess arbeiði hevur verið gyrt innanfyri fylgjandi punktir:

a) Príseftiransingarráðið hevur ikki haft myndugleika til at áseta vørupris. Ráðið kann her aftur á møti avgera, at príshækkan ikki má fara fram, fyrrenn ráðið hevur gjørt tað neyðturvuligu príseftirkannan. Men setur maður tvørturímótl hesl avgerð prísirnar upp, kann ráðið einki annað gera, enn at lata sakina fara til politiið.
b) Príseftiransingarráðið hevur rætt til at áseta vegleiðandi príslýsingar, men hesir upplýsingar eru ikki bindandi fyri handilsmannin. Eisini kann tað hugsast, at søluprisir, sum liggja omanfyri prísin, sum ráðið hevur lýst sum vegleiðandi, eru samsvarandi við galdandi reglur fyri søluágóða.
c) Príseftiransingarráðið kann sambart amtsins kunngerðing 10. september 1939 loyva handlandi at hava hægri prisir enn ein møguliga ásettur maksimalprisur, um ráðlð heldur serligar grundir vera til tess.
d) Príseftiransingarráðið kann krevja allar neyðturvuligar upplýsingar viðvikjandi prísum, fyri at fáa greiði á, um menn hava roknað sær órímiligan ágóða ella havst at onkrum øðrum, sum er í stríð við kunngeranina av 9. oktober 1939.

Ráðið finnst at, at tað er so skipað fyri, at um tað ynskti at ásett hægstaprísir, kundi tað ikki gjørt tað. Til tess mátti serlig lógskipan verið sett í gildi, og er tað so statt nú, at um ráðið heldur ymsar vørupríslr vera ov høgar, kann tað fyrst fáa hosar broyttar við kannan av polltl, stevning og dómsfellan. Hetta vil taka so langa tíð, at tá ið dómur er feldur, eru kannska vørurnar longu seldar,og heilt onnur prisvlðurskifti vorðin. Aftrat hesum kemur so tað, at tað oftir galdandi lóg er ilt at avgera, nær prísirnir eru ov høgir. Handlandi hava sambart lógaravgerð rætt at taka vanligan ágóða pluss eina hóskandi uppásetan fyri kríggsrisiko. Hetta hevur fört við sær, at ráðið bert hevur halt 6 kærumál um vøruokrun fyri rættinum. Av hesum 6 fingu bert 4 bót. Bøturnar vóru smáar, 50—500 kr. Ráðið heldur hesa linu príseftirænsan saman við prístalinum og teirri øktu peningamongd millum manna vera orsak til ta stóru vørudýrkanina, sum hend er síðan kríggið brast á.

Greitt verður frá, at nógv hava grundað vørupríshækkanina við prístalshækkanini. Visir ráðið á, at í Danmark er viðvikjandi prísum settar nógv skarpari reglur og fyriskipanir enn her á landi galda. Tað heldur, at tørvur er á at ganga sonu leið, sum gingin er harniðri. Tað skjýtur uppá:

1) Príseftiræensingarráðið eigur at fáa myndugleika at áseta hægstaprís fyri vørur og har, sum hetta ikki ber til, at avgera hægstu reinvinnu við søluni. Ráðsins avgerð og hægstaprísásetan skal tó kunna verða tikin upp aftur av amtinum til nýggja avgerð.
2) Ráðið eigur at hava heimild til at steðga allari príshækkan í 3 mánaðar, soleiðis at handilsmenn ikki skulu hava høvi til at nýta undirsøkingartíðina til at hækka prísirnar og harvið ávirka ta endiligu prísavgerðina.
3) Ráðið eigur eisini at hava skyldu at viðgera allar vanligar klagur yvir vørupríslr, ið ongar serligar reglur eru fyri, eins og at viðgera og avgera vistarhalds- og restauratiónsprísir og annað meira príshækkan viðvíkjandi. Ráðið má ansa eftir, tá prísirnir verða ásettir, at vørurnar ikki hækkast við meiru enn teim øktu útreiðslunum, vørupríshækkanini plus eina rímiliga dýrtíðarviðbót.(Heldur ráðið, at tað er av týdningi, at eisini verður ansað eftir hækkanini av arbeiðsmannalønunum og øðrum lønum. Tað meinar, at tað ikki er møguligt at halda handilsmanninum aftur í vørudýrkan, um arbeiðsmannalønin støðugt hækkast. Ein meirluti

av ráðnum ræður tessvegna til at taka til umhugsunar avtøku av prístalsútroknan og kunngeran).

4) Ráðlð eigur at fáa heimild til at áseta farmagjaldið, sum skip okkara skulu hava loyvi at taka fyri vørufinttning til landlð. (Upplýst verður, at hetta farmagjald hevur ligið millum 70 300 kr. pr. tons, og heldur ráðið, at tað er rímiligt, at hægsta mark fyri farmagjaldinum verður sett um 75 kr. pr. ton).

5) Ráðið eigur at verða umskipað soleiðis, at tað koma bert 3 limir at sita í tí fyri at tess arbeiði kann fara skjótari fram. Tó verður mælt til, at fyristøðuntaður vøruhandilsins og 2 av keypmannafelagnum fáa høvi at vera til staðar á ráðsins fundum, men teir skulu ikki hava atkvøðurrætt.

Fyriuttan virki príseftiransingarráðsins og ta nevndu ansan eftir arbeiðslønunum heldur ráðið tað vera eitt lýðningarmikið lið í arbeiðinum móti príshækkanini, at vøruhandilin verður víðkaður til at handla við fleiri specialvørum, ið nú eru monopoliceraðar av einstøkum heildsølumonnum. Ráðið heldur tað eisini vera vert at taka til umhugsunar, um landshandilin ikki eigur at fara at fáast við smásøluhandil. Meinar ráðið, at nakað eigur at gerast fyri at til dømis Havnarfólk lættari kunnu fáa fisk til keyps. Hetta vildi lætt eftirspurningin eftir øðrum neyðsynjarvørum og soleiðis virkað móti príshækkanini.

Ráðið hevur samsvarandi hesum sett fram uppskot til „Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Priser".

Rit frá Vágs arbeiðarafelagnum, „Framtiðini,".

Arbeiðarafelagið í Vági hevur lagt rit á ting um dýrtíðar- og onnur viðurskifti fólksins í hesum tíðum. Hildið verður, at tingið hevur gjørt ymsar fyriskipanir, sum ikki kunna sigast at vera sovorðnar, at tær styrkja um fólksins ovni at veita sær til vega tað neyðturvuliga til lívsins uppihald. Tingið verður biðið um at gera tað, tað kann, fyri at bøta um ólagið í okkara samfelagi, sum kríggið hevur borið við sær. Talað verður um, hvussu hart Føroyingar eru raktir av teirri bretskn fyriskipanini, ið so munandi hevur minnkað hægstaprísin av fiskinum og hartil lagt toll[1]) á fiskin, at tað valla er møguligt at halda fram við ferskfiskaútflutningi. Hann loysir seg hvorki hjá fiskimonnunum, skipsmonnunum ella útgerðarmonnum, um ikki ein umskipan av ferskfiskavlðurskiftunum verður gjørd.

Felagið heldur, at tingið eigur at taka valutaviðurskiftini, serliga vekslingarreglurnar fyri tann fremmanda pengan, til vlðgerðar.

Biðið verður um, at hitt almenna royndir at javna ta stóru peningamongdina, sum er komin til landa, soleiðis at hon verður okkara samfelagi til hjálpar fyri at fáa arbeiði í lag. Skotið verður til eitt samarbeiði við hin privata kapitalin og inntøkur tess almenna. Sum fyrimynd verður minnt á, at í Danmark er nú hitt almenna við at taka stór lán fyri at sota arbeiði í gongd. Hildið verður fram, at her í Føroyum eru nógvir arbeiðsleysir menn.

Felagið heldur eins og Havnar arbeiðsmannafelag og Føroya arbeiðarafelag, at prístalsskipanin skal halda fram og mælir ímóti øllum fyriskipanum, sum einsíðað ber við sær, at tann bæti í lønviðurskiftum, sum arbeiðarastatturin í samanhaldi hevur bart sær til, verður minnkaður ella burturtikin. Tað endar hræv sítt við at halda fram:

Sjófólkið, sum nú siglur, má vera tryggjað eina forsvarliga løn. Tann

---

[1]) Hesin tollur varð nakað skjótt avtikin.

lønójavni, sum nú teir siglandi hava, má verða javnaður, tí kríggsvandin og váðaverkið við siglingini er eins hjá øllum um borð.

Rætturin til at standa saman í lívsbardaganum má ikki verða skerdur. Stríðsevnini hjá arbeiðarastattinum má ikki viknast um.

Rit frá Føroya arbeiðarafelag $^{6}/_{10}$—41.

Føroya arbeiðarafelag hevur í riti av 6. oktober eisini mótmælt avtøku av prístalinum, og eins og Havnar arbeiðsmannafelag heldur tað fram, at prístalsskipanin hevur borið arbeiðssemju við sær, og at tað er at óttast fyri, um prístallið verður avtiklið, at tað við tað sama vil føra stríð við sær, sjálvtum forboð verður sett fyri verkbandi og verkfalli, og valdgerðarrættur verður niðursettur fyri at avgera allar lønósemjur.

Føroya arbeiðarafelag er tó á einum máli við amtmannin um, at tað avgjørt er neyðugt at fáa eitt príseftiransingarráð, sum er meira avgerandi í sínum arbeiði, og vísir felagið á umsókn sína av 26. august, stk. 3 d) viðvíkjandi einum prísásetingarstovna.

Amtsins ummæli av príseftiransingarráðsins riti.

Amtið hevur haft príseftiransingarráðsins rit til ummælis, og er samt við tí viðvíkjandi valdgerðarrættarspurninginum. Tað heldur fram, at tað framvegis heldur tað vera neyðugt, at tann fjórðungsárliga prístalsútrokning og almenngeran verður avtikin, men sigur tað, at hetta saman við banni av verkfalli, verkbandi og tvungnum valdgerðardómi í lønósemjum ikki á nakran hátt steingir úti møguleikan fyri hækkan av arbeiðsmannalønunum, um prísútviklingin ella onnur viðurskifti í samfelagnum annars skuldu talað fyri eini tílíkari hækkan. Valdgerarrætturin vil eftir amtsins hugsan kunna fáa tær neyðturvuligu vegleiðingar viðvíkjandi prísstøðuni gjøgnum kannan av prísunum á teimum týðningarmestu neyðsynjarvørum. Um prísútviklingin á hesum vørum gongur í hækkandi ætt, vil einki vera til bága fyri, at valdgerðarrætturin leggur eina tílíka prishækkan sum grund fyri eini møguligari hækkan av galdandi arbeiðsløn.

Amtið hevur einki ímóti príseftiransinnarráðsins uppskoti til „Midlertidige Bestemmelser for Færøerne om Priser", men setir tó fram nakrar atfinningar og vegleiðingar:

Til grein 2: Amtinum dámar ikki, at serliga konir limir í handilssamtøkunum ikki kunnu gerast limir av ráðnum.

Til grein 4: Amtið heldur tað vera ivasamt, um tað er rætt at skráseta ta reinvinnu, sum teir handlandi hava, tá ið kunngeringin verður sett í gildi, av tí at henda reinvinna hevur í mongum førl verið hægri enn rímligt er.

Til grein 5: Amtið heldur, at tað er rímligt, at ráðið ásetir hægstapris fyri heimavørur, tá ið tað hevur í hendi at áseta hægstapris fyri innfluttar vørur.

Til grein 6: Amtið meinar, at summi vilja halda tað vera órímligt, at klagurættur verður hjá „vedkommende Handelsorganisationer", tá ikki allir handlandi eru limir av hesum felag.

Til grein 16: Amtið hevur einki ímóti, at sektarpeningurin eins og tann „konfiskeraði" peningurin, fer í amtsgrunnin.

Amtið endar brøv sítt við at siga, at tað heldur tað vera givið, at tað fær høvi til at gera sínar endiligu viðmerkingar, tá ið nevndin hevur tikið støðu til ráðsins uppskot.

Viðvíkjandi ráðsins mælan til at víðka vøruhandilin, heldur amtið, at menn elga at ansa sær her, so ikki óskeuja verður við tær bretskn útfluttningsmannainteressurnar og við tær lántreytir, sum fíggjarmálaráðið hevur sett viðvíkjandi handilsláninum. Sambart hesar treytir eigur vøruhandilin at vera „af supplerende Art".

Nevndarinnar og amtsins viðgerð av bretska ferskfiskatollinum.
15.000	„	„	„	20.000	„	1002	„	15.000	„	13½	„	„	„
20.000	„	„	„	30.000	„	1677	„	20.000	„	16½	„	„	„
30.000	„	„	„	40.000	„	3327	„	30.000	„	22	„	„	„
40.000	„	„	„	50.000	„	5527	„	40.000	„	28	„	„	„
50.000	„	„	„	75.000	„	8327	„	50.000	„	34	„	„	„
75.000	„	„	„	100.000	„	16327	„	75.000	„	38	„	„	„
100.000	„	„	„	200.000	„	26327	„	100.000	„	40	„	„	„
200.000	„	„	„	400.000	„	66327	„	200.000	„	41	„	„	„
400.000 og derover						148327	„	400.000	„	45	„	„	„

§ 4.

I Lov Nr. 202 af 15. Maj 1939 § 3 ændres „500“ til „1000“.

X.

Landsnevndin verður heimilað til tingsins vegna í samráð við amtið at samtykkja uppskot til nýggjar inntøkur, um viðurskiftini skuldi gjørt tað tørvandi.

XI. **Almenni fíggjarviðurskifti Føroya.**

Peikað verður á hjúløgdu skjøl:
roknskapur løgtingsins 1940, fíggjarætlan fyri amtsgrunnin 1942, fíggjarætlan fyri økonomiska grunnin 1942 og roknskap fyri ríkiskassans inntøkur og útreiðslur viðvíkjandi Føroyum fyri fíggjarárið 1940/41 og fíggjarætlan ríkiskassans viðvíkjandi Føroyum 1941/42.

Fíggjarnevnd løgtingsins, 18. nov. 1941.

P. M. Dam. *J. P. Davidsen.* *J. M. Fr. Poulsen* *Kr. Djurhuus.*
Poul Petersen. *J. Paturssøn.* *L. Zachariasen.*

A/S. „Føre Amtstidende"s Bogtrykkeri, Thorshavn.

Minnilutaálit

i

Løgtingsmáli nr. XIV-8/1941:

Fíggjarviðurskifti og dýrtíðarskipanir.

(Minnilutin: Jóannes Patursson og Poul Petersen).

Á Løgtingi ífjør (Løgtingstíðindi 1940 bls. 17) førdi minnilutin í skattamálinum (Jóannes Patursson, Poul Petersen) fram:

„Tá Føroya stjórnarliga støða sum amt ikki longur kundi uppihaldast, so máttu landsins almennu fíggjarviðurskifti í sínu heild koma undir tingsins (fólksins) ræði.

Meirilutin á tingi samtykti tó 7. mai 1940, at amtmaðurin skuldi hava statsins kassa í sínum hondum uttan ábyrgd fyri nøkrum her á landi, meðan markið fyri fíggjarheimild Løgtingsins skuldi vera tað sama sum áður.

Henda tvining fastheldur meirilutin.

Bankaseðlaútgávu hava teir lagt í amtmannsins hendur, tó at afturímótivirðið (sterlingpundini) eina koma frá Føroyingum.

Á henda hátt hevur meirilutin enn meira ásannað, at landsins aðalfíggjarstovnar eru í hondunum á útlendskum manni.

Hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) hevur greiða støðu:

Allar almennar inntøkur og øll gjøld í e i n i fíggjarskipan — eitt stig nærri grundregluni: landsins almennu gjøld eftir landsins førimuni."

Í viðfylgjandi fráásøgn, borin upp á løgtingi 8. september 1941, er vist á fundarúrslit (resolutiónir) á almanna fundum um føroysk stjórnmál. Tað upplýsist at hesir fundir hava verið hildnir í tíðini frá 6. juli til 7. august 1941 í øllum Føroya sýslum, nemliga í Klakksvík í Norðuroya sýslu, í Fuglafirði í Eysturoya sýslu, í Tórshavn í Streymoya sýslu, í Scyrvági í Vágu sýslu, í Sandi í Sandoya sýslu, á Tvøroyri í Suðuroya sýslu, og at fundarfólkið, einmælt at kalla, hevur ásannað

1. a t føroyska tjóðin eigur fullan fólkarætt til at ráða fyri Føroyum, og
2. **a t tað er Føroya fólks vilji at taka ræði yvir sínum egna landi aftur.**

Tann 11. juni 1941 legði undirskrivaði Jóannes Patursson hetta bræv fram til landsnevndina:

„Sum tingmaður ynski eg mær til nýtslu frágreiðing um, hvat landsrakstur Føroya kostaði í ti farna árinum (1940) í lønum og skrivstovuútreiðslum. Útreiðslurnar ynskjast frámerktar, hvørt tær eru úr ríkiskassanum ella „amtskassanum". Frágreiðingin verður at umfara allar tær almennu stovnar og embætir í landinum, sum føroyskir ella danskir almanna peningar verða latnir til. — Skúla- og kirkjumálaútreiðslur eru í hesum viðfangi undantiknar."

Í hesi tingsetu hevur so løgtingsskrivstovan sett saman og tilsent nevndini eitt heilskapað føroyskt figgjarrokniskap við yvirskrift: „Yvirlit yvir rakstra-útreiðslur og inntøkur ríkiskassans 1940/41 og løgtingsins 1940 og ætlan ríkiskassans 1941/42 og løgtingsins 1942 viðvíkjandi Føroyum."

Í bræví frá „Valutacentralen" til „Lagtingets Landsnevnd" dagsett 5. august 1941, sum nevndin hevur fingið til ummælis er millum annað henda frásøgn:

„Det britiske finansministerium og Bank of England har yderligere peget paa ønskeligheden af, at statens budget for Færøerne sammenarbejdes til et budget, idet det rimeligvis ikke altid vil være muligt for amtet at tilvejebringe de for afholdelse af statens udgifter fornødne laan til en rimelig rente. Man har dog i denne forbindelse fremhævet, at dette spørgsmaal anerkendes at være et indre anliggende saalænge det ikke er nødvendigt, at den britiske regering stiller pengemidler til raadighed for amtet."

Í hjálagda skrivi frá Færø amt, 22. september 1941 til gjaldoyrisnevndina, er m. a. soleiðis tikið til orða, at tað „dels vilde være ønskeligt og ikke urimeligt, sålænge de økonomiske forhold tillade det, at lagtinget under en eller anden form overlod en del af den direkte skat til statskassen eller på anden måde aflastede statskassen."

Minnilutin vil halda, at tað sum her er framkomið, gevur løgtinginum neyðturvilig tilfar og líkindi til, út frá hesum grundarlagi, at seta í verk ta nýskipan av Føroya almenna figgjarlagi, sum er umráðandi nú og í næstu framtíð.

Í eftirstandandi áliti og viðmerkingum vil minnilutin geva grein fyri sína støðu og sínum uppskoti og fyrst bera fram eina stutta figgjarliga frásøgn:

Tað kann sigast, at figgjarrokniskapurin frá teirri tíð tá slíkur fyrst er ikomin her á landi yvirhøvur, hevur verið undir einum, alt fram til um 1856, tá konguligi handilin gav uppat. Í hesi tíð kann rokniskapurin fram til trúarskiftið, um 1540—50, kallast at hava verið á innlendskum hondum burturav. Aftaná hesa tíð var hann eisini innlendskur, tó so at deildir av honum vóru skipaðar, stýrdar ella eftiransaðar uttanífrá.

Inntil trúarskiftið fór allur skattur og almenn avnotir í Føroya tarvir, undantikið bøtur og annað, sum svarað var í kongsskatt, og ullin sum svarað var í pávaskatt.

Aftaná trúarskiftið fell pávaskatturin burtur. Ein nýggj útlendsk avnotaútreiðsla kom tá í staðin. Tað var gjaldið av teimum jarðum, sum kongarnir tá fóru at taka leigu av. Herumframt fór so út av landinum vinningurin av einavaldshandlinum.

Eitt tað síðsta ár, 1853, sum Føroya rokniskapur var í heilum líki, var avlopið av landsrokniskapinum: av handlinum og kongsleiguni 39.244 rikisdálar 82 skillingar. Haruppí vóru 7.900 dálar av uppspardari sjóvátryggingarpremiu.

Eitt tað fyrsta árið aftaná at Føroya rokniskapur regluliga fór at vera í tveimum, 1857—58, annar førdur í Keypmannahavn á fíggjarlógini dansku og annar hjá løgtinginum, vísti rokniskapurin á fíggjarlógini 8,175 rikisdálar í avlopi.

Í hesi 1000 ár frá o. u. 850 til 1853, hava Føroyar meðan tær høvdu rokniskap sær, verið mentar fíggjarliga at borið seg sjálvar. Herumframt hava Føroyar, serstakliga í teimum 300 árunum frá um 1550-1850 verið førar fyri á hvørjum ári í hesi longu tíð at latið stórtøkin avlop til eitt annað lands húsarhald (sjá m. a. Føroya søgu I, bls. 81—82).

Aftaná at Føroya rokniskapur regluliga fer sundur í tvey, so síður fór at verða, at hava ein løgtingsrokniskap og ein ríkisrokniskap, fer avlopið av Føroyum so við og við at minka, inntil tað heilt gevur uppat um 1875. Tað stendur so nøkur ár á jøvnum, hagartil umskiftið kemur í 70unum. Tá fer inntøkuhallin líðandi at koma til sjóndar.

Í fíggjarárinum 1905—06 er inntøkuhallin av Danmarks útreiðslum til Føroyar 52.330 kr.

Í seinasta fíggjarári 1940—41 er Danmarks føroyski inntøkuhalli vaksin til stívar 2.000.000 kr. Samtíðis berur løgtingið stívar 1.000.000 kr. í avlop á sínum rokniskapi.

Tað tørvar ikki at endurnýggja at høvdu Føroyar fingið politiskt frælsi samtíðis sum landið fekk fríhandil í 1856, hevði landshúsarhaldið sum tá gav avlop verið lætt at tikið.

Tað tørvar heldur eingin frásøgn um at høvdu Føroyar fingið fíggjarligt frælsi tá innløguhallin í 1906 á danska ríkisrokningini var 52,330 kr., hevði landshúsarhaldið enn verið lætt at tikið.

Nú innløguhallin í hesum seinasta ríkisrokniskaparárið er o. u. 2,000,000 er takið ikki so lætt, tó løgtingsavlopið er um 1.000.000 kr.

Men takast má tað, grundirnar eru hesar:

a) Danska fíggjarlógin sigur frá, at tann danski styrkurin til Føroyar er vaksandi ár undan ári. Tað er ikki væntandi, at Danmark, um vit koma aftur í fíggjarliga tingingar við hetta land, vil ella kann halda fram við, at bera hægri og hægri útreiðslur til Føroyar uttan so skuldi verið, at Føroyar vildu svara ríkisskatt til Danmark afturimóti, soleiðis sum tilætlað var veturin 1905—06, sjá Rigsdagstid. Folketinget 1908—09 II, bls. 4871. At svara danskan ríkisskatt, kann ikki ætlast at Føroyingar nakrantíð góðvilliga geva seg til. So hesin vegur kann ikki haldast at vera gongdur.

b) Tað er enn alt í ti óvissa, hvussu happið verður hjá Danmark aftaná at hesin bardagi er lokin. Tað sama kann sigast um Føroyar. Men eitt mega vit allir kunna vera samdir um, at standa vit Føroyingar ikki fíggjarliga sjálvbjargnir meðan ófriðurin herjar og standa vit ikki fíggjarliga sjálvbjargnir, tá bardagin einaferð gevur uppat, so liggur okkara fólki vátt undir føti. Verða vit í hesi tíð fíggjarliga uppihildnir av annara landa náðum, so vil okkara orð og okkara vilji vera lítið í metum, tá ið avtornar.

c) Í ti í nevndini framlagda „Færø Amts" brævi 22. september 1941, heldur „Færø Amt" sum áður nevnt fyri, at tað „vilde være ønskeligt og ikke urimeligt, om lagtinget saalænge de økonomiske forhold tillade det, under en eller anden form overlod en del af den direkte skat til statskassen eller paa anden maade aflastede statskassen". Minnilutin

kann ikki annað enn vera avgjørt innóti, at taka upp tann nýggja skattapolitikk, at skriva út føroyskar skattir, verið seg beinleiðis skattir ella tollar til danska statin. Allraminst kann minnilutin samtykkja at binda landið til skattagjald til Danmark „saalænge de økonomiske forhold tillade det", sum føra kann til óendaliga skattaskyldu. Haraftarímóti vil minnilutin „paa anden maade aflaste statskassen" nevnliga við, at Føroyar taka allar statskassans útreiðslur undir sítt ræði og sína ábyrgd.

d) Í brævi valutacentralens 5. august 1941 hevur bretska figgjarráðið og Bank of England mælt til, at tann føroyska figgjarskipan verður undir einum soleiðis at bæði løgtingsrokniskapurin og Føroya rokniskapur á donsku figgjarlóguni verða samandrignir í ein. Hetta heldur minnilutin verða á rættari leið og hevur sett uppskot um at so verður gjørt.

e) Tá bretska figgjarráðið og Bank of England samstundis taka til orða um, soleiðis sum tað á donskum máli liggur fyri í nevndini at (idet): „det muligvis ikke altid vil være let for amtet at tilvejebringe de for afholdelse af statens udgifter nødvendige laan til en passende rente", so er hartil fyrst at siga sum frammanundan nevnt, at støða minnilutans er tann, at løgtingið yvirtekur alla tað figgjarligu ábyrgd og figgjarligu skyldu, sum nú er á amtmannsins hondum. Sambart hesi støðu vilja tá øll amtmannslán í Føroya tarvir verða av ongum. Verður neyðugt hjá løgtinginum at taka lán, kann tað ætlast ikki at verða vandamikilt hjá tinginum at fáa tey neyðturvuligu, lagaligu lán, meðan figgjarstandir tingsins og Føroyalands er sum hann hevur verið og er.

f) Viðvíkjandi frammanundan nevndu lántøku igongur bretska stjórnin og Bank of England, at tílík lántøka (sagt á donskum máli), „er et indre færøskt anliggende, saalænge det ikke er nødvendigt, at den britiske regering stiller pengemidler til raadighed for amtet".

Her hevur tá bretska stjórnin týðuliga víst á, at meðan Føroyar eru sjálvbjargnar í figgjarviðurskiftum sínum, vil bretska stjórnin ikki koma sær uppímillum, í okkara stjórnarskipan ella okkara figgjarstjórnarlag. Haraftarímóti er eins týðuliga tilskilað, at skal amtmaðurin taka enskt lán til at halda figgjarrakstur Føroya igongd, so verður tað ikki eitt innanlenskt mál, hvussu Amtið umferð tann lánta bretska pening.

Tað er einki annað at siga síðani bretska herveldi tók Føroyar 13. apríl í fjør, enn at Føroyingum og Bretum yvirhøvur hava komið sær ásamt. Alt ørðvisi kunna viðurskiftini føra at verða, um Bretastjórn, vegna hesa umrøddu lántøku skuldi farið at gjørst luttakandi í okkara lands peningahúsarhaldið. So væl okkum kann eira saman við Bretlandsmonnum á frælsum grundarlagi, teirra og okkara, so vandamikil vil lagnan kunna verða okkum, sum tann pinkulitla tjóð, vit Føroyingar einaferð eru, um vit í hesi vandatíð, siga okkum undan at taka tey figgjarligu tøk, ið krevjast til at uppihalda okkara fulla sjálvbjargni. Nú eru Føroyingar bretskra manna javningar, tó vit eru lágir í gøtuni og teir teir høgu. Lita vit okkum ikki sjálvir til at bjarga landinum figgjarliga, gera vit okkum til „minnimenn", tá er allur javnrættur burturdottin, tá hava vit sjálvir flutt burtur hornsteinin undan okkara tjóðskapliga fólkarætti, tá hava vit liðað okkum úr felagsskapi við teimum tjóðum sum Chamberlain tilsegði fullan fólkarætt tann 3. sept. 1939 við hesum orðum: „Ongland berjist fyri fólkanna fulla sjálvavgerðarætti, fyri at tryggja frælsi

hjá teimum smáu tjóðunum" og Rosevelt tann 16. mars 1941 við hesum orðum: „Hvør tjóð hvussu lítil hon er hevur rætt at líva og virka sjálvstøðugt." Tá hava vit sjálvir gjørt bretska konsulins frásagn frá 14. apríl 1940 lítisverda har lovað var at av enskum ávum vildi einki umskifti verða gjørt á lúnum innlendska stýrislaginum (administration), samanber frammanundan nevnda bretsku frásøgn 5. august 1941.

Sum fyrr nevnt hava Føroyingar í meir enn 1000 ár ikki einans verið fíggjarliga sjálvbjargnir, men haraftrat verið førur fyri, ár um annað, at latið munagóðan styrk til eitt annað land. Minnilutin hevur, sambart frammanundan standandi frásøgnum frá øllum landsins sýslum, tað álit á Føroya fólki í dag, at tað ikki sigur seg burtur úr ætt, nú ið ástendur.

So statt stillar minnilutin hetta

Uppskot

til

Fíggjarlóg fyri árið 1942.

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings kunnger landsstjórin (amtmaðurin) fylgjandi lóg:

I.

INNTØKUR

Fyri fíggjarárið 1942 verða inniløgur løgtingsins ætlandi so sum greint í §§ (1 og 2):

§ 1.

Ætlandi koma hesir skattir og tollar at geva:

1.	løgtingsskattur	kr.	1.275.000,00	
2.	tollur	-	750.000,00	kr. 2.025.000,00
3.	stempulskattur	kr.	75.000,00	
4.	skipagjald	-	10.000,00	
5.	gjøld av loyvum	-	2.000,00	
6.	arva- og gávugjald	-	30.000,00	
7.	rætlargjøld	-	30.000,00	
8.	stuttleikaskattur	-	20.000,00	kr. 167.000,00
9.	automobilskattur	kr.	10.000,00	
10.	gjaldoyrugjald (valutagjald) og seðlagerð	-	500.000,00	
11.	flutt frá 1941	-	300.000,00	
12.	vinningsbýti	-	10.000,00	
13.	rentur	-	00.000,00	
14.	álíknað kommunurnar	-	90.000,00	
15.	ymiskar inniløgur	-	50.000,00	kr. 960.000,00
				kr. 3.152.000,00

§ 2

RAKSTUR LØGTINGSSTOVNANA:

1) Postverkið
2) Telefonverkið
3) Seðilbankin
4) Landshandilin
5) Sjóvinnugrunnurin
6) Jarðagrunnurin
7) Vegagrunnurin
8) Skúlagrunnurin
9) Tryggingargrunnurin
10) Kirkjugrunnurin

II

GJØLD

Løgtingsins gjøld fyri árið 1942 verða ætlandi sum greint í §§ (3—14).

§ 3

Rentur av lánum løgtingsins	kr.	20.000,—

Sambart fíggjarætlanina fyri amtsgrunnin 1942 eru renturnar settar til kr. 30.000,—

Eftir løgtingssamtykt 1940 verður eykaavdráttur — 1,3 av tingsins skuld at rinda í ár.

Tann samlaða skuld tingsins er eftir ætlanini kr. 600.000,—

Tí verður rentan ætlandi minkað til kr. 20.000,—

§ 4.

Løgtingskostnaður

1)	tingmannaløn v. m.	kr.	40.000,—	
2)	prenting o. l.	-	10.000,—	
3)	løgtingshúsið	-	4.000,—	
4)	skrivstovan	-	18.000,—	kr. 72.000,—

(smbr. fíggjarætlanina fyri amtsgrunnin 1942)

§ 5.

Landsstjórnin og løgreglan

1)	sorinskrivarin og skrivstovan	kr.	27.640,—	
2)	fútin og skrivstovan	-	47.312,—	
3)	sýslumenninir og sóknarfútin	-	63.536,—	
4)	amtmaðurin og skrivstovan	-	56.576,—	
5)	gjaldstovan	-	53.820,—	
6)	eftirlønir	-	26.900,—	
7)	aðrar útreiðslur	-	3.392,—	
8)	løgtingsverkfræðingurin	-	10.000,—	kr. 290,000,—

(smbr. fíggjarætlan rikiskassans og amtgrunsins 1942)

§ 6.

Læknaskipan v. m.

a) fíggjarætlan ríkiskassan 1942:

1.	Amtslæknin	kr. 5.500,—	
2.	Fylkislæknar	- 18.577,-	
3.	Byggiútreiðslur	- 2.000,—	
4.	1 Bróstsjúkrulækni	- 10.000,—	
5.	6 kommunulæknir	- 20.000,—	
6.	Jarðamøður	- 13.000,—	
7.	Bróstsjúkrahúsið	- 57.000,—	
8.	Sjúkrahús	- 123.200,—	
9.	—	- 7.500,—	
10.	Dr. A. H. Tuberkladeild	- 20.000,—	
11.	Farsóttarútreiðslur	- 11.000,—	kr. 288.000,oo

b) fíggjarætlan løgtingsins 1942:

1.	Sjúkrahúsini	kr. 175.000,—	
2.	Bróstsjúkrahúsið	- 50.000,—	
3.	Naina	- 1.000,—	
4.	Farsóttir	- 7.000,—	
5.	Ljósmóður	- 4.500,—	
6.	Læknar	- 5.000,—	
7.	Karantenuútreiðslur	- 1.000,—	
8.	Annað	- 4.500,—	kr. 248.000,oo
			kr. 536.000,oo

(smbr. fíggjarætlan ríkiskassans og amtsgrunnsins 1942)

§ 7.

samferðslumál

a) vegir og havnir ... kr. 350.000,oo

Føroyar eru stutt á veg komnar við vega- og havnagerð.
Landið kann tí ikki verða fört fyri av rakstrinum at halda allar útreiðslurnar til hesi endamáls frama:

Tað verður skilað til, at tingið letur mest møguligt av rakstrinum 1942 — t. d. kr. 350.000,—

Harafturat so mikið sum gjørligt av avlopinum 1941 á socialrokningini.

Skotið verður til, at tingið longu nú tekur til umhugsunar, at veita veggrunninum aðrar inniløgur t. d. gjøgnum avgift av olju og bensini.

Samstundis verður reglugerðin tikin upp til umhugsunar.

b) „Smiril" (smbr. figgjarætlanina)	kr.	80.000,00
c) vitamál (smbr. figgjarætlanina)	-	70.000,00
d) postverkið	-	100.000,00

Hetta undirskot er sambart figgjarætlanini 1942. Tað verður vist á uppskot Fólkaflokksins 1940: Føroysk Frímerkið (løgtingstíðindi 1940 p).

Ætlandi vil hetta tiltak geva munandi til at fáa endarnar til at røkka saman.

§ 8 a

Kirkjumál . . . . . kr. 75.000,00

í figgjarætlanini ríkiskassans 1942 eru hesar útreiðslur mettar til kr. 109.000.
Hetta verður hildið at vera ov mikið.
Tað verður vist á, at jarðagrunnurin ætlandi skal keypa prestajørðina fyri ein pris sum er um 750.000,00 kr.
Rentan av hesum peningi vil hereftir ganga inn í kirkjugrunnin og nýtast til hesi endamáls frama.
Ætlandi vilja besar útreiðslur soleiðis kunna minkast til kr. 50.000,00

ad § 8 b

Kenslumál

a) figgjarætlan rikiskassans 1942:

1.	Læraraløningar l. l.	353.600,00	
2.	Eftirlønir	50.000,00	
3.	Læraraskúlin	12.500,00	
4.	Bókasavni og skjalasavni	9.800,00	
5.	Kvøldskúlar	8.400,00	
6,	Føroya fólkaháskúli	3.500,00	
7.	J. og H. A. Djurhuus.	1.800,00	
8.	Handilskúlar og tekniskir skúlar . . .	6.700,00	
9.	Realskúlin	30.000,00	
10.	Aðrar útreiðslur	724,00	
		477.024,00	
	minus refusjónir (eftirlønir v.m.) ca.	20.000,00	kr. 457.000,00

b) figgjarætlan løgtingsins 1942:

1. Læraraløningar	110.000,00		
2. Bókasavnið	5.060,00		
3. Studentarskúlin	20.000,00		
4. Aðrar útreiðslur	7.000,00	c.	143.000,00
		kr.	600.000,00

Tað verður vist til figgjarætlan ríkiskassans og tingsins 1942.
Frá eru drigin eftirlønir o. l.
Hesum endamál til frama verður skotið uppá at fáa sett á stovn eydnuspæl (lotteri) hvørs ágóði skal nýtast til uppihald av okkara skúlaskipan, soleiðis at hon so við og við kann koma at verða sjálveigandi.
Tað verður í hesum viðfangi vist á at Ísland hevur liknandi skipan.

§ 9.

Sjóvinnumál ..... kr. 100.000,00

Samtykt varð í tingsetuni 1940 at 1/4 av avlopinum av tingsins rakstri 1941 skuldi leggjast til ein sjóvinnugrunn.

Hesin fjórðingur er mettur til kr. 200.000,00. Skotið verður uppá, at tingið av rakstrinum 1942 letur kr. 100.000 til sjóvinnulig mál.

Hartil verður mælt til, at tingið longu nú tekur til umhugsunar at veita hesum grunni mest møguligar inniløgur, t. d. at áleggja eitt minni útflutningsgjald, ella geva grunninum part í eini hægri valutaavgift.

Samstundis verður reglugerð gjørd hesum grunni viðvikjandi.

§ 10.

Landbúnaðurin ..... kr. 100.000,00

a) figgjarætlan ríkiskassans 1942:

1. jarðagrunnurin	kr.	10.000,00
2. húsdjórafremjingin	-	20.000,00
3. djóralæknin	-	6.000,00
4. búnaðarráðgevarin	-	6.500,00
5. royndarstøðin	-	30.000,00
	kr.	72.000,00

b) figgjarætlan løgtingsins:

1. jarðagrunnurin	kr.	10.000,oo
2. djóralæknin	-	3.000,oo
3. búnaðarnevndir	-	3.000,oo
4. aðrar útreiðslur	-	1.000,oo
	kr.	17.000,00

Ætlandi verður studningurin til hesi endamáls frama sum higartil undantikið tann, ið latin hevur verið til jarðagrunnin til keyp av óðalsjørð o.l.

Tað verður skilað til, at landsnevndini ætlandi latið upp í hendi tørvandi pening á socialrokningini sum studning til veltingar o. l. — fyri 1941 kr. 5o.ooo,oo

§ 11.

Styrkveitingar

a) figgjarætlan ríkiskassans

1. Ellisrenta og ellisheim	400.ooo,oo	
2. Einkjubørn	10.ooo,oo	
3. Barnaheim	7.ooo,oo	
4. Sjúkrakassa	105.000,oo	
5. Serforsorg	33.221,oo	
6. Vanlukkutryggingarráðið	5.450,oo	
7. Sanering	3,ooo,oo	
8. Avlamisgjald	40.ooo,oo	
	ca. kr. 604.000,oo	
minus refusjón v. m. (Cl-2)	64.000,oo	54o.ooo,oo

b) figgjarætlan ríkiskassans:

1. Ellisrenta og ellisheim	70.ooo,oo	
2. Einkjubørn	20.ooo,oo	
3. Kreppufyriskipanin (25.000) (flutt til valutaráðið)		
4. Socialhjálp o. l.	70.ooo,oo	16o.ooo,oo
		7oo.ooo,oo

Hesi gjøld verða sum heild somu sum tey hava verið á ríkiskassans og tingsins roknskapum.
Tað verður tó skilað til, at tann styrkveiting, sum tingið hevur latið í 1941 verður umskipað, so hon hereftir verður latin í arbeiði til tey treingjandi, sum eru arbeiðsfør, men latin sum higartil til hini — sjúk, avlæmingar o. l. — (smbr. § 7 a)

§ 13.

Ymisk gjøld (økonomiski grunnurin)			kr.	30.000,oo
A) Brýr og lendingar			-	10.000,oo
B) Skúlamál:				
1. Eftirlønargrunnur lærara	kr.	2.000, -		
2. Studentaskeiðið	-	15.000, -		
3. Skúlabókagrunnurin (5 studningar av 5 ára játtan	-	500, -		
4. Føroya fólkaháskúli	-	3.000, -		
5. Læraranámskeið	-	5.000, -		
6. Studningur til bygdanæmingar á studenta- og preliminerskeiðinum	-	5.000, -	kr.	26.000,oo
C) Vísindi, bókmenta o. t.:				
1. J. H. O. Djurhuus	-	500,		
2. Varðin	-	1.000, -		
3. Føroya Forngripafelag	-	200,-		
4. Skjalasavnið	-	2.675,		
5. Føroya kvæði (5. studningar av 9 ára játtan	-	1.000,		
6. Studningur til studerandi	-	1.500, -		
7. Til mentunargrunn	-	500, -	kr.	7.475,oo
D) Ymist:				
1. Eftirløn til frk. Berg	kr.	1.400,- -		
2. Honorar til frk. Bærentsen	-	200,- -		
3. Fráhaldsfeløgini	-	500,- -		
4. Barnaheimið	-	1.000, -		
5. Felagið „Røde Kors	-	500,- -		
6. Roynd við træplanting	-	1.000,- -		
7. Studningur til handverkarar og jarðabrúkarar	-	2.000, -		
8. Ítróttarsamband Føroyar	-	500,	kr.	7.100,oo
			kr.	50.575,oo
(ad B 2 og 6 flutt til § 8b)			kr.	20.000,oo
			c.	30.000,oo

Rakstrar-

§ 1	a)	løgtingsskattur	1.275.000,—	
	b)	tollur	750.000,—	2.025.000,—
	c)	stempulskattur v. m. (3—8)		167.000,—
	d)	automobilskattur v. m. (9—15)		960.000,—

§ 2 Rakstur løgtingsstovnana:

1. Postverkið
2. Telefonverkið
3. Seðilbankin
4. Landsbandilin
5. Sjóvinnugrunnurin
6. Jarðagrunnurin
7. Vegagrunnurin
8) Skúlagrunnurin
9) Tryggingargrunnurin
10) Kirkjugrunnurin

3.152.000,00

yvirlit 1942

§ 3	Rentur av lánum løgtingsins		20.000,00
§ 4	Løgtingskostnaður		72.000.00
§ 5	Landstjórn og løgreglan		290.000.00
§ 6	Læknsskipan		536.000,00
§ 7	Samferðslan:		
	a. Vegir og havnir	350.000,00	
	b. Smiril	80.000,00	
	c. Vitamál	70.000,00	
	d. Postverkið	100.000,00	600.000,00
§ 8	a. Kirkjumál	75.000,00	
	b. Kennslumál	600.000,00	675.000,00
§ 9	Sjóvinnumál		100.000,00
§ 10	Landbúnaðurin		100.000,00
§ 11	Social mál		700.000,00
§ 12	Yrkismál		20.000.00
§ 13	Ymisk gjøld (økonomiski grunnurin)		30.000,00
	Munur		9.000 00
			3.152.000,00

INNTØKUR

ad § 1.

1. Tá inniløgur Føroya verunliga eru væl størri í 1941 enn 1940 kemur ætlanin ivaleyst at halda.
2. Tilflutningsmøguleikarnir verða avgerandi fyri hesa landsinniløgu, men um innflutningurin skuldi komið at minnka í nøgd, eru tó møguleikar fyri at áleggja eykatoll á luxusvørur til javnan av møguligum minni tolli á øðrum vørum (m. a. neyðsynøarvørum).
3. Ein fullfíggja stempullóggáva fæst vónandi í gildi í hesum fíggjarári. Ágóðin her er mettur eftir ætlan.

4- 8 Hesir snøklar, sum verða at økja við lóg (smbr. 6) vilja ætlandi tað, teir eru mettir til í ætlanini.

9. Hesin skattur er mettur eftir ætli, men er ivaleyst væl hægri.
10. Uttan at kenna umfar pundanna, verður tað hildið, at hendu inniløga er ein tann besta í landinum í løtuni.
    Í ætlanini er hon mett eftir ætli.
    Um viðurskiftini skuldu broytst munandi í so máta, so liggur allur ágóðin fyri 1941 niðurfyri (smbr. viðmerking til seðil bankans).
11. Tað er náttúrligt, at tann frii parturin av avlopinum av rakstrinum 1941 verður fluttur á rakstrinum 1942, sum fyribilstiltak.
12. smbr. fíggjarætlan tingsins 1942.
13. " " " "
14. " " " "
15. Her verður víst til fíggjarætlan tingsins 1942, t. d. jarðaskattur, tiggjundavloysing, hartil koma inntøkur av sektum v. m.

ad § 2.

Sum ávist í viðmerkingum til tær serstøku greinirnar er tað ætlað, at allir tingsins stovnar verða sjálvstýrdir. Teim verður útvega egnar inniløgur, meðan møguligt undirskot teirra verður at rinda av landsrakstrinum.

Tað verður annars at vísa til lógir og reglugerðir stovannana.

1. Postverkið.
   Hesin stovnur vildi ivaleyst borið seg væl betur, um hann átti seg sjálvur sum føroyskur stovnur, tí tá vildi hann m. a. fingið av postpeninginum av postflutninginum úr úthcimínnm (smbr. Verdenspostunionen).
   Annars verður vist til viðmerking til § 7 d: Føroysk Frímerki.
2. Telefonverkið.
   Hesin stovnur ber seg og eigur eisini at kunna bera umsiting og úrbygging verksins.
3. Seðilbankin (Landsbankin).
   Viðvikjandi heaum stovni verður vist til uppskot fólkaflokksins 1940 (tingtíðindi 1940 blðs. 11).
   Í ætlanini 1942 er tann ætlaði ágóðin settur inn á raksturin sum fyribilsskipan (smbr. omanfyri).

4. Landshandilin.
Hesin stovnur er ein fyribilsskipan, sum eigur at bera seg.
5. Sjóvinnugrunnurin.
Aðalyrkisevni Føroya er sjóvinnan. Landið eigur tí at hava umsjón við henni.
Tað verður tí skotið uppá, at tingið veitir hesum stovni mest møguligar inniløgur nú (smbr. viðmerking til § 9). Annars verður skilað til, at lóggávan átti at havt umsjón við, at útgerðarmenn løgdu størst møguligar bátspartar niður til endurnýggjan av yrkisevnunum eisini endurgjald fyri mist skip o. l. áttu at verða lagd niður til líkindi verða fyri endurnýgging.
Ríkiskassin átók sær í sini tíð ábyrgdina fyri ein meginpart av veðhaldinum undir kriggstryggininí.
Harafturfyri skal hann hava 40 pct. sum frammíhjáavnot av vinninginum.
Tað er náttúrligt, um tingið átekur sær hesa ábyrgd og at vinningurin til sína tíð fer inn í sjóvinnugrunnin.
6. Jarðagrunnurin.
Til frama fyri dyrkingararbeiði letur tingið mest møguligan studning av rakstrinum.
Annars verður vist til viðmerking til § 10.
7. Skúlagrunnurin.
Skúlaskipan Føroya er illa stillað, hon er at kalla ognarleys.
Her verða ikki tikin við okkara viðurskifti við Danmørk.
Tingið eigur tí skjótast gjørligt at gera stig til at veita hesum stovni egnar inniløgur, so hon ikki einans skal verða hildin uppi av landsrakstrinum.
[smbr. viðmerking til § 8 b].
8. Vegagrunnurin.
[smbr. viðmerking til § 8 a].
9. Tryggingargrunnurin.
Tað verður vist til viðmerkingar til § 11, samstundis verður skilað til, líkindini ætlast at vera tey bestu til nú at seta í verk eina fullfíggjaða fólkatryggingarlóggávu.
10. Kirkjugrunnurin.
Føroyska prestajørðin ella virði kemur um 750.000 og verður løgd til kirkjugrunnin [smbr. viðmerk. til § 8 a].

Samandráttur.

A: Fíggjarætlan ríkiskassans 1942:

a. gjøld		kr. 2.586.800,00	
b. inniløgur		- 318.400,00	kr. 2.268.400,00
frá gongur m. a.			
VIII 1) vrakarar	kr. 10.000,00		
2) Føroya Fiskaexport	- 2.000,00		
3) Flutt t. Sjóvinnug.	- 40.000,00		
IX 1) Kirkjugrunnurin	- 35.000,00		
XV Rentur	- 66.500,00		kr. 153.500,00
			kr. 2.115.000,00

B: Fíggjarætlan tingsins 1942:

gjøld		kr. 1.249.000,00		
frá gongur m. a.:				
X 9) Príseftiransing v. m. flutt til valutar	kr. 25.000,00			
10) social mál	- 65.000,00			
refusiónur do.	- 64.000,00			
XIII „Stuiril"	- 10.000,00			
XIV Rentur	- 10.000,00			
XV socialrokningini	- 50.000,00	224,000,00	1,025.000,00	
			kr. 3,140.000,00	

Sum ávist her eru fíggjarætlanir ríkiskassans og løgtingsins fyri 1942 við áðurnevndu undantøkum grundarlagið undir uppskoti minnilutans.

Dýrtíðarviðbøtur o. o. gjøld eru íroknaði.

Annars verður vist til viðmerkingarnar til hvørja einstaka grein.

Tær av minnilutanum tilætlaðu fíggjarligu nýskipanir, sum tørva lóggávu kunnu ikki takast við í fíggjarætlanini 1942, men landsnevndin fær tað álagt beinanvegin at fara undir at kanna fíggjarviðurskitfini eftir, gera uppskot til eina meira einfalda landsstjórn og hartil eftirkanna inntøkulíkindini sum ávist frammanfyri — alt tó uttan at skarva vælfingin rættindi einstaklinga.

Tingið kemur tá skjótast gjørligt saman fyri at viðgera slík mál, so tey kunnu koma í gildi innan hetta fíggjarárið.

Prentsmiðjan Ziska.

Nevndarálit

í

løgtingsmáli nr. I 2/1941: (Figgjarætlan fyri amtsgrunnin).

Landsnevndin hevur lagt fyri tingið uppskot til figgjarætlan fyri amtsgrunnin fyri 1942.

Nevndin mælir til at góðkenna uppskotið við hesum broytingum:

Ad *Útreiðslur.*

D. 1. Bróstsjúkrahúsið 50.000 kr. verður hæðkað til 63.660 kr., sambert tingsamtykt í brústsjúkrahúsmálinum.

D. 3. „Naina" 1.000 kr. verður hæðkað til 2.000 kr.

F. 1. Læraralønir 110.000 kr. Samtykt er at játta viðvíkjandi ítróttalæraranum 2.060 kr. Talan er um at bøta korini hjá ferðalærarum, og útreiðslurnar hartil ætlast til 7.000 kr. Á sama hátt er talan um hæðkan av løn hjá lærarum í Klakksvík og Vági meirútreiðsla 3.000 kr. og meirútreiðsla til vikarar ætlað 2.000 kr. Beinast er tí at hæðka tær ætlaðu 110.000 kr. til 124.000 kr.

Nýtt F. 7. Tingið hevur játtað til fornmenja rannsóknir 1.000 kr.

F. 8. Játtað er til kvæðaavskrivan 1.000 kr.

F. 9. Til A. Degn er játtað 600 kr.

F. 10. Til Sverre Paturssón 600 kr.

F. 11. Til friðhalgan av vøtnum 1.000 kr.

Nýtt G. 4. Føroya búnaðarfelag 600 kr. er játtað til administratión.

G. 5. Landbrúksráðnum er játtað 1.000 kr. til grísahald.

G. 6. Til húsdjóraalan 5.000 kr.

H. Fiskivinna, 5.000 kr. verður hæðkað við 45.000 kr., serstakliga til veitan av bátalánum gjøgnum landsnevndina. Til fiskiviðgerð kann verða talan um at nýta 6.000 kr.

I. Til skrivstovuhald hjá verkfrøðinginum er játtað 900 kr.

M. „Smiril", 70.000 kr. verður hæðkað til 100.000 kr.

N. Vegir og havnir 300.000 kr. Eftir uppskoti í málinum: Vegætlan 1942/43 er ætlað at játta $^3/_4$ av 362.364 kr. = 271.773 kr. og hartil dýrtíðarviðbót 150.000 kr. Til Ilovs havn er játtað $^3/_4$ av 2.500 kr. = 1.850 kr. og til lendibrúgv í Norðragøtu verður veitt 6.000 kr. Ialt verða hesar útreiðslur at seta til 429.623 kr.

S. Landsnevndini til uppdyrkingararbeiði 25.000 kr. Undan krígnum hevur vanliga tey seinastu ár verið veitt 50.000 kr. árliga úr ríkiskassanum og harvið 1 kr. pr. arbeiðsdag sum søndarpening. Nevndin mælir til, at henda samsýning verður hæðkað samsvarandi prístallnum, og ársakað av at amtmaðurin ikki ríkiskassans vegna nú kann veita tilíkan studning, mælir nevndin til, at tingið veitir upp til 75.000 kr.

T. Landsnevndin til ymisk yrkismál 10.000 kr. verður hæðkað til 20.000 kr.

X. Kreppufyriskipanir (prískontrol, spreingiknøttar o. t.) 25.000 kr. Hetta mælir nevndin at hæðka til 50.000 kr.

Y. Til økonomiska grunnin 50.000 kr. Hetta er samtykt at hæðka til 80.000 kr.

O. Dýrtíðarviðbót til ellisrentunjótarar o. a. 70.000 kr. Av ti at prístallið er stigið, má henda útreiðsla fyri fíggjarárið 1942/43 ætlast so:

Ellisrentunjótarar	75.000 kr.
Invalidurentunjótarar	6.000 kr.
Sinnissjúk í heimarøkt	1.800 kr.
	82.800 kr.
Dýrtíðarviðbót til einkjubørn	16.000 kr.
Hækkan av viðbót til ellisrentunjótarar	14.000 kr.
	112.800 kr.

Umsókn er frá lærarafelagnum um dýrtíðarviðbót. Í øðrum málið verður mælt til at geva landsnevndini heimild til, um hon heldur tað neyðugt, til hesar tænastumenn eina í líknandi tilfellum at nýta upp til 50.000 kr. Tær samlaðu útreiðslur undir Ø verða tí at hæðka til 168.000 kr.

Nýtt A a Til telefonverkið er samtykt at rinda lán, sum verkið hevur veitt Klakksvíkar sjúkrahúsi 14.175 kr. 05 øyr.

Nýtt A b Til skaðabøtur 100.000 kr. Av óveðri eru skaðar hendir á lendingar og ymiskt annað. Landsnevndini verður tí givið í hendi at nýta 100.000 kr. sum fyribils gjald, lán ella studning til skaðabøtur.

Ad *Inntokur.*

Ad 2. Løgtingsskattur 600.000 kr. Hesin skattur kann eftir brævi frá gjaldstovuni og amtmanninum ætlast at geva 1,2 mill. kr.

Ad 4. Ríkisstudningur til vegir. Hetta kann ikki verða roknað við.

Ad 10. Álíkuað kommununum 50.000 kr. Hetta er samtykt at hæðka til 91.000 kr.

So statt setur nevndin fram hetta

Uppskot
til
figgjarsamtykt fyri amtsgrunnin 1942.

Inntøkur.

1.	Jarðaskattur	kr.	8.500,00
2.	Løgtingsskattur	„	1.200.000,00
3.	Tollur	„	500.000,00
4.	Skipagjald	„	5.000,00
5.	Handilsloyvir	„	1.000,00
6.	Vinningsbýti	„	6.000,00
7.	Ríkisstudningur	„	3.000,00
8.	Stuttleikaskattur	„	15.000,00
9.	Álíknað kommununum	„	91.000,00
		kr.	1.829.500,00

Útreiðslur.

		Kr.		
A.	Løgtingskostnaður:			
	1. Tingmannaløn o. a.	40.000		
	2. Prentan o. t.	10.000		
	3. Løgtingshúsið	4.000		
	4. Skrivstovan	18.000	kr.	72.000,00
B.	Dóms- og lógreglumál		„	10.000,00
C.	Valum viðvikjandi		„	2.000,00
D.	Sjúkrahús, lækuar o. t.:			
	1. Sjúkrahúsini	175.000		
	2. Brústsjúkrahúsið	63.660		
	3. „Naiua“	2.000		
	4. Farsóttir	7.000		
	5. Ljósmøður	4.500		
	6. Læknar	5.000		
	7. Karantinútreiðslur	1.000		
	8. Annað	4.500	„	262.660,00
E.	Ferðaútreiðslur sýslumanna		„	2.000,00
F.	Skúla- og mentunarmál:			
	1. Læraralønir	124.000		
	2. Studningur til skúlabørn	1.400		
	3. Ferðalagsútreiðslur skúlabarna	600		
	4. Studningur til læraraskúlanæmingar	1.000		
	5. Studn. til amtsbókasavnið	5.060		
	6. Annað	2.000		
	7. Fornmenja rannsóknir	1.000		
	8. Kvæðaavskrivan	1.000		
	9. Studn. til A. Degn	600		
	10. „ „ Sverre Patursson	600		
	11. Friðhalgan av vøtnum	1.000	„	138.260,00
			kr.	486.920,00

		flutt: kr.	486.920,00
G. Landbúnaðurin:			
1. Jarðagrunnurin	10.000		
2. Búnaðarnevndir	2.500		
3. Annað	1.000		
4. Føroya búnaðarfelag administratión	600		
5. Til grísahald	1.000		
6. Húsdjóralan	5.000		
		„	20.100,00
H. Fiskivinnan		„	56.000,00
I. Løgtingsverkfrøðingurin		„	10.900,00
K. Djóralæknin		„	2.600,00
L. Garanti fyri havnalán		„	12.000,00
M. „Smiril"		„	100.000,00
N. Vegir og havnir		„	429.623,00
O. Vegfondin		„	10.000,00
P. Einkjubørn		„	20.000,00
Q. Til grunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn		„	10.000,00
R. Ymist		„	10.000,00
S. Landsnevndin til uppdyrkingararbeiði		„	75.000,00
T. Landsnevndin til ymisk yrkismál		„	20.000,00
U. Til socialhjálp		„	100.000,00
V. Rentur		„	30.000,00
X. Kreppufyriskipanir (priskontrol, spreingiknøttar o. t.)		„	50.000,00
Y. Til økonomiska grunnin		„	80,000,00
Z. - kirkjugrunnin		„	20.000,00
Æ. Fimleikagrunnur Føroya		„	2.000,00
Ø. Dýrtíðarviðbót		„	168.000,00
Aa. Telefonverkið viðv. lán til Klakksvíkar sjúkrahús		„	14.175,05
Ab. Til skaðabøtur		„	100.000,00
Munur		„	7.181,95
		kr.	1.829.500,00

VIÐMERKINGAR:

1) Av avlopinum verða 25 % at nýta til eykaavbetalan av skuld, 25 % at leggja í socialgrunn tingsins og 25 % at leggja í vinnulívsgrunn løgtingsins.

2) Um avlop verður tøkt fyri 1941, verður landsnevndini gívið heimild til at leggja 25.000 kr. í „eftirlønargrunn løgtingsins", eins og nevndin verður umbiðin at gera uppskot til reglur fyri grunnin at leggja fyri tingið.

Fíggjarnevndin, 15. november 1941.

P. M. Dam. *J. P. Davidsen.* *L. Zachariasen.* *J. Poulsen.*

Kr. Djurhuus. *J. Paturssen.* *P. Pelersen.*

Nevndarálit

í løgtingsmáli nr. I-3/1941:

Fíggjarætlan fyri økonomiska grunnin

og løgtingsmáli VIII-4/1941:

Studningur til brýr og lendingar.

Uppskot til fíggjarsamtykt fyri økonomiska grunnin fyri 1942 er lagt fyri tingið av landsnevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja uppskotið við hesum broytingum:

Ad A. Brýr og lendingar 10.000 kr.:

Nevndin setir fram uppskot um at játta 20.017 kr. 25 oyri. Studningarnir verða veittir eftir teinnum umsóknum, sum liggja fyri, og teimum kostnaðarætlaðum, sum verkfrøðingur og áltismenn tingsins hava gjørt, og undir vanligum treytum. — Studningarnir eru bert galdandi, um arbeiðið verður gjørt í 1942.

Ad B. 2. Studentaskeiðið 15.000 kr.:

Fyrlstøðumaðurin hevur ætlað undirskotið til	14.600 kr.
Hertil kemur ætlað inntøka frá statinum, sum fyribils ikki er tøk	3.400 —
Til møguliga lønhækkan o. t.	4.500 —
	22.500 kr.

Ad B. 3. Skúlabókagrunnurin 500 kr.:

Tingið hevur samtykt at hækka henda studning til 1000 kr. fyri 1942.

Ad B. 4. Føroya Fólkaháskúla 3000 kr.

Hetta verður vegna dýrtíðina hækka til 4000 kr.

Ad C. Vísindi, bókmentir o. t.:

C. 4. Skjalasavnið 2675 kr. Hetta verður hækkað við 780 kr., svarandi til dýrtíðarviðbót fyri tann partin av lønini, sum tingið rindar til arkivarin.

C. 6. Studerandi 1500 kr. Hetta verður hækkað til 2500 kr. og at innbetala til amtmannin ríkiskassans vegna.

Nýtt pkt. 8. Barnablaðið 400 kr. Hetta er játtað.

Ad D. 1. Eftirløn til frk. Berg: Verður hækkað við dýrtíðarviðbót 200 kr.

Ad D. 4. Barnaheimið 1000 kr.: Landsnevndin fær heimild til at veita 500 kr. aftrat, um tørvur verður til tess.

Ad D 7. Handverkarar og jarðabrúkarar at læra og handilsskúlanæmingar 2000 kr. verður hækkað til 3000 kr.

Nýtt pkt. 9. Svimjingarhyljar 750 kr. Hetta er játtað.

Hereftir verða útreiðslurnar hækkaðar til kr. 80.782,25. Grunnurin hevði 1/1. 1941 tilgóðar hjá amtsgrunninum kr. 24.155,92. Nevndin mælir til, at inntøkutáttarin: Innflutningsgjald verður hækkaður til 80.000 kr.

Nevndin setur so statt fram hetta

Uppskot

til

fíggjarsamtykt fyri økonomiska grunnin 1942.

Útreiðslur.

	kr.	oyr.	kr.	oyr.
A. Brýr og lendingar.				
1. Svínoyareiði, 3/4 av 6000 kr. = 4500 kr. í 2 ár à	2250,00			
2. Brúgv um „Stóra", Klakksvík, 3/4 av 13200 kr. = 9900 kr. í 4 ár à	2475,00			
3. Fjørugarður í Fuglafirði: Til tilfar upp til	1000,00			
4. Lending við Sjógv á Strondum, 3/4 av 6800 kr. = 5100 kr. í 2 ár à	2550,00			
5. Umvalan av lendibrúgv í Norðragøtu: Til tilfar upp til	1650,00			
6. Lending í Syðrugøtu: Til tilfar upp til 4000 kr. í 2 ár à	2000,00			
7. Brimverja í Kirkjubø, undir fjørugarði, undir líkhúsi og 15 mtr. norðanfyri neystuni, 3/4 av 3228 kr.	2421,00			
8. Til umbøtan av havnaplássinum í Haldórsvík, 3/4 av 2100 kr. = 1575 kr. í 2 ár à	787,50			
9. Brúgv yvir „Høgadalsá", Kaldbak, 3/4 av 2060 kr. = 1545 kr. í 2 ár à	772,50			
10. Til betonmúr „yvir millum gjáir", Vestmanna	200,00			
11. Bátadráttur við Hvalbiareiði, 3/4 av 2000 kr. = 1500 kr. í 2 ár à	750,00			
12. Lendingin í „Vikargerði", Fróðbø, 3/4 av 5400 kr. = 4050 kr. í 2 ár à	2025,00			
13. Neystadráttur undir Tvøroyrabakka, 3/4 av 4545 kr. = 3408,75 kr. í 3 ár à	1136,25		20.017,25	

	kr.	øyr.	kr.	øyr.
B. Skúlamál:				
Flutt =			200 17,25	
1. Eftirlønargrunnur lærara	2000,00			
2. Studentaskeiðið	22500,00			
3. Skúlabókagrunnurin	1000,00			
4. Føroya Fólkaháskúla	4000,00			
5. Læraranámskeið	500,00			
6. Bygdanæmingar á studenta- og preliminærskeiðinum	8000,00			
7. Studningur til lærdaskúlalesnað	4000,00		42.000,00	
C. Vísindi, bókmentir o. t.:				
1. J. H. O. Djurhuus	500,00			
2. Varðin	1000,00			
3. Føroya Forngripafelag	300,00			
4. Skjalasavnið	3455,00			
5. „Føroya kvæði"	1000,00			
6. Studerandi í Danmark	2500,00			
7. Mentunargrunnurin	500,00			
8. Barnablaðið	400,00		9.655,00	
D. Ymist:				
1. Eftirløn til frk. Berg	1660,00			
2. Honorar til frk. Bærentsen	200,00			
3. Fráhaldsfeløgini	500,00			
4. Barnaheimið	1000,00			
5. „Røde Kors"	500,00			
6. Træplanting	1000,00			
7. Handverkarar og jarðabrúkarar at læra og handilsskúlanæmingar	3000,00			
8. Ítróttasamband Føroya	500,00			
9. Svimjingahvljar	750,00		9.110,00	
			80.782,25	

Inntøkur:

1. Grind	500,00
2. Stórhvalaveiða	— —
3. Av innflutningsgjaldi	80.000,00
Munur	282,25
	80.782,25

Viðmerkingar:

1) Verkfrøðingurin verður álagdur at gera kostnaðarætlan fyri:
   a) lendibrúgv í Ánanum, b) brúgv um „Stóra" í Funningi,
   c) lendibrúgv í Funningsfirði, d) lendibrúgv á Signabø,
   e) lending í Norðradali, f) viðkan av lending á Argjum,
   g) umvølan av Hvalbiareiði.
2) Studningur kann ikki verða veittur til lending Hans Jacobsens, Haldórsvík.
3) Svarað verður Jens P. Jacobsen og Carl Østerø, at studningur er játtaður til lendibrúgv í Skálabotni undir ætlanini 1942/43.

Fíggjarnevndin, 31. oktober 1941.

P. M. Dam. *J. P. Davidsen.* *L. Zachariasen.* *J. Poulsen.*
Kr. Djurhuus. *J. Paturson.* *P. Petersen.*

Statens Indtægter: Færøerne.

	Budget 1940/41:	Indtægt 1940/41:	Forslag 1941/42:
Pensionsfradrag (Finansm.)	6.440,00	4.261,13	4.130,00
Vragningsafgift	3.000,00	5,00	— —
Bøder		300,00	
Kredslæger Boligfradrag	1.890,00	1.890,00	1.890,00
Refusion Amtslægebolig		184,75	
Refusion vedr. Jordremødre		7.856,25	4.000,00
Indbet. v/ Dr. Stærmose		200,00	2.400,00
Finansinstitut		448,50	
4 Sysselmænd	1.483,00	1.483,20	1.483,00
Uvisse Indtægter	6.000,00	5.701,86	6.000,00
Sygefradrag		561,36	742,00
Politikontoret		2.224,05	2000.00
Domsmænd		835,00	
Præsternes Befordring (Kirkefonden)	2.400,00	2.400,00	2.400,00
Fyrvæsenet	2.000,00	4.113,24	4.000,00
For meget udbet. Flytteudg.		25,60	
Gebyrer for Udstykning	400,00	— —	1.000,00
Kongs- og Matrikulskat	3.250,00	3.936,70	3.936,70
Amtmanden	1.440,00	1.440,00	1.440,00
Chefen Oppebørselsk.	818,00	828,00	828,00
Overskud Amtets Kontorh.		815,89	
Tilskud Oppebørselsk.		5.000,00	5.000,00
Diverse (Island)		1.186,91	
Folketingsmands Rejse (250 Dollars)		1.313,50	
Refusion Særforsorg	12.000,00	11.335,94	12.000,00
— Aldersrente	38.600,00	38.595,54	38.000,00
— Særforsorg		240,00	
— Hjælpekasser		7,50	
— Enkebørn		574,50	
— Underholdsbidrag		180,39	
Diverse		262,50	
Gebyr Kedeltilsyn		30,00	
Stempling Almanakker		367,41	400,00
Eksamensafgifter		100,00	200,00
Retsgebyrer Dommeren	22.000,00	21.735,48	22.000,00

	Budget 1940/41:	Indtægt 1940/41:	Forslag 1941/42:
Lanternecertificater		64,00	60,00
Fartscertificater		332,00	300,00
Sparekassetilsyn		71,70	
Prøvekammeret		237,70	200,00
Eksamensgebyrer Handelsskoler		294,00	300,00
Skolefonden til Understøttelse Enke		200,00	200,00
Realskolen til Pensioner		694,96	680,00
Folkeskolelærere Halvdelen Pensionsfradrag		4.834,21	5.100,00
Statsgældskontoret		164,84	
Udenrigsministeriet		105,99	
Den færøske Invalidefond		13.506,73	14.000,00
Bolig Postmester og Kontrollør	1.788,00	1.788,00	1.788,00
Postvæsenet	135.000,00	188.684,44	182.012,00
	238.509,00	331.370,72	318.439,70
Renter og Afdrag Statslaan	90.000,00	174.132,08	90.000,00
Afdrag Kornkøb	50.900,00	50.895,20	
— Medicinkøb	18.000,00	20.676,55	
— Udrustningslaan	600.000,00	526,796,49	18.000,00
Kartoffelkøb		14,768,40	
Vareforsyningen		319.273,68	
Diverse		213,26	
Stempling Pengesedler		2.200,00	
Jordfonden til Stiftsmidlerne		34.687,50	84.000,00
Betaling for Kulkøb (Marinem.)		3.740,00	2.400,00
Universitetskvæsturen Renter og Afdrag Amtsf.	8.500,00	9.620,00	9.620,00
Grønlands Styrelse (diverse)		12.250,24	
Afdrag Thorsh. Skipasmiðja		750,00	1.500,00
Erstatning Varer „Amerika"		113.858,21	
Erhvervenes Laanefond Renter og Afdrag		77.513,61	20.000,00
	1.005.909,00	1.692.775,94	543.959,70

Statens Udgifter: Færøerne.

	Budget 1940/41:	Forbrugt 1940/41:	Forslag 1941/42:
A. Dyrlægen	6.050,00	6.050,00	6.325,08
Husdyrsygdomme	500,00	38,67	500,00
B. Landbrugsraadet	100.000,00	100.000,00	100.000,00
do. ekstraordinært	50.000,00	50.000,00	
C. Pensioner (Finansm.)	11.234,00	17.062,76	24.000,00
D. Toldassistenten Løn	4.483,00	4.674,12	
do. Dagpenge	2.190,00	2.190,00	
E. Overvrager og 5 Kontrollører	19.236,00	19.476,00	15.000,00
Kontorhold	750,00	745,76	750,00
Særlige Ydelser	750,00	160,00	200,00
Fornyelse Fiskerflaaden	50.000,00	4.146,95	
Tilsyn Føroya Fiskaexport	2.000,00	2.000,00	2.000,00
Afsavn Løn		2.240,00	1.400,00
Diverse		540,00	600,00
F. Kolonibestyrer Joensens Enke	1.719,00	1.869,03	1.964,12
Økonoma og 2 Piger Sygehus Færingerhavn		1.318,00	
Susanne Olsen		800,00	2.400,00
G. Danberg		2.500,00	3.000,00
G. Navigationsbestyrer og 1 Lærer	13.918,00	14.634,03	15.348,00
Erhvervskommissionen	770,00	769,99	805,00
Skibstilsyn (4 Mand)	10.780,00	10.779,99	11.270,00
Mærkning Fartøjer	1.000,00	391,16	1.000,00
Registrering Honorar	270,00	270,00	270,00
Prøvekammer	1.140,00	1.140,00	1.140,00
Anna Simonsen	800,00	800,00	800,00
Th. Handelsskole		1.085,00	1.200,00
Teknisk Skole Tveraa		1.500,00	1.500,00
„ „ Thorshavn		1.400,00	1.500,00
„ „ Klaksvig		2.500,00	2.500,00
Diverse		874,00	1.000,00
Th. Navigationsskole		6.000,00	6.000,00
Elevunderstøttelse		550,00	600,00
Skibsmaaling		121,80	150,00
Censurh. Navigationsskolen		1.122,00	1.200,00
Lægeundersøgelse Søfølk		650,00	650,00
Bank- og Sparekassetilsyn		100,00	100,00
Rejseudgifter m. v. Skibstilsyn		2.643,97	2.700,00
H. Amtslægen	4.787,00	4.787,00	5.500,00
3 Kredslæger	17.546,00	17.716,20	18.577,20
Bygningsudgifter	3.000,00	2.079,13	2000,00
1 Sanatorielæge	10.000,00	10.000,00	10.000,00
6 Kommunelæger	20.000,00	20.273,33	20.000,00
Jordemødre jfr. Indtægtspost	7.500,00	23.012,50	13.000,00
Sanatoriet	57.000,00	56.941,00	57.000,00
Sygehusene	98.700,00	111.875,50	123.200,00
Kysthospitalet	7.500,00	5.376,00	7.500,00
D. A. H. Tuberkuloseafd.	21.900,00	15.495,00	20.000,00

	Budget 1940/41:	Forbrugt 1940/41:	Forslag 1941/42:
Amtskommunen	3.000,00	3.000,00	3.000,00
Epidemiudgifter	10.000,00	11.103,27	11.000,00
Afholdsforeninger	500,00	500,00	500,00
Sanering Kommunerne		45.914,00	
Poul Johannesens Enke		3.054,00	2.100,00
Flyttegodtg. Læge		1.703,15	
Føroya felag móti tuberklasjúku		1.358,00	1.500,00
Tilsynsf. m. Bygninger		933,33	500,00
I. Dommeren	9.420,00	9.420,00	9.840,00
Dommerkontoret	17.721,00	15.979,90	17.800,00
Politimesteren	9.920,00	9.920,00	10.440,00
Politibetjent	4.680,00	4.680,00	2.090,00
Til 2 komm. Betjente	3.168,00	3.168,00	3.312,00
Politikontoret	28.932,00	39.369,67	27.000,00
6 Sysselmænd	29.028,00	29.153,00	31.386,00
1 Sognefoged	3.300,00	3.300,00	3.450,00
Kontorhold Sysselmænd	13.000,00	18.677,32	25.000,00
Bygninger	3.000,00	5.826,95	3.200,00
Dagpenge Domsmænd		2.238,58	2.500,00
Politibetjent Andreasen		810,00	3.240,00
2 Enker		1.135,00	1.280,00
Eftersøgning (Forlis)		23,50	
Politibetjent Djurhuus		300,00	
Sagførerhjælp		48,00	
Mønstringsgebyrer		194,10	
Beskikkede Sagførere		192,50	200,00
Interneering Flyvere		3.694,75	
Valglister		255,75	250,00
Konstitutionshonorar Politi		190,00	
K. 11 Præster	72.600,00	72.550,12	77.720,52
2 pension. Præster	3.100,00	3.107,96	3.593,96
Bygninger	10.000,00	6.188,12	18.000,00
Erstatning Tiende	7.800,00	7.800,00	7.800,00
Konstitutionshonorar		1.800,00	1.800,00
Husleje Provstin		700,00	2.100,00
Udg. Provstens nye Bolig		1.007,10	
Kontorhold		80,00	100,00
Offerpenge		429,13	500,00
Rejseudgifter		1.231,93	1.200,00
L. Husdyravlens Fremme	20.000,00	20.000,00	20.000,00
Forsøgsstationen	31.150,00	22.127,93	30.400,00
Landbrugskursus	1.300,00		
Landbrugskonsulenten	6.100,00	6.400,00	6.650,04
M. Fyrvæsenet fast Personale	37.000,00	31.187,23	36.000,00
Honorarlønnet Personale	15.000,00	16.296,97	17.000,00
Drift	18.000,00	18.890,69	19.000,00
N. Landinspektør	1.000,00	615,19	1.000,00
Udskiftning		1.050,00	1.000,00
O. Bankrente af Overskud	20.000,00	18.191,42	30.000,00
Andre Renter		3.815,02	4.000,00
Rente af Bevis vedr. Kirkeboruinen	300,00	98,00	98,00

	Budget 1940/41:	Forbrugt 1940/41:	Forslag 1941/42:
P. Amtmanden	20.372,00	20.372,00	22.076,04
Amtskontoret	32.000,00	31.530,00	32.000,00
Boligen	2.000,00	1.933,10	2.000,00
Særlig Ydelse		500,00	500,00
Chefen Oppebørselsk.	8.318,00	8.348,00	8.726,04
Kontoret	26.566,00	33.071,45	38.345,00
Kst. Fuldmægtig			5.749,08
Tjenestebolig	800,00	564,76	1.000,00
Islandsdelegation		1.073,54	
Q. Aldersrente	386.000,00	386.011,70	380.000,00
Aldersrente Jan. Kv. 1938	10.000,00	1.504,69	
Børn af Enker	15.000,00	17.004,11	10.000,00
Hjælpekasser	1.100,00	286,22	500,00
Børnehjem og Børnehaver	3.000,00	6.300,00	7.000,00
Sygekasser	80.000,00	88.527,00	90.000,00
Befordringskasser	15.000,00	13.357,00	15.000,00
Underholdsbidrag	5.000,00	11.350,12	12.000,00
Invalideforsikring	8.000,00		
Særforsorg	12.000,00	4.735,01	10.000,00
Forligsmænd	2.000,00	1.480,29	1.500,00
Ulykkesforsikringsraadet	5.170,00	5.280,00	5.430,00
Lægeundersøg. Invalideforsikrede	2.000,00		
Fonden for forulykkedes efterladte	216,00		432,00
Børn af Enker (Kommuner)		22.627,56	
Kontrolleret Familiepleje		1.274,27	6.000,00
Alderdomshjem		16.823,25	20.000,00
Carneges Heltefond		200,00	200,00
Hjemsendelse Sømænd		117,50	
Værgeraadsudgifter		1.613,78	2.000,00
Invaliderente		621,00	576,00
Særforsorg Pries		1.093,50	1.545,00
Maskintilsyn		1.188,00	1.212,00
Rejseudgifter		151,25	150,00
Rejsedirpt Ulykkesforsikringsraadet		562,00	
R. Deputat Skolevæsenet	221,00	221,00	224,00
Tilskud Realskolen	30.500,00	28.594,11	30.000,00
Lærerlønninger	274.000,00	317.736,18	350.000,00
Pensioner	44.000,00	57.102,85	50.000,00
Efterhidtægt	800,00		
Seminariet	12.000,00	11.775,93	12.500,00
Idrætsinspektør	900,00	899,00	900,00
Aftenskoler	8.000,00	3.794,30	8.000,00
Feriekursus	2.500,00		
Gymnastiksale	16.000,00	8.000,00	
Undervisningsmateriel	9.000,00		
Inspektion Bygdeskoler	1.000,00	307,20	500,00
Højskolelevtilskud	1.500,00	2.125,00	2.500,00
Bibliotek og Arkiv	9.850,00	9.850,00	9.850,00
Sløjdlære		400,00	400,00
Føroya Fólkaháskúli		1.000,00	1.000,00
J. H. O. Djurhuus		300,00	1.200,00

	Budget 1940/41:	Forbrugt 1940/41:	Forslag 1941/42:
H. A. Djurhuus			600,00
Alderstillæg Vandrelærere		1.800,00	2.700,00
Diverse		1,38	
Færøsk Kirketidende	270,00		
A. Løwe	300,00	300,00	300,00
Universitetskvæsturen Rente til Skolefonden		2.176,13	2.500,00
S. Hjemsendelse udenlandske Sømænd		169,00	
T. Tilskud Veje	100.000,00	30.235,50	100.000,00
Tilskud Vejfonden	26.000,00		10.000,00
U. Diverse	100.000,00		
V. Den færøske Invalidefond		38.520,47	40.000,00
X. Postvæsenet			
Løninger	157.000,00	157.573,51	180.000,00
Kontorhold	4.000,00	6.464,67	10.000,00
Befordring med postførende Fartøjer	120.000,00	100.822,40	120.000,00
Bygninger	4.000,00	3.937,33	5.000,00
Pensioner og Understøttelser	23.000,00	23.110,32	26.000,00
	2.183.058,00	2.475.843,56	2.586.805,08
Laan til Vareforsyningen	700.000,00	457.041,09	700.000,00
Udrustningslaan	650.000,00	518.253,45	
Diverse jfr. Indtægtspost (Stempling Pengesedler)		2.362,44	
Hypothekbanken Kupon af Obligationer		1.350,00	1.350,00
Rente af Statslaan		2.838,75	3.000,00
Erhvervenes Laanefond til Arbeidsmanna kolavirki		10.000,00	
	3.333.058,00	3.467.684,29	3.291.155,08

Nevndarálit

í løgtingsmáli nr. VIII-5/1941:

Ætlan viðvíkjandi vegum og lendingum 1942/43.

Løgtingsskrivstovan hevur lagt fram uppskot 2. september 1941 sum grundarlag fyri viðgerð av málinum. Nevndin hevur haft samráð við amtmannin og løgtingsverkfrøðingin og gingið ígjøgnum uppskotið og tær umsóknir, sum liggja fyri.

Viðvíkjandi uppskotinum, punkt 7, frá løgtingsskrivstovuni um ríkisstuðning upp til 100.000 kr. hevur amtmaðurin greitt frá, at hann kann ikki ríkiskassans vegna velta stuðning til vegir fyri 1942/43. Nevndin hevur í hesum spurningi tikið ta støðu, at um amtmaðurin ikki heldur seg kunna játta tær nevndu 100.000 kr., má tingið bera útreiðslurnar, um ikki samband er komið í lag við ríkisstýrið áðrenn 1. apríl 1942, og vil nevndin í hvørjum tilfelli mæla til, at umsóknin verður send til ríkisstýrið, tá samband aftur kemur í lag. Punkt 7 kann tí standa, sum tað ljóðar í uppskotinum frá skrivstovuni.

Nakrar kommunuur hava longu gjørt alt eftir 2-ára ætlanum, og aðrar eru skjótt lidnar. Vegna arbeiðsloysi kann tað verða neyðugt at seta í verk vegarbeiði. Nevndin setur tí fram uppskot til ymiskar eykastuðningar.

Til punkt 9 um, at kommunurnar fáa til vegar neyðturvulig arealir og vegtilfar, mælir nevndin, at tað verður sett, at kommunurnar eisini fáa til vegar sand, grús, grót o. t. til lendingar.

Í uppskotinum frá løgtingsskrivstovuni eru ikki tiknar við lendingar, sum vóru skitseraðar fyri 1942/43, men sum skrivstovan hevur hildið ikki koma at vera gjørdar.

Nevndin heldur, at hesir stuðningar eiga eisini at verða settir upp. Tó er at siga, at Eiðis kommuna hevur brúkt til vegir tær 7.000 kr., sum vóru játtaðar fyri 1940/42 til lending, og sama er viðvíkjandi Nes kommunu, sum hevur brúkt 2.000 kr., sum vóru játtaðar til lending í Sóldarfirði, eins og Kvalbiar kommuna hevur samtykt at nýta til veg tær 18.000 kr., sum vórðu játtaðar til lending. Hesar kommunur kunnu tí sjálvsagt ikki aftur nýta hesar stuðningar, men mugu søkja tingið um nýggjan stuðning.

Av 5 ára ætlanini restar at gera fyri ca. 250.000 kr., harav løgtingsins partur verður 100.000 kr. umfram dýrtíðarvíðbót. Av 2 ára ætlanini resta ca. 320.000 kr., harav løgtingsins partur verður yvir 100.000 kr. umfram dýrtíðarvíðbót.

Nevndin heldur tað vera beint longu nú at seta uppskot um, at 200.000 kr. av yvirskotinum frá amtsgrunninum í 1941 verða settar á eina konto til at bera tær útreiðslur, sum tingið hevur bundið seg til viðvíkjandi studningi til vegir eftir nevndu 5 ára og 2 ára ætlanum.

Uppskot:

I. Í tíðarskeiðinum 1. apríl 1942 til 31. mars 1943 verður veittur studningur úr amtsgrunninum til vegir og lendingar:

a) Norðoya sýsla	$^3/_4$ av	40.780 kr.	.....	30.585 kr.
b) Eysturoya „	$^3/_4$ „	107.360 kr.	.....	80.520 kr.
c) Streymoyar „	$^3/_4$ „	40.360 kr.	.....	30.270 kr.
d) Vága „	$^3/_4$ „	34.860 kr.	.....	26.145 kr.
e) Sandoyar „	$^3/_4$ „	32.500 kr.	.....	24.375 kr.
f) Suðuroyar „	$^3/_4$ „	106.604 kr.	.....	79.953 kr.
		362.464 kr.		271.848 kr.

II. Iljálagt verður sett fram uppskot viðvíkjandi býti innanfyri hvørja sýslu og til eykastudningar fyri 1940/42.

III. Byggikostnaðurin er útroknaður við arbeiðsløn 70 oyr. um tíman. Løgtingið veitir $^3/_4$ av dýrtíðarviðbót, soleiðis at dýrtíðarviðbótin roknast sum hækkan av nevndi tímaløn við prístillegginum.

IV. Viðvíkjandi studningum, sum eftir uppskotinum eru at ráða yvir, uttan at tað í uppskotinum eru settir ávístir vegir kann landsnevndin í samráð við kommunustýrið avgera, hvørjir vegir studningurin verður nýttur til.

V. Parturin, sum kommunurnar hava at rinda, verður $^1/_4$.

VI. Løgtingið rindar $^3/_4$, men sokir ríkiskassan um at veita sum studning helftina av tí, sum tingið soleiðis rindar, tó ikki yvir 100.000 kr. fyri 1942/43.

VII. Um nakað verður spart innanfyri eina sýslu, kann tað verða nýtt í somu sýslu eftir avgerð av landsnevndini.

VIII. Kommunurnar fáa til vegar neyðturvulig grundstykkir og vegtilfar eins og grús, sand og grót til lendingar uttan endurgjald, undantikið fyri fluttning.

IX. Av yvirskotinum hjá amtsgrunninum 1941 verða 200.000 kr. settar á konto til rindan av tí, sum Løgtingið hevur bundið seg til at veita sum studning viðvíkjandi vegum og lendingum.

Veganevndin, Tórshavn, 28. oktober 1941.

J. P. Davidsen. *P. M. Dam.* *S. P. Zachariasen.* *Joh. M. Fr. Poulsen.*
H. Iversen. *J. Pálursson.* *S. Ellefsen.*

Studningur til vegir og lendingar.

Fíggjarárið 1942/43.

I. Norðoya sýsla.

VEGIR.

Kommuna:	*Bygd:*	*Plass í bygdini:*		*Kr.:*
Fugloyar		At ráða yvir		2.000,00
Svínoyar	Svínoy	Vegir		2.500,00
Viðoyar	Viðareiði	Framhald av vegnum til Leitið	3.250,00	
		Leitið — Hvannasund 400 m	4.400,00	
			7.650,00	
	Hvannasund móti Leitinum	100 m	1.000,00	
	Norðdepil og umliggjandi bygdir	125 m	1.000,00	
	Múli	70 m	490,00	10.140,00
Klakksvíkar	Klakksvík	Til vegir	20.000,00	
	Árnarfjørður	Umbyggjan av 200 m	600,00	20.600,00
Kunoyar	Kunoy	Umbyggjan av 500 m	1.500,00	
	Haraldsund	At ráða yvir	500,00	2.000,00
Húsu	Syðradalur	At ráða yvir	1.000,00	
	Húsum	150 m	1.050,00	2.050,00
Mikladals	Mikladalur	125 m	1.000,00	
	Trøllanes	70 m	490,00	1.490,00
				40.780,00

II. Eysturoya sýsla.

A)

Kommuna:	*Bygd:*	*Plass í bygdini:*		*Kr.:*
Funnings	Funning	Vegurin Funning Húsarætt:		
		Brúgv um 1 gjógv	1.500,00	
		Umbyggjan av vegi o. t.	1.000,00	
		Framhald av vegnum Gjógv—Funning 200 m	2.000,00	4.500,00
			At flyta	4.500,00

Kommuna:	*Bygd:*	*Plass í bygdini:*		*Kr.:*
			Flutt...	4.500,00
Oyndarfjarðar	Oyndarfjørð	2 stikvegir 230 m..	1.840,00	
		Stikvegur í bygdini 36 m.....	360,00	
	Elduvík	Framhald av vegi til Álvbeygg 150 m .	1.500,00	3.700,00
Fuglafjarðar	Fuglafjørður....	Framhald av uppdyrkingarveg 600 m.....	4.500,00	
	Hellurnar	Framhald av veg millum Hellurnar og Laxá 200 m..	1.500,00	6.000,00
Lorvíkar	Lorvík	Framhald av uppdyrkingarveg 100 m.....		3.000,00
Gøtu	Syðrugøtu	Breiðavegurin 150 m	1.050,00	
		Uppi á Gjógv 150 m	1.050,00	
		Gøtugjógv 150 m..	1.800,00	
	Norðagøtu	Uppi í Geil 300 m .	2.100,00	6.000,00
Nes	Sóldarfjørð	Framhald av uppdyrkingarveg 125 m.....	1.000,00	
	Lamba	Framhald av veg úti í Kass 100 m ...	800,00	
	Skipanes.....	Vegur 50 m.....	400,00	
	Toftir	Vegur til Hamar 250 m.....	3.750,00	
		Framhald av veg Nes—Eðuvík 270 m.....	2.050,00	8.000,00
Sjóar	Strendir	Follendisvegur 100 m	900,00	
		3 brýr.....	700,00	
		Seblendisvegur 100 m	900,00	
		Strendur — Morskranes 150 m	1.500,00	
	Skála	Skála—Skálabotn 200 m.....	2.000,00	
	Selatræð	Vegur suðureftir 200 m.....	1.600,00	
	Morskranes	Vegur norðureftir 150 m.....	1.200,00	
	Skálabotn	Vegur 150 m.....	1.200,00	10.000,00
Eiðis	Eiði.....	Framhald av veg norður í Fløur 600 m.....	5.400,00	
		Umvølan av vegi frá skúlanum	1.600,00	
		At flyta...	7.000,00	41.200,00

Kommuna:	*Bygd:*	*Plóss í byggtini:*		*Kr.:*
		Flutt...	7.000,00	41.200,00
	Norðskála.....	Framhald av veg frá rættargerðum niðan á tippi 220 m.....	2.000,00	
	Oyri	Oyrabakka móti túgvunl 110 m	1.000,00	10.000,00
				51.200,00

TIL LENDINGAR:

Sambert skitserada ætlan í álitinum 1939:

Gjógv	1.200,00	
Funning	3.000,00	
Oyndarfjørður	5.350,00	
Lervík	5.500,00	
Søldarfirði	2.000,00	
Rituvík	6.000,00	
Toftir	6.000,00	
Morskranes	3.000,00	
Skálafirði	5.000,00	
Eiði	12.000,00	
Svináir	1.500,00	
Oyri	1.000,00	
Oyrabakka	1.610,00	
Norðskála.....	1.750,00	
og harumframt		
Ljósú	3.250,00	56.160,00
		107.360,00

B) *Eykastudningur* til vegætlanina 1940/42:

Oyndarfjarðar kommuna	3/4 av	4.000 kr.
Fuglafjarðar „	3/4 „	3.500 kr.
Hellunar	3/4 „	1.500 kr.
Gøtu „	3/4 „	6.000 kr.
Nes „	3/4 „	11.000 kr.
Til vegin Glyvrar—Glyvradal	3/4 „	3.000 kr.
Strendur	3/4 „	3.000 kr.
Morskranes	3/4 „	1.200 kr.
Skálabotn	3/4 „	800 kr.
Eiðis kommuna	3/4 „	5.000 kr.

III. Streymoyar sýsla.

A)

Kommuna:	*Bygd:*	*Plóss í bygdini:*		*Kr.:*
Haldórsvíkar	Haldórsvík	Framhald av veg...	2.000,00	
	Tjørnuvík	„ „ „ ...	5.000,00	
	Langasandur ...	Brúgv um eina á ..	1.100,00	
Saksunar	Saksun	Uppdyrkingarvegur .	500,00	9.600,00
Hvalvíkar	Hvalvík	Vegur 170 m.....	2.060,00	
	Hósvík	Til veg	2.000,00	
	Streymnes	Framhald av veg móti Nesvík o. a.....	2.000,00	6.060,00
Kollafjarðar	Kollafjørður	Framhald av veg norður í Sandi 300 m.....	2.400,00	
		Vegur í Sigmabø 200 m.....	2.000,00	4.400,00
Kaldbaks	Kaldbak	Framhald av veg til Høgadalsá 150 m.....		1.200,00
Havnaruttanb.		Framhald av veg móti Havnadali 100 m.	1.000,00	
		Til veg móti Sundi .	2.000,00	3.000,00
Kirkjubøar		At ráða yvir til veg ella lending		2.000,00
Kvívíkar	Stykkið	80 m til lendingina.	1.100,00	
		Framhald av veg yvir á Heygar	500,00	
	Leynar	130 m oman á sandin	1.300,00	2.900,00
Vestmanna	Vestmanna	Framhald av uppdyrkingarveg 1000 m.....		9.000,00
Hests	Hestur	Framhald av uppdyrkingarveg 100 m	1.200,00	
	Koltur.....	At ráða yvir til veg.	1.000,00	2.200,00
				40.360,00

Samhart skitsernda ætlan í nevndarráðiti 1939:

Lending í Hesti	5.000,00	
Lending í Nólsoy	2.000,00	
Harumframt:		
Lending á Stykkinum	1.700,00	
Lending í Leynum.....	2.800,00	
Lending í Tjørnuvík	1.100,00	15.900,00
		56.260,00

B) *Eykastudningur* til 1940/42:

Hvalvíkar kommuna $^3/_4$ av 3.000 kr.

IV. Vága sýsla.

Kommuna:	*Bygd:*	*Plóss í bygdini:*		*Kr.:*
Sandavágs	Sandavágur	125 m í Giljatrø ...	1.000,00	
	Slættanes	228 m frá lendingini	2.230,00	3.230,00
Miðvágs	Miðvágur	250 m í Eggjatrø		2.000,00
Sørvágs	Sørvágur	300 m á Longubrekku		2.000,00
Bíggjar	Bø	125 m í bønum		1.000,00
	Gásadal			1.000,00
Mykines	Mykines	Til lending		2.130,00
	Gásadal	Til lending		1.500,00

Eftir skitseraðum plani í løgtingsáliti 1939:

Lending í Mykinesi	2.000,00
Bátahavn í Sandavági	17.000,00
Koyrikai í Sørvági	3.000,00
	24.860,00

B) *Eykastuðningur* til 1940/42:

Miðvágs kommuna til umbøtan av bryggjusporini	$^3/_4$ av 5.000 kr.
Sørvágs „	$^3/_4$ av 2.000 kr.

V. Sandoyar sýsla.

Kommuna:	*Bygd:*	*Plóss í bygdini:*		*Kr.:*
Sands	Sandur	Til veg til lendistøð úti á støð	2.500,00	
		Framhald av vegnum Sand—Skarvanes .	2.000,00	4.500,00
Skopunar	Skopun	At ráða yvir til veg		3.000,00
Skálavíkar	Skálavík	Vegur gjognum Heiðatrø		2.000,00
Húsavíkar	Skarvanes	Til Skarvanesvegin .	4.000,00	
	Dalur	Til uppdyrkingarveg	2.000,00	
	Húsavík	Vegur móti lendingini	1.000,00	7.000,00
Skúvoyar	Skúvoy	At ráða yvir til veg		1.000,00
				17.500,00

Sambart skitseraða ætlan í álitinum 1939:

Lending í Skálavík	5.000,00
Harumfram:	
Lending í Skúvoy	10.000,00
	32.500,00

B. *Eykastuðningur* til 1940/42:

Sand	1.000 kr.
Dal	2.000 kr.

VI. Suðuroyar sýsla.

Kommuna:	*Bygd:*	*Plás i bygdini:*		*Kr.:*
Hvalbiar	Hvalbø		7.000,00	
	Sandvík		3.000,00	10.000,00
Froðbøar	Froðba	Vegur út á Høvdan 220 m á 8 kr. og vegur uppi á Llamri 77,5 m á 16 kr...	3.000,00	
	Tvøroyri	Veg undir Tvørbrekku	15.000,00	
	Trongisvágur ...	Vegur vestur í Mýrarnar 179 m og ein brúgv og uppdyrkingarvegur sunnan á, 37 m ialt.....	4.000,00	
	Øravík	Vegur oman á kaiuna . 824,00		
		Uppdyrkingarvegur 22 m (frá Haldan Mortensens trø).. 176,00	1.000,00	
	Øravikslíð	Vegur oman á Gálgan 100 m	1.000,00	24.000,00
Fámjins				3.000,00
Hovs	Hovi	At ráða yvir til veg		2.000,00
Porkeris				4.500,00
Vágs	Vágur	Framhald av veg til træðirnar á norðaru síðu o. a.		14.000,00
		Bygdini Nes við Vági verður veitt $^3/_4$ av 3000 kr. til akveg frá neystinum á Nesi til akvegin Vág - Porkeri.....		
Sunnbøar	Sunnbøur	Framhald av vegnum		8.000,00

Sambart álitinum 1939:

Lending í Sandvík	6.850,00
Lending í Hvalbø	14.668,00
Lending í Fámjin	4.918,00
Lending í Porkeri	14.668,00
	106.604,00

B) *Eykastudningur* til 1940/42:

Hvalbø	$^{3}/_{4}$ av 3.000 kr.
Sandvík	$^{3}/_{4}$ av 3.000 kr.
Fámjin	$^{3}/_{4}$ av 3.000 kr.
Froðblar kommuna	$^{3}/_{4}$ av 7.000 kr.

Tingið góðkennir, at nýtt verður í hesum fíggjarári til 100 m í Trongisvági 1.071 kr., 100 m í Froðbø 1.709 kr. og 100 m í Øravík ætlað 800 kr.

A/S „Pære Arnfjeldende"e Bogtrykkeri, Thorshavn.

Amtsfondsálíkningin fyri 1942.

Søknar kommuna	Fólkatal	Skattainntøka		Eftir skattainntøkuni ½		Eftir samtykt løgtingsins		Tilsanvans	
		Kr.	øyr.	Kr.	øyr.	Kr.	øyr.	Kr.	øyr.
Fugloyar	241	129435	—	296	—	204	—	500	—
Svínoyar	230	80000	—	183	—	167	—	350	—
Viðoyar	483	279745	—	640	—	360	—	1000	—
Klakksvíkar	1804	1945000	—	4452	—	4548	—	9000	—
Kunoyar	197	80827	—	185	—	165	—	350	—
Mikladals	139	66368	—	152	—	148	—	300	—
Húsa	176	106947	—	245	—	155	—	400	—
Oyndarfjarðar	400	141143	—	323	—	177	—	500	—
Fuglafjarðar	902	643678	—	1473	—	2027	—	3500	—
Lorvíkar	443	268775	—	615	—	335	—	950	—
Gøtu	584	317300	—	726	—	524	—	1250	—
Nes	1438	929480	—	2127	—	1173	—	3300	—
Sjóar	1000	426331	—	976	—	724	—	1700	—
Eiðis	933	403400	—	923	—	677	—	1600	—
Funnings	434	143400	—	328	—	272	—	600	—
Haldórsvíkar	427	166900	—	382	—	318	—	700	—
Saksunar	42	21650	—	50	—	100	—	150	—
Hvalvíkar	452	114497	—	262	—	238	—	500	—
Kollafjarðar	439	139000	—	318	—	182	—	500	—
Kvívíkar	494	293278	—	671	—	429	—	1100	—
Vestmanna	884	863860	—	1977	—	1023	—	3000	—
Kaldbaks	118	40000	—	92	—	108	—	200	—
Havnar uttanb.	322	224000	—	513	—	887	—	1400	—
Kirkjubøar	114	38865	—	90	—	210	—	300	—
Hests	131	33990	—	78	—	72	—	150	—
Nólsoyar	258	83800	—	192	—	208	—	400	—
Sandavágs	570	425770	—	975	—	1525	—	2500	—
Miðvágs	666	337600	—	773	—	1327	—	2100	—
Sørvágs	755	780655	—	1787	—	1813	—	3600	—
Bíggjar	113	52000	—	119	—	181	—	300	—
Mykines	144	56500	—	129	—	71	—	200	—
Sands	645	253170	—	580	—	420	—	1000	—
Skopunar	376	155724	—	356	—	244	—	600	—
Skálavíkar	217	101275	—	232	—	168	—	400	—
Húsavíkar	240	75250	—	172	—	128	—	300	—
Skúoyar	168	51429	—	118	—	82	—	200	—
Hvalbiar	819	250598	—	574	—	426	—	1000	—
Froðbiar	1939	1492139	—	3414	—	2586	—	6000	—
Fámjins	228	61422	—	141	—	159	—	300	—
Hovs	209	66068	—	151	—	149	—	300	—
Porkeris	436	157525	—	361	—	239	—	600	—
Vágs	1406	1000100	—	2289	—	3211	—	5500	—
Sunnbøar	775	218373	—	500	—	400	—	900	—
Tórshavnar	3440	6361150	—	14560	—	16940	—	31500	—
	26231	19878417	—	45500	—	45500	—	91000	—

Nevndarálit

í løgtingsmáli nr. XIV-38/1941:

Bræv viðvíkjandi Íslandsarbeiðarunum.

Løgtingið hevur frá Andreas Ziska, J. H. Hjalt, Andrea Árting, Tom Nieulajsen o. fl. fingið bræv, dagsett 20. november 1941, um, at tingið gevur gjølla frágreiðing viðvíkjandi 2 mannum, sum fóru til Íslands í summar at arbeiða fyri bretsku hermaktina, og sum ikki komu aftur við hinum mannunum, sum vóru har í sama ørindum.

Nevndin, sum hevur fingið hetta mál til viðgerðar, loyvir sær hervið at greiða frá, hvussu gangdin hevur verið í málinum.

Eftir fyrispurningi frá bretska konsulinum í Føroyum um at fáa føroyskar arbeiðarar til Íslands at arbeiða, kom lýsing fram í føroyskum bløðum, dagsett 16. mai 1941 og undirskrivað av Hilbert, amtmanni, og A. Samuelsen, landsnevndarformanni. Í lýsingini varð sagt frá, at bretska hermaktin ynskti at fáa upp til 800 Føroyingar til arbeiðis í Íslandi í aldrinum 20—50 ár. Tað stóð teim fritt fyri at melda seg til hetta arbeiði, og sagt varð frá, at Bretlendingar vildu tryggja teim eina arbeiðstíð, sum skuldi vara minnst í 3 mánaðir. Eisini varð akilað til, at lønin, sum hesir arbeiðarir skuldu fáa, skuldi vera tann sama, sum íslendskir arbeiðarir fingu, sum hesir menn skuldu arbeiða saman við.

Ferðingin til og frá Íslandi var ókeypis.

Menninir skuldu fáa rúm at búgva í, skuldu sjálvir halda seg við mat, men fáa fríar kokkar. Ásett varð eisini av bretsku hermaktini, at løgtingið til hesar ætlaðu 800 arbeiðsmennirnar skuldu velja 3 álitismenn, og skuldu hesir menninir vera millumnmenn hjá Føroyingum við bretsku hermaktina í Íslandi og við íslendsku yvirvoldina.

Tað vísti seg skjótt, at færri menn enn ætlað melduðu seg til hetta arbeiði, og tá ið ferðin skuldi vera gjørd til Íslands, vóru bert 249 menn, sum komu við til hesa ferð. Afturat hesum komu 2 Føroyingar, sum staddir vóru í Íslandi frammanundan í bretskari tænsta.

Teir menn, sum landsnevndin peikaði á sum álitismenn, vóru hesir: Joen Rasmussen, Sørvágur, Abraham Abrahamsen, Strendur, og Ellender Ellendersen, Fámjin. Av tí at so fáir menn komu við til hetta arbeiði, varð ikki brúk fyri meira enn 2 álitismonnum, og síðstnevndi kom tí ikki sum álitismaður til Ísland, men sum arbeiðsmaður.

Mánadagin 26. mai fóru menninir av stað úr Tórshavn við tí bretska skipinum „Ben-May-Chree". Skiptið fór fyrst inn á Skálafjørð — ætlandi tí bíðað varð eftir fylgiskapi av herskipi — og fór fyrst haðani kl. 8 á kvoldi 29. mai í fylgi við bretskum herskipi.

Meðan skipið lá á Skálafirði, fóru sumnir av monnunum at knarra um, at teir lógu her fyri onga løn, og tað vóru nógvir av monnunum, sum ongan mat høvdu tikið við sær heimanífrá, tó at teir vistu, at treytirnar vóru tær, at teir skuldu halda seg sjálvir við mat.

Eftir samráð gjøgnum antið við bretsku hermaktina í Føroyum, varð tá matur sendur til ferðina frá Havnini um borð á skipið á Skálafirði. Fram varð hildið fyri monnunum, at tað var ikki hóskandi at krevja løn, meðan teir bíðaðu, tá ið tað var í teirra interessu at fáa fylgiskap av herskipi, og tá teir fingu matin fyri hesa tíðina og ferðina til Íslands ókeypis.

Ferðin yvir um gekk annars vel, og aftaná at hava silgt í 26 tímar lógdu skipini at við bryggjuna í Reykjavík. Har stóðu vognar til reiðar frá bretsku hermaktini, og teir førdu so fólk og tað, menninir høvdu við sær út í leir í Skorjafjørð, og var hesin leirur gjørdur til 800 menn.

Dagin eftir, 31. mai, varð kontrakt fyrileggd fyri menninar, og stóð hará, at $^1/_3$ av lønini skuldi afturhaldast til tryggjan fyri gjald av skattaavgiftini og eventuelt útreiðslur fyri kost.

Annan dagin eftir at Føroyingarnir vóru komnir til Reykjavíkar, vóru álitismenninir uppi hjá danska gesantinum, sum spurdi, um Føroyingarnir høvdu nakrar pengar við sær. Teir svaraðu: nei. Hann tilbeyð teim tá at fáa frá sær sum forskot 15 kr. hvør og var hetta tilsamans o. n. 3.900 kr.

Álitismenninir fyri Føroyingum hildu tað ikki vera rett at setta inn í kontraktina, at $^1/_3$ av lønini skuldi afturhaldast til tey nevndu endamál, men heldur fáa danska gesantin í Reykjavík til at tryggja pliktigt gjald av hesum peningi, hæði tí at hann kendi betri til lógviðurskiftini í Íslandi, og tí at hann var biðin um at hava um hendir rindan av forskoti til familjurnar heima í Føroyum. Treytin um, at $^1/_3$ av lønini skuldi afturhaldast, gekk so út av kontraktini, móti at allur tann peningur, sum Føroyingar tjentu í Íslandi, varð goldin inn til danska sendimannin í Reykjavík. Sendimaðurin hevði so at stíla fyri forskotunum til løgtingsskrivstovuna og annars at gjalda tann pening, sum menninir beinleiðis skuldu fáa goldnan í hondina gjøgnum álitismenninar.

Álitismenn Føroyinga hildu tað avgjort vera hentast, um Føroyingar kundu keypa mattilfarið, teir skuldu brúka, frá bretsku hermaktini, eisini av teirri grund, at mattrot í Íslandi var til staðar. Tingið varð um hetta, og 2. juni komu partarnir so ásamt um, at Føroyingar kundu keypa mattilfarið sum tilskilað, og síðan varð kontraktin undirskrivað tann 6. juni.

Teir fyrstu dagarnar vildu sumnir av Føroyingunum ikki fara í arbeiði, av tí at kontraktin ikki var gjørd liðug, men 4. dagin í juni mánaða var tá arbeiðið byrjað.

Meðan hetta millumbilið fór fram, fingu álitismenn Føroyinga at vita, at bretska hermaktin hevði útpeikað til yvirformenn og formenn yvir Føroyingum Hjaltalin frá Tórshavn og Due Sørensen, fyribils búgvandi í Havn, komin í land frá danska skipinum „Amerika". Hvussu henda útnevningin annars er farin fram, er teim føroysku álitismonnunum ókunnugt.

6. juni var kontraktin liðug til undirskrivingar, og álitismenninir fóru út á arbeiðsplássið við hennl. Føroyingarnir vórðu kallaðir inn í holdum til at undirskriva kontraktina.

Sørensen, sum var vorðin yvirformaður, vildi sjálvur nokta og mældu eisini hinum til at nokta at undirskriva kontraktina av teirri grund, at hann sagði, at teim var lovað 10 kr. um dagin fyri tá tíðina, teir høvdu bíðað á Skálafirði, og hann vildi mæla til ikki at undirskriva, fyrrenn hesin peningur

var goldin. Ymsir menn tóku undir við honum, harmíllum Hjaltalin; eisini varð kravt, at tað skuldi standa í kontraktini, at teir fingu 2,43 kr. í tíman, sum tá var galdandi løn á staðnum. Álitismenninir vístu á, at hetta var óklókt, við tað at pristalið var hekkandi, og um tímalønin nú varð fastsetgd í kontraktini, vildu teir aldri fáa meira seinri. Hetta vísti seg at vera rætt, við tað at tímalønin seinri kom upp í 2,67 kr. í tíman. Tá ið menninir hoyrdu hesa frágreiðslu, kom maður av manni at skriva undir, og tað endaði so við, at kontraktin varð undirskrivað av øllum, sum tá vóru til staðar.

Aftaná hetta innstilladu álitismenn Føroyinga, at Sørensen og Hjaltalin vórðu koyrdir úr leirinum, men hetta hendi tó ikki við tað fyrsta.

Álitismenn Føroyinga, sum deils fingu teirra upplýsingar og stuðul frá danska sendimanninum, løgdu skjótt til merkis, at tey boð, her komu igjøgnum ofta líka aftaná vórðu kollrend av teim boðum, sum komu frá tí bretsku hermaktini, og av tí at bretska hermaktin stóð í jøvnum sambandi við danska sendimannin, máttu álitismenninir halda, at tann mótsettningur, sum her kom fram, var atvoldaður av teimum monnum, sum bretska hermaktin hevði tikið til yvirformenn.

Fyrsta kontanta gjald, sum goldið var Føroyingum, var goldið fríggjadagin 13. juni s. p. kl. 9, og vísti tað seg nú, at Føroyingar bert fingu 15 kr. goldnar fyri vikuna til hvønn mann. Ein partur av Føroyingunum var beinanvegin ógvuliga harmur um ikki at fáa meiri pening um hendur, og teir góvu álitismonnunum og danska sendimanninum í Reykjavík skuldina fyri, at hetta var hent. Sannleikin var tann, at tað var íslendska ríkisstýrið, sum gjøgnum Landsbankan í Íslandi ásetti, at Føroyingar ikki skuldu hava metri enn 15 kr. um vikuna goldnar til hvønn mann. Hetta varð eisini sligið upp í leirinum.

Meðan peningur varð goldin tann fyrsta dagin, trongdu einaferð 8—10 manns inn á skrivstovuna, og fórn hóttandi fram móti álitismonnunum. Móti sínum vilja vóru teir í hesum viðfangi noyddir til at lata fleiri pengar út, enn á var sett.

Frá hesum degi av fór ein agitatión fram millum teir føroysku arbeiðararnar og aðrastaðir um, at tað vóru álitismenninir, sum saman við danska sendimanninum í Reykjavík høvdu fingið ásett, at Føroyingarnir skuldu fáa so lítið av peningi goldið. Víðari varð agiterað við at niðurleggja arbeiðið, um ikki meira peningur kundi fáast til vegar.

Ismar Joensen úr Fuglafirði setti seg á odda fyri hesum, fekk eitt lista í lag, hvarí menn kundu teikna seg fyri at niðurleggja arbeiðið, um teir ikki fingu sína vikuløn goldna fullút, burtursið frá tí, sum annars skuldi verða goldið í Føroyum sum forskot.

14. juni kemur ein bretskur officerur í leirin og spyr, hvat tað vil siga, at fleiri Føroyingar ikki vóru mettir til arbeiðis henda dagin. Álitismenninir søgdu, at teir høvdu kenslu av, at nakað var í umbúna viðvíkjandi arbeiðsstøðgi, men teir vistu einki um, at tað skuldi henda í dag. Annar av álitismonnunum fór tá beinanvegin á arbeiðsplássið, kallaði formennirnir saman og bað teir hvør í sínum lagi tala við sínt hold um, hvørjir av monnunum ið vildu arbeiða, og hvørjir ikki. Allir, sum vóru á arbeiðsplásstnum tá í løtuni, játtaðu, at teir vildu arbeiða, men hinir, sum ikki vóru á plássinum, vórðu av Onglendingum roknaðir fyri at hava niðurlagt arbeiðið.

Um hetta bilið lá eitt føroyskt skip „Normanner" í Reykjavík, og Onglendingar ásettu, at teir, sum streikaðu, skuldu verða heimsendir við hesum skipi, og bóðu pláss fyri teimum um borð.

Onglendingar gjordu eitt lista yvir teir menn, sum høvdu niðurlagt arbeiðið, og bóru listan til danska sendimannin í Reykjavík. Á hesum lista var navnið á Ismar Joensen.

Annar av álitismonnunum varð kallaður oman til sendimannin við-

víkjandi spurninginum at góðkenna heimsendingina av monnunum, men hann hað um loyvi til gjøllari at umhugsa hetta. Aftaná tað, at álitismenninir høvdu talað saman um tað, sum her fyriforst, og vóru komnir til tað úrslit, at best var fyri hesa ferð ikki at senda nakrar menn heim, tí tað kundi valda ikki hert ófrið millum Føroyingar í Reykjavík, men eisini heima í Føroyum, og tí at teir vóru vísir í, at teir við slíkari heimsending ikki høvdu rakt teir, sum fyrst og fremst áttu at verið heimsendir, góvu teir sendimanninum tað svar, at biðja hann um at steðga tí, sum her var í umbána, fyri hesa ferð.

Menninir vórðu tí ikki heimsendir.

Um hetta bilið vórðu Hjaltalin og Sørensen settir frá sum yvirformenn.

Viðvikjandi matinum vísti tað seg, at maturin var góður, men breyðið var ov lítið, av tí at menninir einki rugbreyð fingu. So funnu álitismenninir eftir samráð við vissar Føroyingar uppá ráð at royna at fáa breyðkort í Íslandi, og hetta eydnaðist teimum við hjálp av einum manni, sum sat í íslendska handilsministerlinum. Breyðkortini vórðu so givin til ein bakara í Reykjavík, sum bakaði breyðini, koyrdi tey 2 og 3 ferðir um vikuna út í leirin, so menninir altíð fingu breyð, tá teir komu úr arbeiði.

Herafturat fingu Føroyingar tubbak og eigarettir sendanli frá Onglendingunum eina ferð um vikuna ókeypis til brúk í leirinum.

Um morgunin 12. juli kl. 10½ kom Ismar Joensen inn á skrivstovu Føroyinga og bað um eina rekvisition til ein frakka. Hetta var honum játtað, og álitismaðurin skrivaði rekvisition uppá ein arbeiðsfrakka, alt eftir teirri avtalu, sum gjørd var við íslendska ríkisstýrið, ein avtala, sum segði, at Føroyingar kundu fáa arbeiðstoy í Íslandi eftir rekvisition útyvir tann pening, teir fingu útgoldnan um vikuna. Ismar Joensen undirskrivar rekvisitiónina. Hann fær avtrykk av rekvisitiónini og sær tá, at tað er ein arbeiðsfrakki hann kann fáa. Hann er ógvuliga illur, brukar hørð orð mótl álitismanninum og krevur, at hann skal broyta tað, sum stendur í rekvisitiónini, annars vil hann — Ismar Joensen — geva honum ein, sum kundi rætta hansara hugsan. Hetta varð sagt í einum hóttandi tóna. 2 aðrir menn vóru til staðar á skrivstovuni. Teir skuldu eisini hava rekvisition. Álitismaðurin skuldi skunda sær til býin fyri at greiða ein spurning har viðvikjandi Grønlandskjøti, sum skuldi sendast til Føroyar við „Normanner". Hann bað menninar fara út og segði við hinar 2 menninar, um teir ikki vildu bíða við rekvisitiónini, til hann kom aftur. Í tí hann er við at fara, hevir Ismar Joensen nevan uppi og slær álitismannin aftanfrá. Í tí hann slær, sigur annar av hinum monnunum: „Slá ikki, tú ert óður". Álitismaðurin var komin inn aftur í skrivstovuna, setti seg við borðið, segði við annan av hinum monnunum, at minnast til, hvat her hendi. Síðan fóru menninir út, og álitismaðurin fór oman til Reykjavíkar.

Tá ið álitismaðurin var farin av stað, fór Ismar Joensen til Reykjavíkar við øðrum av teimum monnunum, sum inni vóru, var uppi hjá danska sendimanninum og spurdi um hann var meldaður fyri tað, sum farið var fram á skrivstovuni.

Sama dag um kvøldið kl. 10 kom Peter Solmunde við einum ella tveimum øðrum monnum úr Reykjavik og fór inn í proviantrúmið, har J. B. Joensen frá Gjógv sat og arbeiddi, og hevði hann við proviantin at gera. Peter Solmunde hevði góða kenning av brennivíni. Hann gerst gruggutur og kemur at togast við Joensen, og fað endar við, at hann fær lykilin á proviantrúminum frá honum. Joensen fór út, hinir fóru eisini út, men hvør fór sín vegin. Peter Solmunde helt so leiðlna móti barakkøkinum, har ljós var, men stongt, tí vakt var sett, breyt inn, kom til bendurs við vakthavandi kokk, sum fekk klæðini rivin á kroppinum.

Annar álitismaðurin kemur tá yvir í køkin og sær, hvussu vorðið er, men tá var Peter Solmunde farin.

Dagin eftir, 13. juli, skrivar amtsmaðurin bræv til danska sendimannin í Reykjavík um tað, sum hent var dagin frammanundan, og bað hann innstilla til brettsku hermaktina, at teir báðir menninir, sum høvdu gjørt hervork haruppí dagin fyri, Ismar Joensen og Peter Solmunde, vórðu burturvístir frá leirinum.

So gingu nakrir dagar.

Tann 24. juli kl. 8—9 s. p. kemur major Leathley niðan í leirin við egna vogni og einum lastvogni, sendi boð eftir Ismar Joensen og Peter Solmundi og krevur teir at koma við honum oman til Reykjavíkar. J. B. Joensen tekur klæðini hjá teimum í vognin við. Í ferðini oman til Reykjavíkar var eisini Joen Rasmussen og J. B. Joensen. Kaptain Leathley koyrir oman til politistøðina í Reykjavík, har menninir fara inn. J. B. Joensen tók teirra toy. Kaptain Leathley greiðir so frá, at har skuldu menninir vera í o. u. 2 timar, tí tá skuldi skip sigla úr Reykjavík, har menninir skuldu við.

Dagin eftir sendir Joen Rasmussen fjarrit til formannin fyri landsnevndini, A. Samuelsen, um, at menninir Ismar Joensen og Peter Solmundo vóru heimsendir. Tað er eisini kunnugt, at danski sendimaðurin í Reykjavík um sama tíð hevur sent fjarrit til amtið.

Tá hetta dagin eftir spurdist í leirinum, at menninir vóru farnir á politistøðina í Reykjavík, gjørdust fleiri av Føroyingunum illir, kravdu teir 2 menninar aftur, ella vildu teir niðurleggja arbeiðið. Kaptain Leathley kemur tá niðan í leirin, kallar arbeiðsformenninar saman og sigur teimum, at Ismar Joensen og Peter Solmunde kundu ikki koma aftur, tí teir vóru farnir frá Reykjavík.

Hetta hendi tann 25. juli.

Dagin eftir løgdu nakrir av Føroyingunum arbeiðið niður. Hjaltalin møtti fram og hótti menninar, sum vildu fara í arbeiði, men teir lótu sær hetta ikki bjóðað, og teir fóru allir í arbeiði við nøkrum fáum undantøkum.

Álitismenninir vendu sær so til danska gesantin og bóðu hann einki gera viðvíkjandi tí, sum líka nú var hent, men dagin eftir kom Hjaltalin fullur úr Reykjavík, hóttir ein av monnunum, sum henda dagin var farin í arbeiði, lovar ilt, so maðurin tók seg undan, fer inn í tjaldbúðina, har Hjaltalin ikki slapp eftir honum.

Álitismenninir vendu sær aftur til danska sendimannin, bóðu hann senda fjarrit til Føroya og spyrja amtmannin um, hvat ið hann visti at greiða frá Hjaltalins fortíð. Fjarrit kom so aftur úr Føroyum til danska sendimannin, og avskrift var send av fjarritinum til bretska generalin, polltimeistarin í Reykjavík, kaptainin, sum hevði tikið Hjaltalin til yvirformann, Altýðublaðið og teir føroysku álitismenninar. Síðan kom boð frá bretsku hermaktini um, at Hjaltalin var avsettur sum yvirformaður og skuldi fara burtur úr leirinum.

Hin 27. juli kom vognur eftir Hjaltalin og førdi hann oman til Reykjavíkar.

Tá ið 3 mánaðir vóru ginguir, og tann við kontraktini fast ásetta tíðin var farin, kravdu nógvir av monnunum at sleppa heim. Frá bretsku hermaktini kom boð um, at hildið skuldi verða fram við arðeiðinum til seinast í september mánaða. Hetta førdi við sær, at summir av monnunum vildu halda uppat at arbeiða, nakrir tí teir vildu sleppa heim til Føroya at gera heystarbeiði. Tingingar komu so í lag millum bretsku hermaktina og Føroyingarnar gjøgnum danska sendimannin. Bretlendingar hildu fram, at teir, sum vildu sleppa avstað, kundu fara, um teir ikki vóru ov nógvir í tall, men teir skuldu tá sjálvir gjalda ferð sína heim til Føroya, av tí at tað var avgjørt, at bretska admiralitetið sendi skip úr Onglandi seinrapartin í september eftir Føroyingunum fyri at føra teir heim. Einstakir menn fóru um hetta bili til Reykjavíkar og fingu sær arbeiði har, og varð hetta játtað teim av bretska

kaptaininum. Ein maður valdi at fara heim til Føroyar. Hinir vildu so allir halda fram við arbeiðinum.

Lønin vaks nú sambart prístalshækkanína, og arbeiðstímarnir vóru fleiri, av tí at arbeiðið var skipað nakað um. Barakkir skuldu vera bygdar at sova í, og mat fingu teir nu meira enn áður.

Arbeiðið í august og september mánaðum gekk uttan trupulleikar. Seinasti arbeiðsdagur var 19. september.

Hin 20. september fóru menninir um borð í skipið á Reykjavík, sum skuldi sigla teir heim til Føroyar.

Av orsøkum, sum eru Føroyingum óknanugar, kundi hetta skipið ikki fara av stað frá Reykjavík, og avgjort varð so gjøgnum danska sendimannin, at Føroyingarnir skuldu fara um borð á norska skipið „Bergensfjord", sum tá lá fyri at fara til Bretlands við fólki. Hetta skipið sigldi úr Íslandi 22. september. Av teim orsøkum, at tað skipið, sum Føroyingur upprunaliga skuldu fara heim við, varð liggjandi, meðan Føroyingur vórðu fluttir um borð í annað skip, gekk ferðin uttan um Føroyar til Bretlands, har teir komu til lands við Clyde-ánna 25. september.

27. september fóru Føroyingarnir um borð í „Ben-May-Chree" á ferð til Føroya, har teir komu á Skálafjørð 28. september.

29. september komu menninir til Tórshavnar.

Uppgerð av túrinum hjá Føroyingum vísir, at teir tilsamans hava vunnið yvir $^1/_2$ milj. ísl. kr.

Eftir samráðing millum danska sendimannin og býarstýrið í Reykjavík varð avgjørt, at Føroyingarnir í kommunuskatt fyri 4 mánaðir bert skulu gjalda 80 kr. pr. mann.

Hin 7. oktober kl. 17 var fundur hildin í løgtinginum fyri stongdum hurðum, har tingmaður Joen Rasmussen, sum hevði verið eum álitismaður í Íslandi, greiddi frá Íslandsferðini. Tingmenninir J. Patursson og R. Rasmussen gjørdu harða atfinning at tí, sum hent var í Íslandi, og skuldsettu Joen Rasmussen fyri at vera atvold í, at 2 menn — Ismar Joensen úr Fuglafirði og Peter Chr. Solmunde úr Sólarfirði — vóru horvnir. Teir kravdu upplýsing um, hvar hesir menninir vóru, og Joen Rasmussen segði seg ikki vita meira enn tað, hann hevði greitt frá í talu sini.

Herav okst harður orðadráttur, og undir hesum orðadrátti kom fram, at J. Patursson og R. Rasmussen vóru vitandi um, at faðir Ismar Joensens hevði fingið brev frá sonnum, sum lá sjúkur á sjúkrahúsi í London, og teir vóru fullút vitandi um alt, sum teir høvdu spurt um viðvíkjandi Ismar Joensen. R. Rasmussen helt enntá fram, at Ismar Joensen hevði skrivað í sínum brevi til faðir sín, at hann ynskti, at einki varð gjørt í hesum máli, fyrrenn hann sjálvur kom aftur til Føroyar.

Patursson setti fram soljóðandi uppskot til gerðabókina:

„Formannaskapur tingsins verður biðin um sum skjótast at gera allar neyðturvuligar útvegir fyri at fáa teir 2 Føroyingarnar — Ismar Joensen og Peter Solmunde — heim aftur til Føroyar, sum saman við øðrum Føroyingum í vár fóru til Íslands í Bretavinnu, men nú eru burtur frá Føroyum."

Uppskotið varð samtykt við 19 atkvøðum móti 0.

14. oktober kl. 19 var aftur tingfundur fyri læstum durum viðvíkjandi sama evni. J. Patursson setti fram fyrispurning, um einki svar var komið uppá viðtøkuna frá fundi fyri læstum hurðum um, hvar teir menninir eru, sum ikki eru heimafturkomnir úr Íslandi.

A. Samuelsen upplýsti, at amtmaðurin hevði telegraferað til gesantin í Reykjavík og hevði fingið til svar, at gesanturin hevði fyrilagt málið fyri bretsku myndugheit, men at enn einki svar var komið um, hvar menninir vóru.

J. Patursson setti fram hetta uppskot:

Uppskotið, sum løgtingið samtykti á loynifundi 7. oktober at fara

til gerðabókina í málinum um Ismar Joensen og Peter Salmunde, verður sent teim føroysku bløðunum."

Av tí at so fáir tingmenn vóru á fundi, varð uppskotið ikki tikið til avgreiðslu.

Tingfundur varð aftur hildin fyri stongdum hurðum 16. oktober kl. 16. Uppskotið frá J. Patursson frá seinasta loynifundi var upplisið. J. Patursson tók sitt uppskot aftur.

A. Samuelsen bað um at fáa uppskotið tikið upp aftur til viðgerðar.

J. Fr. Øregaard bað amtmannin um at upplýsa, hvat hann hevði kunnleika til, hesum máli viðvíkjandi.

Patursson helt fast við, at ikki var greitt at kvøða um uppskotið.

Amtmaðurin førdi fram:

„Eg telegraferaði sama dag til danska gesantin í Reykjavík og havi fingið svar aftur, at hann hevði sett seg í samband við bretsku myndugheitirnar. Amtið telegraferaði aftur í gjár til gesantin um at framskunda málið, men er enn einki svar komið. Amtið hevur eisini munnliga vent sær til enska konsulin her um tað sama, og eisini havi eg tonkt mær til at telegrafera til danska gesantin í London, fyri at hann kundi sett seg í samband við mannin sjálvan, men havi eg ikki gjørt hetta, tí eg ikki havi fingið mannsins adressu, sum R. Rasmussen lovaði mær á fundinum 7. oktober."

Djurhuus førdi fram:

„Eg sum fungerandi formaður á loynifundi 7. oktober bað løgtingsskrivstovuna fyrileggja uppskotið, sum viðtikið varð, fyri amtmanninum til framførslu. Eg bað tann 14. oktober Patursson lata meg fáa adressuna uppá mannin Ismar Joensen, sum liggur sjúkur í London, og havi eg fyrst nú í dag fingið hana, og skal eg geva amtmanninum hana og biðja hann seta seg í samband við mannin gjøgnum danska gesantin í London."

Djurhuus bað Patursson um at fáa brevið frá Ismar Joensen, sum hann hevur avskrift av, fyri kanuska at fáa upplýsingar úr tí.

Patursson førdi fram:

„Tað er privat, sum eg ikki kann útlevera, men eg haldi, at formaðurin skal biðja um adressuna frá rætta viðkomandi, men kann eg upplýsa, at Ismar Joensen nevnir einki um hin mannin, sum er burtur.

P. M. Dam setti fram uppskot um, at vald varð ein 5-mannanevnd til at gera eitt stutt, rætt referat av tí, sum er farið fram á tingi um arbeiðararnar, sum hava verið í Íslandi í Bretavinnu, serliga viðvíkjandi teimum 2 monnunum, sum vóru tiknir av enska herveldinum.

P. M. Dams uppskot varð sett undir atkvøðisgreiðslu við navnakalli.

Ja atkvøddu: P. M. Dam, J. Patursson, S. P. Zachariasen, P. Petersen, J. Rasmussen, A. Samuelsen, J. Chr. Olsen, H. Justinussen, J. Nielsen, L. Zachariasen, A. Sørensen, S. Ellefsen, J. Fr. Øregaard, J. H. Danbjørg.

Atkvøddu ikki: Joh. Poulsen, J. Danielsen, Kr. Djurhuus, O. F. Joensen, H. Iversen, J. E. Jacobsen.

Burtur: H. Nolsøe, R. Rasmussen, Th. Petersen, J. P. Davidsen.

Biðað varð nú eftir upplýsingum frá amtinum viðvíkjandi hesum 2 monnum, sum burtur vóru staddir.

Tingformaðurin fekk 18. oktober soljóðandi bræv frá amtinum:

„Amtet har under Dags Dato tilskrevet Johs. P. Joensen, Fuglefjord, saaledes:

„I Anledning af Deres Brev af 15. Oktober 1941 vedrørende Deres Søn Ismar Joensen skal man meddele, at Amtet har rettet Henvendelser til de danske Gesandter i Reykjavik og London samt til den britiske Konsul her om Sagen for at faa Deres Søns nuværende Opholdssted konstateret. Gesandten i London er derhos anmodet om at yde Deres Søn al fornøden Assistance, forsaavidt han stadig maatte befinde sig paa St. James Hospital,

London. Denne Adresse er først meddelt Amtet den 16. ds. og er samme Dag meddelt videre til Gesandten i London.

Saa snart nærmere Oplysning om Deres Søn foreligger, vil der tilgaa Dem Underretning."

Hvilket herved meddeles, idet man samtidig bekræfter, at den herværende britiske Konsul den 16. ds. har oplyst, at han fra Storbritannien har modtaget telegrafisk Oplysning om, at Peter Solmunde har ladet sig forhyre ombord i et Fartøj, og at Ismar Joensen henligger som Patient paa et Hospital i London. De britiske Myndigheder har lovet nærmere Oplysning pr. Brev."

7. november kom skriv frá amtinum gjøgnum Løgtingsskrivstovunni, og ljóðar tað soleiðis:

„Det meddeles herved, at Amtet Dags Dato vedrørende Ismar Joensen og Peter Solmunde har modtaget Telegram fra Gesandten i London, hvilket Telegram i Oversættelse lyder saaledes:

„Deres Telegram Nr. 50 Ismar Joensen stadig paa Hospitalet, men nu oven Senge og i god Bedring. Han ønsker at vide, om Løn fra Island er sendt til Lagtinget. Peter Chr. Solmunde gør nu Tjeneste i britisk Skib under britisk Flag."

Idet Amtet iøvrigt henviser til samtidig hermed givne Meddelelser til de paagældende Fædre, hvom Underretning er tilsendt Herr Lagtingsformanden, skal man yderligere bemærke, at man samtidig hermed har anmodet Lagtingskontoret om at oplyse, hvorvidt Ismar Joensen har noget Tilgodehavende fra Arbejdet i Island. Naar Oplysning herom modtages, vil Amtet underrette Gesandten til videre Bekendtgørelse for Joensen, og hvis noget Tilgodehavende kan udbetales den paagældende, vil Amtet drage Omsorg for, at det stilles til hans Raadighed, eventuelt ved Overførsel til London."

Herefter synes der ikke Anledning til at foretage videre i Sagen fra Amtets Side."

Brev frá amtinum til lagtingsformannin ljóðar soleiðis:

„Amtet har under Dags Dato tilskrevet Johs. P. Joensen, Fuglefjord, saaledes:

„I Fortsættelse af Amtets Skrivelse af 18. Oktober 1941 skal man meddele, at Amtet i Dag fra den danske Gesandt i London har modtaget telegrafisk Underretning om, at Deres Søn, Ismar Joensen, stadig opholder sig paa Hospital i London, men at han nu er oven Senge og i god Bedring."

Hvilket herved meddeles."

Annað bræv til lagtingsformannin ljóðar soleiðis:

„Amtet har under Dags Dato tilskrevet Hans M. Solmunde, Solmundefjord, saaledes:

„I Fortsættelse af Amtets Skrivelse af 4. November 1941 skal man meddele, at Amtet i Dag fra den danske Gesandt i London har modtaget telegrafisk Underretning om, at Deres Søn, Peter Chr. Solmunde, gør Tjeneste om Bord i et britisk Skib under britisk Flag.

Amtet gaar ud fra, at det staar Deres Søn frit for at skrive eller telegrafere til Dem, naar han maatte ønske det, og hvis de maatte ønske at sende nogen Meddelelse til Deres Søn, er Amtet villig til at anmode Gesandten om at søge saadan Meddelelse viderebefordret til ham."

Hvilket herved meddeles."

Orsakað av teim upplýsingum, sum nú fyrilógu um Ismar Joensen og Peter Chr. Solmunde, helt løgtingið tað ikki vera vert tá at gera meira við hetta málið.

Mikudagin 26. november kom fjarrit til amtið um, at Ismar Joensen var á veg til at fara heim til Foroya.

Við tað at „Dagblaðið" fleiri ferðir og serliga eina ferð við navns undirskrift tekur málið um Ismar Joensen og Peter Solmunde til viðgerðar og ger harðar atfinningar viðvíkjandi atburðinum hjá føroyskum álitismonnum í Íslandi, og við tað at umsókn við nógvum undirskriftum orsakað av hesi blaðskriving kom inn til tingið um at geva frágreiðing um, hví menninir, Ismar Joensen og Peter Solmunde, vóru tiknir og burtursendir úr leirinum, tók løgtingið málið aftur til viðgerðar og valdi eina 5 mannanevnd til at kanna hetta mál.

Henda nevndin hevur her givið sína frágreiðslu viðvíkjandi Íslandsferðini og skal loyva sær at skoyla uppí:

Tær misskiljingar og teir trupulleikar, sum hava verið í Íslandi, eru komnar av nøkrum fáum monnum, og tað, sum teir mest hava hongt seg í, er, at ov lítil peningur hevur verið teim goldin beinleiðis haruppi, at byrja við 15 kr. um vikuna, og teir vildu skuldsetta álitismenninar saman við danska sendimanninum í Reykjavík til at hava fingið hesa skipan í lag.

Út yvir hesar 15 kr. kundu teir keypa sær tey klæði teim tørvaði.

Tað varð kunngjørt fyri teimum haruppi, at skipanin var komin frá íslendska ríkisstýrinum, og at hvørki álitismenninir ella danski sendimaðurin visti nakað um hetta frammanundan. So skjótt sum skipanin kom til teirra kunnleika, settu teir seg í samband við ríkisstýrið í Íslandi fyri at tinga um at fáa loyvi til at galda Føroyingunum meira pening, og skulu vit her seta upp úrslitið av hesum tingingum í bræví frá íslendska handilsráðharranum, dagsett 19. juni 1941:

„Under Henvisning til de med Gesandtskabet førte Forhandlinger om Lønningsudbetalingen til de færøske Arbejdere, tillader Ministeriet sig at meddele, at man i Betragtning af de af Gensandtskabet anførte Omstændigheder, kan billige, at den kontante ugentlige Udbetaling pr. Mand forhøjes fra ca. 15 Kr. til ca. 25 Kr.

Som allerede tidligere meddelt ser Ministeriet sig ikke i Stand til at tillade, at hele Arbejdslønnen udbetales i islandske Kroner, for det første fordi det af Hensyn til Varemangelen i Island er nødvendigt at begrænse Udlændinges Køb af importerede Varer mest muligt, og endvidere fordi dette vil bidrage til at trykke den islandske Kroneo Værdi".

Dagin aftaná at hetta skriv var komið, fóru tingingar fram við íslendska ríkisstýrið viðvíkjandi rekvisitiónum av arbeiðstoy, og varð tá avgerð tikin um, at rókningarnar uppá rekvisitiónirnar skuldu verða sendar til konsul Storr í Reykjavík, sum stóð íslendska ríkisstýrinum til svars fyri, at tað var arbeiðsklæðir, sum Føroyingarnir fingu gjøgnum rekvisitiónirnar.

Um somu tíð varð skipað soleiðis fyri, at Føroyingar kundu fáa neyðturvulig arbeiðsklæðir til brúks í ringum veðri hjá O. Ellingsens forrattning í Reykjavík, og varð hetta eisini givið sum forskot.

Herav vil tað kunna síggjast, at tað ikki eru teir føroysku álitismenninir olla tann danski sendimaðurin, sum hava tikið nakra avgerð um, hvussu nógvur peningur skuldi vera goldin Føroyingunum í Íslandi, men at tað var tað íslendska ríkisstýrið, sum hevði avgerðina í sínum hondum.

Uppskot.

Tingið tekur ímóti tí í ídlitinum givnu frágreiðing, sum verður at senda teim føroysku bløðunum.

Løgtingið, 28. november 1941.

Louis Zachariasen. *Jacob Nielsen.* *P. Petersen.*

J. Davidsen. *A. Samuelsen.*

A/S. „Faro Amtstidende"s Bogtrykkeri, Thorshavn.

Udvalgsbetænkning

i

Lagtingssag Nr. VII-2/1941:

(Jørð til veltingar).

Nærværende Sag var til Drøftelse i den ekstraordinære Lagtingssamling 1940, og blev Sagen overgivet Lagtingets Varendvalg, der udsendte en Opfordring til Jordejere og Brugere af Jord om under Krigen at give det størst mulige Antal jordløse Personer Adgang til paa deres Ejendom at dyrke Kartofler, Roer og andre Grøntsager.

Denne Opfordring blev, saa vidt vides, efterkommet i stor Udstrækning.

Sagen er nu atter forelagt Lagtinget og af dette overgivet til nærværende Udvalg, der herefter skal udtale:

Ved Trøloven af 1894 aabnedes der Adgang for Besiddelsesløse til fra Fæstegodset at erhverve Haugejord til Opdyrkning. Denne Adgang til Opdyrkninger er udvidet ved Jordloven af 1937 — Lov for Færøerne Nr. 174 af 24. Maj 1937 om Jordbrugets Fremme ved ogsaa at omfatte Odelsgodset, idet nævnte Lov bestemmer, at Landbrugsraadet, naar Ejere af Jord, der er bekvemtbeliggende til Opdyrkning, ikke selv sørger for behørig Opdyrkning, eller Ejendomsforholdene eller Loddernes Størrelse skønnes at være til Hinder for en planmæssig Opdyrkning, *kan*, naar vedkommende Ejer modsætter sig Salg eller Udleje paa mindst vedkommende Opdyrkers og Hustrus Livstid, rejse Sag mod Ejeren ved Landvæsenskommissionen (respekt. Overlandvæsenskommissionen) om tvungen Afstaaelse, *og kan Landvæsenskommissionen* (respekt. Overlandvæsenskomm.) *kan tilsidesætte et saadant Afstaaelseskrav, for saa vidt det skønnes, at de Fordele, der herved opnaas, ikke overstiger de Ulemper, der forvoldes.*

Der har fra forskellig Side været anket over, at Behandling og Tilendebringelse af Opdyrkningssager har taget uforholdsmæssig lang Tid, naar Ejere og Besiddere modsætter sig en Afstaaelse, idet Sagerne i saa Fald kræves forelagt Grandestævne, Landvæsenskommission og ofte Overlandvæsenskommission før saa til sidst muligvis at ende med et Afslag. Hertil skal bemærkes, at Sager, der drejer sig om Udskiftning af Fæstejord ikke kræver Grandestævnebehandling jfr. §§ 78 og 79 i Udskiftningsloven af 27. Marts 1939, ligesom ogsaa Sager om tvungen Afstaaelse forøvrigt heller ikke kræver Grandestævnebehandling jfr. Jordlovens § 34 og § 39. At dette betyder en meget væsentlig Forkortelse af Ekspeditionstiden, naar Sagerne straks kan forelægges Landvæsenskommissionen, i Stedet for først Grandestævne, saaledes som Tilfældet var efter den gamle Traslov, er aabenbart.

Det maa saaledes siges, at de nye Lovbestemmelser saavel adgangsmæssigt som ekspeditionsmæssigt betyder et meget væsentligt Fremskridt. Ganske vist maa det samtidig indrømmes, at foreliggende Kendelser fra Landvæsens- og Overlandvæsenskommission maa føles som en Skuffelse for dem, der ansaa Adgangen for Besiddelsesløse til Opdyrkningsjord tilstrækkelig sikret gennem de anførte Lovbestemmelser.

Udvalget mener imidlertid ikke, at der er tilstrækkelig Anledning til at foreslaa Ændringer i de anførte Lovbestemmelser, idet man formener, at det snarere er det af Landvæsens- og Overlandvæsenskommissionen anlagte Skøn, der ikke er faldet sammen med Lovens Aand og Forudsætningerne for denne, end det er selve Loven, der er mangelfuld.

Som allerede anført bestemmer Jordloven, at Landvæsenskommissionen kun kan tilsidesætte Krav om Afstaaelse af Opdyrkningsjord, naar Fordelene ved at paagældende Areal bliver opdyrket er mindre end den Ulempe, Afstaaelsen forvolder vedkommende Ejer. Ved Indlagelse af Haugejord egnet til Opdyrkning skulde det synes indlysende, at der i næsten alle Tilfælde opnaas en Fordel for Samfundet ved at Haugejord opdyrkes frem for at ligge hen som almindelig Haugejord og derved kun ydende en Brøkdel af den Afgrøde, Arealet ellers kan yde i opdyrket Stand. Efter de af Statens Forsøgsvirksomhed anlagte Forsøg, man det ogsaa anses tilstrækkeligt dokumenteret, at en Afstaaelse af Haugejord til Opdyrkning meget vel kan erstattes Haugens Ejere og Besiddere ved, at der ydes disse en fast aarlig Leje eller en Sum engang for alle tilstrækkelig stor til, at der paa andet egnet Sted i Haugen kan anlægges og kultiveres egnede Arealer til Græsning for Faar eller til Avling af Hø som Tilskudsfoder om Vinteren til Faarene. Selvfølgelig har saavel den, som afstaar Opdyrkningsjord, som Samfundet har Krav paa, at den, der faar Opdyrkningsjorden overdraget, virkelig udfører det Opdyrkningsarbejde, der var tiltænkt. For at paase, at dette bliver opfyldt, behøves imidlertid ikke nogen særlig Lovbestemmelse, idet det er Udvalget bekendt, at alle de nuværende Lejekontrakter og Skøder indeholder fornøden Bestemmelse om Opdyrkningspligt. Det maa formodes, at saavel Medlemmer af Landvæsenskommissionen som Overlandvæsenskommissionen ved fremtidige Skøn, og forinden en eventuel Kendelse afsiges, gør sig nøje bekendt med Forsøgsvirksomhedens Resultater og lader disse være vejledende med Hensyn til Bedømmelsen af Spørgsmaalet om den samfundsmæssige Nytte ved Opdyrkningen, ktr. den Privates Interesser og den denne tilkommende Erstatning.

Ved at henvise til det anførte mener Udvalget ikke at burde fremsætte Forslag til Lovændring, men skal blot foreslaa, at der tilstilles samt-

lige Medlemmer af Landvæsens- og Overlandvæsenskommissionen Afskrift af nærværende Betænkning.

Forslag:

Der meddeles samtlige Medlemmer af Landvæsens- og Overlandvæsenskommissionen Afskrift af nærværende Betænkning.

Búnaðarnevndin, 9. oktober 1941.

J. P. Davidsen. m. f. *L. Zachariasen.* v. f. *Kr. Djurhuus.* *H. Iversen.* *P. Petersen.*

A/S. „Faro Antillensis"'s Bogtrykkeri, Thorshavn.

RED: 10 X

Nasjonalbibliot

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 1